| **Býráðsfundur**<br>12. september 2016 | Blað nr.: 13272 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 12. september 2016

**Kl**. 18:00

**Stað**: Býráðssalurin

**Málsnr:**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Helena Dam á Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Elin Lindenskov
Sjúrður Olsen
Sigrún Mohr

**LUTTÓKU EISINI:**
Jóan Petur Hentze
Mikael Viderø
Ingunn Eiriksdóttir
Sigurð Ó Vang
Randi Saxov

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>12. september 2016 | Blað nr.: 13273<br>Formansins merki: |

## Innihaldsyvirlit

**Síða**

### Til viðgerðar


| | | | |
|---|---|---|---|
| 200/16 | 16/00042-1 | Mál beind í nevndir 2016 | 13276 |
| 201/16 | 14/00601-10 | Útbygging av Hoyvíkshøllini | 13277 |
| 202/16 | 14/00984-27 | Skúla- og ítróttarhøll í Kollafirði | 13286 |
| 203/16 | 16/01711-1 | Vatnrussjibani vm. til Svimjihøllina í Gundadali | 13292 |
| 204/16 | 16/00407-3 | Graslíki á komandi fótbóltsvøll í Hoyvík - "Hoyvíksvøllur" | 13295 |
| 205/16 | 16/03292-3 | Politikkur um upplýsingartrygd | 13300 |
| 206/16 | 15/01396-2 | Regnvatnsleiðing úr Marknagili - projekt | 13301 |
| 207/16 | 16/02610-3 | Eftirlitsfrágreiðing 09.06.2016 - Tyrvingarplássið í Húsahaga | 13304 |
| 208/16 | 16/02171-45 | Forkanningar : Nýtt tyrvingarpláss (2003-2242) | 13306 |
| 209/16 | 14/01624-1 | Kommunala Brennistøðin : Útskifting av skrottpressu | 13313 |
| 210/16 | 14/05441-1 | Umhvørvispolitikkur hjá Tórshavnar kommunu | 13316 |
| 211/16 | 15/03123-10 | Klagur um larm í Kollafirði vegna skip sum liggja við kei | 13321 |
| 212/16 | 16/02881-1 | Uppskot til broyting av serstøku byggisamtykt nr. 7 og almennu byggisamtyktini við Óðinshædd | 13325 |
| 213/16 | 16/02924-1 | Serstøk byggisamtykt fyri útstykking á Hamrabøi | 13326 |
| 214/16 | 16/02840-1 | Uppskot til regulering av almennu byggisamtyktini vestan fyri Villingardalsvegin | 13327 |
| 215/16 | 16/02859-1 | Serstøk byggisamtykt fyri útstykking undir Kongavarða | 13328 |
| 216/16 | 16/01463-2 | Umsókn um broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 1045q, Tórshavn. | 13329 |
| 217/16 | 16/01991-55 | Serstøk byggisamtykt fyri útstykking 200 - við Myllutjørn - eystanfyri Karlamagnusarbreyt - broyting av byggisamtykt (2007-1719) | 13330 |
| 218/16 | 16/02858-1 | Avtøka av serstakari byggisamtykt fyri útstykking undir Gráasteini | 13336 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 219/16 | 16/01882-5 | A-PLAN : Umsókn um byggiloyvi til kova við skálkalág á ognina matr. nr. 553, Tórshavn | 13337 |
| 220/16 | 16/01662-8 | Umsókn um byggiloyvi til útbygging á matr. nr. 870q, Tóshavn | 13339 |
| 221/16 | 16/01240-2 | Umsókn vegna Sp/F ATH við Bjarna Kyster, um keyp av lendi til parkering, í samband við at felagið umbyggir bygning á matr. nr. 1381n, til hotel. | 13342 |
| 222/16 | 14/05197-3 | Glyvursvegur - ummatrikulering | 13345 |
| 223/16 | 16/00387-3 | Umsókn um, at kommunan yvirtekur Brøttulíð, á matr. 1184 og 886, Tórshavn. | 13348 |
| 224/16 | 16/00392-3 | Umsókn um, at kommunan yvirtekur privata vegin Meinhartstrøð, matr. 1115o Tórshavn | 13349 |
| 225/16 | 16/00416-3 | Umsókn um at kommunan yvirtekur privatan veg undir Heygnum matr. 1001a, Tórshavn | 13350 |
| 226/16 | 14/02587-3 | Umsókn um at TK yvirtekur ovarara part av brøttubrekku matr. 1236 Tórshavn | 13351 |
| 227/16 | 16/00431-3 | Umsókn um at kommunan yvirtekur veg matr. 688y í Stoffalág | 13352 |
| 228/16 | 16/00611-3 | Umsókn um at Tórshavnar kommuna yvirtekur P-øki og veg á Blómubrekku, 1363a | 13353 |
| 229/16 | 16/01927-4 | Umsókn um, at kommunan yvirtekur gøtuna millum Vatnsoyraveg og Sandá, matr. 992m Tórshavn | 13354 |
| 230/16 | 16/02148-4 | Umsókn um, at Tórshavnar kommuna yvirtekur privatan veg á Haraldsrtrøð, matr. 1039l Tórshavn | 13355 |
| 231/16 | 16/00954-3 | Umsókn um at Tórshavnar kommuna yvirtekur Hvannkrók matr. nr. 1413t Tórshavn | 13356 |
| 232/16 | 16/01724-1 | Átak parkeringspolitikkur - Parkeringsloyvir til íbúgvar í miðbýnum | 13357 |
| 233/16 | 16/02185-1 | Broyting í reglugerð fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privatan bústað | 13360 |
| 234/16 | 15/02599-3 | Umsókn um at vera við í útlutan av grundstykkjum í Kollafirði | 13362 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 235/16 | 16/02969-2 | Umsókn um at vera við í útlutan av grundstykkjum undir Kongavarða | 13364 |
| 236/16 | 16/02981-2 | Umsókn um at vera við í útlutan av grundstykkjum undir Kongavarða | 13366 |
| 237/16 | 14/00218-2 | Umbygging Býarbókasavnið heildarætlan | 13368 |
| 238/16 | 16/01873-1 | Fíggjarætlan 2017 | 13375 |
| 239/16 | 16/02132-1 | Framflyting og meirjáttan Tórshavnar havn 2016 | 13379 |
| 240/16 | 16/00040-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2016 | 13380 |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>12. september 2016 | Blað nr.: 13276<br><br>Formansins merki: |

## ***200/16 Mál beind í nevndir 2016***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 5/16 | 16/00042-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 34/16 | 16/00042-1 |
| 3 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 69/16 | 16/00042-1 |
| 4 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 97/16 | 16/00042-1 |
| 5 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 125/16 | 16/00042-1 |
| 6 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 159/16 | 16/00042-1 |
| 7 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 200/16 | 16/00042-1 |

**Málslýsing:**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Tikið til eftirtektar.

# 201/16 Útbygging av Hoyvíkshøllini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 12.02.2014 | 6/14 | 14/00601-10 |
| 2 Mentamálanevndin | 10.04.2014 | 66/14 | 14/00601-10 |
| 3 Mentamálanevndin | 07.05.2014 | 79/14 | 14/00601-10 |
| 4 Fíggjarnevndin | 24.06.2014 | 199/14 | 14/00601-10 |
| 5 Býráðsfundur | 25.06.2014 | 154/14 | 14/00601-10 |
| 6 Mentamálanevndin | 24.06.2014 | 154/14 | 14/00601-10 |
| 7 Mentamálanevndin | 03.09.2014 | 165/14 | 14/00601-10 |
| 8 Mentamálanevndin | 08.10.2014 | 184/14 | 14/00601-10 |
| 9 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 196/14 | 14/00601-10 |
| 10 Mentamálanevndin | 26.11.2014 | 228/14 | 14/00601-10 |
| 11 Mentamálanevndin | 14.01.2015 | 4/15 | 14/00601-10 |
| 12 Býráðsfundur | 29.01.2015 | 8/15 | 14/00601-10 |
| 13 Mentamálanevndin | 15.06.2015 | 159/15 | 14/00601-10 |
| 14 Fíggjarnevndin | 22.06.2015 | 181/15 | 14/00601-10 |
| 15 Býráðsfundur | 22.06.2015 | 129/15 | 14/00601-10 |
| 16 Mentamálanevndin | 31.08.2016 | 232/16 | 14/00601-10 |
| 17 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 288/16 | 14/00601-10 |
| 18 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 201/16 | 14/00601-10 |

**Málslýsing:**
Hoyvíkshøllin varð tikin í nýtslu í 2002. Neyðugt er við dagføring av høllini m.a. tí hølisviðurskiftini ikki eru nøktandi. Talan er m.a. um umklæðingarrúm, wc og gongd, sum eru ov smá. Eisini er tørvur á einum duri, soleiðis at fólk ikki koma beint inn í høllina uttanífrá. Í sambandi við nevndu dagføring skal gerast ein lýsing av tørvinum og kostnaðarmeting.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 100.000 kr. av játtaðum íløgum á trivnaðarøkinum ætlaðar Høllini á Hálsi, til at lýsa tørvin á at dagføra Hoyvíkshøllina og gera kostnaðarmeting.

**Mentamálanevndin 27. mai 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta kr. 100.000 til at lýsa tørvin á at dagføra høllina og gera kostnaðarmeting.

**Fíggjarnevndin 28. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 100.000 av játtaðum íløgum á trivnaðarøkinum ætlaðar Høllini á Hálsi.

**Býráðið 28. mai 2009:** Atkvøtt var um tilmæli hjá fíggjarnevndini, sum var samtykt við 9 atkvøðum fyri og 0 ímóti. Fyri atkvøddu Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin K. Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup S. Simonsen, Sjúrður Johannesen, Annfinn Brekkstein, Inga Dahl. Ingrid Henriksen og Jan Christiansen greiddu ikki atkvøðu.

**Uppískoyti:**
Skotið verður upp at byggingin verður skipað á tann hátt, at 260 $m^2$ verða bygdir í tveimum hæddum, tilsamans 520$m^2$, har bert veghæddin verður innrættað endaligt. Á veghædd verður

høvuðsinngongd og forhøll, 4 áskoðaravesir, goymslur og tvey umklæðingarrúm við brúsum. Hetta loysir í fyrstu atløgu bráðfangis tørvin.

Í kostnaðarmetingini er roknað við, at restin av bygninginum ikki er innrættaður, hvørki við innveggjum, hurðum, el- og ljósbúnaði, hita-og sanitetsbúnaði endaligum lofti, gólvbúnaði, málaraarbeiði og trappu. Tað er fyrireikað fyri lyft, men lyftin er ikki við í kostnaðinum.

Kostnaðurin er 4.488.000 kr íroknað ókent, ráðgeving og mvg.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 4,5 mió. kr. av avlopinum av áður játtaðari upphædd til Høllina á Hálsi (journal-nr. 1999-0345). Tøkar eru íalt 8,9 mió. kr.

**Mentamálanevndin 11. november 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndina.

**Býráðið fyri læstum hurðum 26. november 2009:** Málið varð umrøtt.

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini 18. november 2009.

- Tilmæli kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 24. mars 2010:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Jógvan Arge ynskir málið á skrá.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Trivnaðarstjórin greiddi frá málinum.

**Mentamálanevndin 28. apríl 2010:** Kunnað varð um málið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at bjóða arbeiðið út í innbodnari høvuðsentreprisu.

**Mentamálanevndin 17. mai 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2010:** Samtykt at mæla býráðnum at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 20. mai 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Mentamálanevndin 1. september 2010:** Kunnað varð um málið.

**Mentamálanevndin 3. november 2010:** Samtykt at heita á umsitingina um at fáa málið frá hondini.

**Mentamálanevndin 12. januar 2011:** Tekniski stjórin kunnaði um málið.

**Ískoyti:**
MAP Arkitektar hava gjørt skitsur av innrætting í mars 2010, og upprit v. kostnaðarmeting 17. februar 2010, áljóðandi kr. 4.587.245. Kostnaðarmeting har prosjektumsiting, ókent, prístalsregulering v.m. er lagt afturat meting ráðgevans, er av umsitingini mett til kr. 5.100.000. Tøkur peningur á játtanini er pr. 9. februar 2011 kr. 4.541.409. Írestandi kapitaltørvurin er á fyriliggjandi grundarlagi sostatt mettur til kr. 558.591.

Verkætlanin fevnir bert um liðugtgerð innan av pørtum av útbyggingini, sambært uppritinum hjá ráðgevanum.

Býráðið hevur 26. november 2009 samtykt at játta kr. 4,5 mió til verkætlanina, og 20. mai 2010 er samtykt at lata arbeiðið bjóða út í innbodnari høvuðsentreprisu.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at:

- at góðkenna skitsuuppskotið hjá ráðgevanum
- at góðkenna uppskotið til sáttmála við ráðgevan
- at útvega metta írestandi kapitaltørvin á kr. 558.591 av íløgukontu 5775 L00001, løgujáttan,

og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 9. februar 2011:** Jákup Eghom Hansen, tekniskur stjóri, greiddi frá. Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2011:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og mæla býráðnum til at játta kr. 559.000 av framfluttum íløgukarmi fyri 2010.

**Býráðið 24. februar 2011:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 30. august 2011:** Málið umrøtt.

**Fíggjarnevndin 31. august 2011:** Málið umrøtt.

**Ískoyti:**
Tann 27. juni 2011 var lisitatión uppá útbygging av Hoyvíkshøllini. 4 tilboð komu inn. Úrslitið frá lisitatiónini tann var:

1. J & K Petersen kr. 4.733.029,33 u/ mvg
2. ÁTS kr. 5.182.139,75 u/ mvg
3. Búsetur kr. 6.010.299,24 u/ mvg
4. Articon kr. 6.291.903,00 u/ mvg

Metingin í byggiskránni nov. 2009 er kr. 4.224.000,- u/ mvg.

Lisitatiónsúrslitið kann tulkast sum ein staðfesting av, at áður gjørda kostnaðarmetingin, sum hevur ligið til grund fyri politisku viðgerðini, hevur verið so tíðliga í verkætlanini og á einum so mikið leysum grundarlag, at neyvleikin á henni er at rokna sum vegleiðandi.

Ráðgevin hevur kannað, um møguligt er at spara í tilboðsupphæddini og metir, at tað ikki er ráðiligt, tí hetta kemur at ganga út yvir umklæðingarrúmini, sum ikki verða tøk, um sparing verður gjørd. Tær sparingar, sum kundu komið uppá tal, eru longu gjørdar í byggiskránni og í projekteringini.

Kannað er eisini, hvar munurin millum byggiskrá og tilboð stavar frá. Í byggiskránni er ikki roknað við, at bygningurin kemur so langt niður á parkeringsøkið, sum tær neyvu uppmátingarnar í projektinum hava staðfest.

Tað er serliga hetta, sum ger seg galdandi, har "grundin" verður hægri, sum er frávikið millum tilboð og byggiskrá.

Umsitingin hevur tí eisini kannað møguleikan fyri at gagnnýta hæddarmunin á økinum til kjallara, so at hølir, sum stórur tørvur er á í hesi høllini, kunna gerast undir útbyggingini, ístaðin fyri at fylla upp.

Tilboð uppá hetta arbeiðið er heintað inn frá lægstbjóðandi uppá upprunaútbjóðingina.

Við støði í frágreiðing frá MAP Arkitektar, sum er ráðgevi á verkætlanini um útbygging av Hoyvíkshøllini, hevur tekniska fyrisitingin gjørt kostnaðarmeting av, hvat verkætlanin, íroknað allar útreiðslur, kann væntast at koma at kosta. Íroknað hesa kostnaðarmeting er eisini umlegging av fjarhitarørum sum koma at liggja undir byggingini, og sum Fjarhitafelagið krevur flutt.

<u>Fíggjarlig viðurskifti:</u>
Býráðið hevur áður játtað kr. 5.100.000,- tilsamans til verkætlanina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á mentamáladeildini mæla til at taka av tilboðnum hjá J & K Petersen um upprunaliga tilboðið á kr. 4.733.029,33 u/ mvg og av ískoytistilboðnum á kr. 263.040,- at byggja fulla óinnrættaða veghædd undir umklæðingarrúmunum, og gera sáttmála við J & K Petersen um tilsamans kr. 4.996.069,33.

**Mentamálanevndin 8. september 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 8. september 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og at taka av tilboðnum uppá kr. 4.996.069,33 frá J & K Petersen.

**Býráðið 8. september 2011:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 29. september 2011:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í sambandi við byggimálið er komið fram, at neyðugt er at grava munandi longri niður fyri at koma niður á fast. Staðfest er, at neyðugt verður at grava eitt lag av mógvi burtur undan tilbygninginum, umleið 2,5 m., og fylla grótfyllu í aftur. Sambært upplýsingum frá Mikael Viderø, býararkitekti, verður kostnaðurin av hesum arbeiði umleið kr. 375.000.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta írestandi peningin kr. 375.000,00 av íløgum 2012, konto 5775 vøllurin í Hoyvík.

**Mentamálanevndin 11. januar 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 375.000,00 av íløgum 2012, konto 5775 vøllurin í Hoyvík.

**Býráðið 26. januar 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í íløguætlanini fyri 2014 eru kr. 2 mió settar av til framhald at gera útbygningin lidnan innan. Harumframt eru umleið kr. 300.000 tøkar á verkætlanarkontuni 5775 L57006 útbygging av Hoyvíkshøllini.

Enn standa partar av miðhæddini, øll veghæddin og øll loftshæddin óinnrættað. Mett verður, at fyri hesa játtan ber til at gera eitt umklæðingarrúm aftrat og almenn wc í miðhæddini eins og møguliga partar av veghæddini (kjallarin), har ætlan er at gera vektrúm (venjingarhøli) og fundar-/felagshøli.

Í hesum sambandi skal útbjóðingartilfar fáast til vega fyri liðugtgerð av miðhæddini og veghæddini. Arbeiðið verður at bjóða út í innbodnari lisitiatión.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 2 mió av íløguætlanini fyri 2014 til liðugtgerð av mið- og veghæddini, herundir at útvega útbjóðingartilfar og bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión.

**Mentamálanevndin 8. januar 2014:** Samtykt at biðja umsitingina um at lýsa ætlanina fyri at gera forbygningin endaliga lidnan til næsta nevndarfund.

**Ískoyti:**
Eftir áheitan er gjørd ein fyribils kostnaðarmeting fyri liðugtgerð av bygninginum sum er bygdur, tvs. allar hæddir. Umbidnu kostnaðirnir eru hesir:

- liðugtgerð av bygninginum sum er bygdur, tvs. allar hæddir,
    - kostnaðurin av miðhæddini við at gera eitt umklæðingarrúm afturat
    - kostnaðurin av miðhæddini við at gera eitt goymslurúm í staðin fyri umklæðingarrúm

Kostnaðarmetingar verða lagdar fram á fundinum.

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Samtykt at fara á ástaðarfund á næsta nevndarfundi.

**Mentamálanevndin 7. mai 2014:** Nevndin hevur verið á ástaðarfundi.

Samtykt at biðja umsitingina um tilmæli við atliti at heildarætlanini og funktionalitet, tørvinum hjá felagnum og tøku játtanini.

**Ískoyti**
Í skrivi dagfest 5. juni 2014 metir nevndin í H71, at í løtuni er tað ikki fleiri skiftingarrúmum, sum størstur tørvur er á. Heldur hevur tað skund at fáa felagshølið á ovastu hædd gjørt klárt, eins og stórur tørvur er á at fáa venjingarhølið klárt.

Í tørvslýsingini frá 2009 er ikki lagt upp til, at H71 skal hava felagshøli í útbygninginum. Tað varð heldur ikki lagt upp til venjingarhøli í tørvslýsingini. Tað er tó møguligt at leggja bæði felagshøli og venjingarhøli í útbygningin, tí at veghæddin kom aftrat í mun til upprunaligu verkætlanina við tveimum rættiliga stórum hølum (uml. 150 m2 í alt).

Metast má, at ovasta hæddin eigur at verða til meira almenna nýtslu eitt nú kafé í sambandi við kappingar, tiltøk, almennar fundir o.a., so sum tørvslýsingin eisini legði meira upp til.

Í mun til sjálva høllina er tørvur á goymslu og fleiri almennum wc. Til ber at gera goymslu í tí hølinum, sum upprunaliga varð ætlað til umklæðingarrúm. Til ber at gera umklæðingarrúm har seinni.

Mett verður skilabest, at tøka upphæddin kr. 2 mió verður brúkt soleiðis við støði í omanfyri nevndu funktiónslýsing: almenn wc og goymslu í miðhæddini, felagshøli og venjingarhøli í veghæddini. Gerast skal neyvari kostnaðarmeting, um játtanin røkkur til hesi endamál, og um ikki, hvat skal takast burturúr.

Ovasta hæddin við hartil hoyrandi atkomuviðurskiftum (lift) verður at bíða til seinni.

Felagið rindar sjálvt útgerð, innbúgv v.m. til felagshølið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 2 mió av íløguætlanini konta 5775 Høllin í Hoyvík til at gera almenn wc og goymslu í miðhæddini, harumframt at gera felagshøli og venjingarhøli í veghæddini.

**Mentamálanevndin 24. juni 2014:** Málið umrøtt og útsett.

**Fíggjarnevnd 24. juni 2014:** Útsett.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Við støði í umrøðuni á mentamálanevndarfundinum 24. juni 2014 kann staðfestast ávíst ynski um, at ovasta hæddin verður gjørd fyrst, og at arbeiði verður boðið út sum undirhondsboð, so at ein ítøkiligur kostnaður kann staðfestast.

Mælt verður til at halda fast í omanfyri nevndu funktiónslýsing, har ovasta hæddin eigur at verða til almenna nýtslu eitt nú kafé í sambandi við kappingar, tiltøk, almennar fundir o.a. Í sambandi við útboð eigur lyft at verða tikið við til tess at lúka krøv um atkomuviðurskifti.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til støðutakan um útbjóðing.

**Mentamálanevndin 03. september 2014:** Nevndin samtykti at bjóða arbeiðið at innrætta ovastu hædd út sambært funktiónslýsingini og krøvum til atkomuviðurskifti sum undirhondstilboð at leggja fyri nevndina aftur sum skjótast.´

**Ískoyti:**
Fyri at bjóða arbeiðið út í undirhondsboð, er neyðugt at gera útbjóðingartilfar, t.e. tekningar, sum vísa innrætting, og frágreiðing um tilfar. Umsitingin hevur í hesum sambandi tosað við MAP arkitektar, sum hava teknað uppíbyggingina, um at fáa til vega hetta tilfar.

Tilfar verður lagt fram.

**Mentamálanevndin 8. oktober 2014:** Samtykt at bjóða arbeiðið út soleiðis, at talan er um eitt stórt rúm við neyðugum atkomuviðurskiftum, brunaveggi og fyrireikingum til leiðingar til køk, wc og annað el.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Arbeiðið bleiv boðið út til 2 arbeiðstakarar, soleiðis sum nevndin hevur samtykt.

Inn komu 2 tilboð, hesi eru:
- Bjarni Poulsen kr. 2.106.270 uttan mvg, j.nr. 14/04771-4
- Eysturlon kr. 2.860.528 uttan mvg, j.nr. 14/04771-5

Av tí at onki veruligt útbjóðingartilfar er, so er tað torført at meta um innkomnu tilboðini, herundir hvørjar veitingar eru við, hvat slag av tilfari verður nýtt, hvussu trappur, vindeygu, ljósarmatur o.a. verður.

Kostnaðarmering, út frá tilboðnum frá Bjarna Poulsen:

| | |
|---|---|
| Tilboð uttan mvg | kr. 2.106.270 |
| Lift typa 2, alt íroknað | kr. 250.000 (kostnaður íalt kr. 500.000) |
| Óvæntað 25% | kr. 526.570 |
| Handverkaraútreiðslur íalt | kr. 2.882.840 |
| MVG, 6,75% | kr. 194.590 |
| Eftirlit og byggileiðsla | kr. 200.000 |
| **Kostnaðarmeting íalt** | **kr. 3.277.430** |

Viðmerkjast skal, at tað verður neyðugt at fáa skikkað fólk til at hava eftirlit við el- og vhs-arbeiðinum.

Útbjóðingartilfarið hevur j.nr. 14/04771-1

Um samtykt verður at arbeiða víðari við málinum, er neyðugt at fara undir sáttmálasamráðingar. Tøk upphædd á íløgukontuni er kr. 2 mió, tí verður neyðugt við meirjáttan.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til støðutakan um, hvørt arbeiðast skal víðari við tilboðnum.

**Mentamálanevndin 26. november 2014:** Tikið av skrá.

**Mentamálanevndin 14. januar 2015:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr, taka ikki av innkomnum tilboðum, av tí at játtanin ikki røkkur.

Ein minniluti, Jógvan Arge, mælir til at bjóða út liðugtger av bygninginum av nýggjum sum skjótast og útvega neyðugan pening til kostnaðin.

**Ískoyti:**
Býráðslimur biður um málið á skrá.

**Býráðsfundir 29. januar 2015:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti, at beina málið í mentamálanevndina.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøddu:
Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Jógvan Arge.

**Ískoyti:**
Í sambandi við, at býráðið hevur játtað 1 mió. kr. afturat til innrætting ( jnr. 15/01016, Meirinntøkur fyri 2014) verður málið tikið upp aftur.

Bjarni Poulsen hevur boðað frá, at tilboðið stendur við, og tað skal ikki roknast við príshækkingum.
Tekniska fyrisitingin hevur saman við H71 og hallarumsitingini hugt eftir ætlanini aftur, kostnaðarmetingin er eftirkannað. Upphæddin, ið avsett er til lift, er ov lítil.

Samlaða kostnaðarmetingin er kr. 3.600.000, har kostnaður til lift er íroknaður. Tøka játtanin á projektkontuni er kr. 1.015.000, harumframt eru kr. 2 mió settar av á íløgukarminum fyri 2014. Neyðugt er við meirfígging kr. 585.000, ið játtast kann av tøkum íløgukarmi 5775, ítróttaranlegg.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka av tilboðnum hjá Bjarna Poulsen, og at samlaða restupphæddin, kr. 2.585.000, verður játtað av framfluttum karmi á 5775, Ítróttaranlegg.

**Mentamálanevndin 15. juni 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 22. juni 2015:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Verkætlanin er nú liðug, og biðið verður tí um, at verkætlanin verður lokað, og at restupphæddin, sum er 96.098,00 kr. verður flutt á 5717 Ítróttaranlegg, ið so kann fíggja gerð av serveringskøki í Ítróttarhøllina í Kollafirði, treytað av at restupphæddin frá millumbygninginum millum skúla og ítróttarhøll í Kollafirði mál 14/00984 eisini verður flutt á 5717 Ítróttaranlegg

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at loka verkætlanina og at flyta restupphæddina á 96.098,00 kr. á 5717 Ítróttaranlegg.

**Mentamálanevndin 31. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Halla Samuelsen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti:**
Vísandi til játtanarreglurnar, har tað er ásett, at avlop av lokaðum verkætlanum fellur aftur til íløgukarmin, mæla kommunustjórin, miðfyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin til at restupphæddin fellur aftur á íløgukarmin.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, at restupphæddin fellur aftur á íløgukarmin og at beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>12. september 2016 | Blað nr.: 13286 |
| | | Formansins merki: |

# 202/16 Skúla- og ítróttarhøll í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 10.04.2014 | 67/14 | 14/00984-27 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.05.2014 | 117/14 | 14/00984-27 |
| 3 Býráðsfundur | 22.05.2014 | 95/14 | 14/00984-27 |
| 4 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 204/14 | 14/00984-27 |
| 5 Mentamálanevndin | 03.06.2015 | 150/15 | 14/00984-27 |
| 6 Mentamálanevndin | 03.09.2015 | 164/15 | 14/00984-27 |
| 7 Fíggjarnevndin | 28.09.2015 | 204/15 | 14/00984-27 |
| 8 Býráðsfundur | 30.09.2015 | 147/15 | 14/00984-27 |
| 9 Mentamálanevndin | 31.08.2016 | 233/16 | 14/00984-27 |
| 10 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 287/16 | 14/00984-27 |
| 11 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 202/16 | 14/00984-27 |

## Málslýsing:

Víst verður til mál nr. 2003-0389.

**Lýsing av málinum - samandráttur:**

Í skrivum frá 21. og 28. januar 2004 søkir Advokatskrivstovan, vegna Hallarstuðlar, Tórshavnar kommunu um at hava byggingina av høllini um hendi.

Í umsókníni frá Christiani Andreasen, adv., frá 28. januar 2004 verður m.a. tikið soleiðis til:

"Undir hesum broyttu umstøðum skal eg vegna Hallarstuðlar við hesum søkja Tórshavnar býráð um, at kommunan játtar at rinda allan byggikostnaðin í sambandi við bygging av høllini, sjálvsagt við frádrátti av nevnda innskoti og við frádrátti av sjálvbodnum arbeiði. (Viðmerkingar frá kommunustjóranum: 500 tús. kr. í innskotspeningi goldið kontant og 4 mió. kr. í sjálvbodnum arbeiði).

Undir hesum umstøðum - har kommunan rindar allan byggikostnaðin - er einki í vegin fyri, at býráðið fær meirvirðisgjaldið afturgoldið eftir teimum reglum, sum eru galdandi fyri kommunur.

Eftir hesum leisti verður tað býráðið, sum stendur sum byggiharri, og tað verður býráðið sum kontraherar høllina og sum hereftir kemur at hefta fyri tí byggiarbeiði, sum skal gerast.

Hallarstuðlar kunnu vegna býráðið hava sjálva byggingina um hendi, sjálvsagt undir neyðugum eftirliti av kommununi.

Veljast skal ein bygginevnd at standa fyri byggingini, og kommunan kann somuleiðis velja eitt byggieftirlit, sum m.a. skal tryggja, at tað ongantíð verður útgoldið meira enn bygt er fyri, alt sambært vanligum reglum.

Kostnaðarmetingin viðvíkjandi bygging av høllini sær soleiðis út (tølini eru uttan mvg):

| | |
|---|---|
| byggikostnaður | kr. 11.930.000 |
| innbúgv | - 1.000,000 |
| eftirlit | - 500.000 |
| tilsamans umframt mvg. | kr. 13.430.000 |

| | |
| --- | --- |
| innskotspeningur | - 500.000 |
| kostnaður | kr. 12.930.000 |

(Viðmerkingar frá kommunustjóranum: kommununnar partur av mvg kr. 839.375,00).

Annars verður víst til lýsing av projektinum. Í hesum tilfari liggur eisini ein endalig kostnaðarmeting og ein uppgerð yvir sjálvboðið arbeiði.

Eg kann upplýsa, at Hallarstuðlar hava verið í Íslandi og hugt eftir eini høll, og felagið er av teirri áskoðan, at nevnda kostnaðarmeting í hvussu so er kemur at halda.

Felagið hevur móttikið eitt sáttmáluppskot frá Íslandi, men sjálvandi verður eingin sáttmáli undirskrivaður, fyrr enn øll viðurskifti í sambandi við bygging av høllini eru avklárað.

Henda umsókn hevur sum fyritreyt, at gjørd verður ein avtala við Hallarstuðlar um teirra rættindi í samband við nýtslu av høllini, herundir hvørji rættindi felagið skal hava í sambandi við teirra veitingar til samlaða projektið."

**Fíggjarnevndin 29. januar 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til

at ganga umsóknini frá Hallarstuðlum á møti,
at taka upp nærri samráðingar um arbeiðs- & uppgávubýti,
at vald verður ein bygginevnd har
býráðið velur 1 lim
hallarstuðlar velja 1 lim, og
býráðið og hallarstuðlar í felag velja 1 lim
at fíggja byggikostnaðin við kr. 13.769.375,00 av framtíðar íløgum sambært samtyktu ársfíggjarætlanini fyri 2004.

**Býráðið 29. januar 2004:** Meðan málið varð viðgjørt, fór Jákup Suni Joensen av fundi.

Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini við tí ískoyti, at eingin fær frammíhjárættindi til at fáa arbeiði og nýtslu av høllini.

Eisini varð samtykt at velja Mikael Viderø og Christan Andreassen í bygginevndina.

**Ískoyti:**
Hallarstuðlar hava arbeitt við ætlan um at innrætta tvey høli í ovaru hæddunum í vestara endanum, sum ikki vórðu gjørd liðug í sambandi við sjálva byggingina. Talan er um eitt samkomuhøli í fyrstu hædd uml. 170 m2 stórt við hartil hoyrandi hølum til wc, goymslur, reingerð, køk v.m. Á aðru hædd er eisini eitt stórt rúm uml. 140 m² stórt. Umframt trappur skal lyfta setast í.

Ætlanin er, at loftshæddirnar kunnu hýsa fjøltáttaðum virksemi bæði til ítrótt, ítriv, ungdómsvirksemi, fundir, samkomur eins og annað virksemi, og á henda hátt koma øllum bygdarlívinum í Kollafirði til gagns.

Í fíggjarætlanini 2011 eru kr. 700.000 tøkar til endamálið. Sambært fíggjarætlanaruppskotinum fyri 2012 verða ætlandi játtaðar kr. 2.300.000 aftrat, tvs. tilsamans kr. 3.000.000.

Hallarstuðlar hava ynskt at halda fram við sama leisti, sum varð brúktur, tá høllin varð bygd, sí omanfyri. Í hesum sambandi skal støða takast til kommunalu umboðini í bygginevndina. Setast

skal sama treyt, sum varð sett í sambandi við byggingina av høllini, nevniliga, at eingin fær frammíhjárættindi til at fáa byggiarbeiðið og nýtsluna av hølunum.

Mett verður, at tær tøku kr. 700.000 skulu játtast til at fáa til vega tekningar og prosjekt fyri ætlaðu innrættingina, herundir kostnaðarmeting fyri í fyrsta lagi at innrætta 1. hædd, og í øðrum lagi bæði 1. og 2. hædd, at leggja fyri mentamálanevndina aftur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at játtaðar verða kr. 700.000 av kontu 5775 Ítróttahøllin í Kollafirði til at fáa til vega tekningar, prosjekt og kostnaðarmeting fyri í fyrsta lagi at innrætta 1. hædd, og í øðrum lagi bæði 1. og 2. hædd, at leggja fyri mentamálanevndina aftur. Somuleiðis verður mælt til at seta sum treyt, at eingin fær framíhjárættindi til byggiarbeiðið og nýtsluna av hølunum. At enda verður mælt til, at Mikael Viderø og Christian Andreasen halda fram í bygginevndini.

**Mentamálanevndin 9. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. november 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Gjørt verður vart við, at hesin leistur víkur frá politisku/fyrisitingarligu mannagongdini fyri verkætlanir, fíggjaðar av íløgum, samtykt av býráðnum í 2006, og tí skal avtalast serstøk mannagongd fyri váttan og ávísing av rokningum.

**Býráðið 24. november 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Hallarbólkurin hevur latið tekningar og kostnaðarmeting í sambandi við at innrætta loftshæddirnar. Tekningarnar fevna eisini um trappuuppgongdina og lyft frá forhøllini í niðastu hædd.

Innrættingin á fyrstu hædd hevur eitt forsamlingshøli à uml. 170 m2. Til hetta eru wc og garderoba, 2 goymslur umframt høli til køli-/frystigoymslu og rúm til uppvask/reingerð. Eisini er køkur. Í erva er opið óinnrættað rúm og goymsla.

Kostnaðarmetingin er kr. 2.990.000 u/mvg og uttan rentu- og príshækkingar. Kostnaðarmetingin fevnir ikki um útgerð til køkin, køli-/frystigoymsluna og liðugtgerð av aðru hædd.

Uppskotið til innrættingarendamál sýnir annars rættiliga fleksiblar karmar, ið kunnu nýtast til ymisk endamál.

Samlaði íløgukarmurin til endamálið er kr. 3.000.000. Áður eru játtaðar kr. 700.000 til fyrireikingarnar at fáa til vega tekning, prosjekt og kostnaðarmeting. Til tess at seta byggiarbeiðið í gongd, er neyðugt at játta tær írestandi kr. 2.300.000 til endamálið.

Vísandi til, at kostnaðarmetingin uppá kr. 2.990.000 er uttan mvg og rentu- og príshækkingar, verða álagt hallarbólkinum at gera tillagingar í kostnaðarmetingini soleiðis, at hesar útreiðslur verða hildnar innanfyri samlaða játtanarkarmin uppá kr. 3.000.000.

Tað áliggur somuleiðis hallarbólkinum at fáa til vega øll neyðug loyvi frá avvarðandi myndugleikum, herundir góðkenning av lyft m.a. til fólk við breki.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at góðkenna innrættingarendamálið og játta kr. 2.300.000 av íløguætlanini fyri 2012 kontu 5775 Høllin í Kollafirði til arbeiðið sambært omanfyri nevndu treytum.

**Mentamálanevndin 8. februar 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina partin um fíggingina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndnii

**Býráðið 23. februar 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ætlanin at innrætta tær báðar loftshæddirnar hevur víst seg trupul at fáa framda serliga vegna kostnaðarmikil brunakrøv. Í sambandi við endurskoðanina av íløguætlanini 2014 er játtanin lækkað til kr. 1.089.000. Umrødd er onnur ætlan um at byggja høllina út, so at goymsluumstøðurnar hjá ítróttarhøllini kunnu betrast. Um peningurin røkkur til tað, er eisini ynski um at fáa gjørt millumbygningin millum skúlan og høllina lidnan.

Gerast skal uppskot til útbygging og prosjektering sum grundarlag fyri útbjóðing.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 1.089.000 av íløguætlanini konta 5775 Ítróttaranlegg L57013 Skúla- og ítróttarhøll í Kollafirði til at útbyggja ítróttarhøllina við goymslurúmi, og um peningurin røkkur til tað, eisini at gera millumbygningin millum skúlan og høllina lidnan, og í hesum sambandi fáa til vega prosjekttilfar og bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión.

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundir 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Jógvan Arge biður um at fáa málið á skrá.

**Mentamálanevndin 03. juni 2015:** Málið varð umrøtt og nevndin bleiv kunnað um at verkætlanin er farin í gongd.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur fingið tilboð frá Sp/f ÁTS og Sp/f Bulur uppá bygging av goymslurúmi við ítróttarhøllina og liðugtgerð av millumbygningi millum skúlan og høllina í Kollafirði.

| | |
|---|---|
| Tilboðið frá Sp/f ÁTS: | 909.820 uttan mvg. |
| Tilboðið frá Sp/f Bulur: | 1.048.273 uttan mvg. |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka av lægsta tilboðnum frá Sp/f ÁTS á 909.820,00 og seta arbeiðið í gongd

**Mentamálanevndin 03. september 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 28. september 2015:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 30. september 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Verkætlanin er liðug, og biðið verður um, at verkætlanin verður lokað, og at restupphæddin, sum er 50.000 kr. verður flutt á 5717 Ítróttaranlegg, ið so kann fíggja gerð av serveringskøki í Ítróttarhøllina í Kollafirði, treytað av at restupphæddin frá innrætting av ovastu hædd í Hoyvíkshøllini ( sí mál 14/00601) eisini verður flutt á 5717 Ítróttaranlegg.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at loka verkætlanina og at flyta restupphæddina á 50.000 kr. á 5717 Ítróttaranlegg.

**Mentamálanevndin 31. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Halla Samuelsen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti:**
Vísandi til játtanarreglurnar, har tað er ásett, at avlop av lokaðum verkætlanum fellur aftur til íløgukarmin, mæla kommunustjórin, miðfyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin til at restupphæddin fellur aftur á íløgukarmin.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, at restupphæddin fellur aftur á íløgukarmin og at beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

# 203/16 Vatnrussjibani vm. til Svimjihøllina í Gundadali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 04.05.2016 | 127/16 | 16/01711-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 25.05.2016 | 149/16 | 16/01711-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 31.08.2016 | 205/16 | 16/01711-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 286/16 | 16/01711-1 |
| 5 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 203/16 | 16/01711-1 |

**Málslýsing:**
Umsitingin arbeiðir við at fyrireika uppskot til gerð av vatnrussjibana í Svimjihøllini í Gundadali. Avtala er gjørd við Aquaplan Aps við Karsten Ask, ráðgeva, um at gera skitsuuppskot og kostnaðarmeting sum grundarlag fyri støðutakan til møguliga víðari detailprojektering og útboði.

Hjáløgd er tvey fyribils uppskot til linjuføring av russjibananum (strikutekning og 3D tekning). Sum sæst er lagt upp til í báðum førum, at linjuføringin gongur út um bygningin ovarlaga á vestursíðuni. Umsitingin kemur í næstum at meta nærri, um tað er hóskandi, tí atlit eru at taka til staðsetingina av komandi langhylsbygninginum. Ætlaða longdin á bananum er antin umleið 58 metrar ella 51,8 metrar. Í hesum uppskotunum endar banin í einum bakka. Umsitingin kemur saman við ráðgevum at viðgera fleiri møguleikar fyri linjuføringum, umframt at eisini at kanna møguleikar fyri at russjibanin heldur endar í 90 cm. hylinum í staðin fyri einum bakka. Tí er sannlíkt at verandi uppskot verða tillagað áðrenn næstu viðgerð.

At gera russjibana inniber eina rímiliga týðandi broyting og hevur árin á høllina, bæði visuelt og viðv. ljóði. Atliti til trygd og myndugleikakrøv eru eisini týðandi viðurskifti at greiða.

Ráðgevin hevur innheintað eitt tilboð frá svenskum veitara til uppskotini. Í hjálagda tilboði er prísurin (umleið 1,2 mio.kr) fyri levering av russjibana íroknað uppseting, men ikki útreiðslur til pumpur, rør, innleggingar vm. Harumframt ber til at keypa ymiskt afturat so sum tíðtaking, ljóseffektir vm., umframt at alt eftir hvør linjurføring verður vald hevur tað eisini ymsar útreiðslur við sær.

Til verkætlanina er tilknýttur sum ráðgevi Sp/f PBC Consult, ið vanliga virkar sum HVS-ráðgevi til Svimjihøllina saman við Húsaumsitingini/Teknisku fyrisiting, ið dagliga varðar av bygnings- og skipanarviðlíkahaldinum av høllini.

Í viku 19 verður verkstova har umsitingini saman við Svimjihøllini og ráðgevum kemur at fyrireika tilmæli um møguliga verkætlan/loysnir, íroknað tíðar- kostnaðarætlan, til fundin í mentamálanevndini 25. mai 2016 og síðani fíggjarnevnd og býráði.

Á býráðsfundi 19. apríl varð samtykt at játta 1.500 tkr. til vatnland. Játtanin fer til aðru viðgerð á býráðsfundi 19. mai 2016. Henda fígging er fyritreyt fyri fullføring av hesi verkætlan.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at umrøða uppskotið við atliti til, at umsitingin kemur við endaligum uppskoti til komandi fund.

**Mentamálanevndin 4. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Halla Samuelsen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti**
Tekstur um nýggja linjuføring vm. kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 25. mai 2016:** Útsett.

**Ískoyti:**
**Linjuføring og staðsetan av russjibananum**
Umsitingin hevur havt verkstovu og samskifti við ráðgevum og Svimjihøllini og er komin til at samanlagt er betri at broyta staðseting av bananum til at verða í tí eystara partinum har kavingarhylurin er. Hetta tí at betri rúm er har fyri bananum tí tað er væl hægri til loftið, umframt at í áður gjørda uppskoti fer banin 5 metrar útum vestureftir og vildi tað órógva komandi langhylin. Harumframt vil staðsetingin ikki broyta stórvegis uppá heildarinntrykki inni í høllini og samstundis geva høllini ein eyðsýndan dám uttandura. Tað hevur verið uppá tal at russjibanin endaði í økinum sunnanfyri kavingarhylin, men tað økið er hugsa avlagt til hitapottar o.l.

Í hjáløgdu tekning sæst uppskot til linjuføring nevnd AQ-22 (fylgiskjal 1), umframt renderingar, nevndar AQ-22 3D og bild1 uttandura av bananum (sí fylgiskjal 2 og 3).

Russjibanin gongur út gjøgnum galvin eystanfyri og er umleið 72,3 m. langur og endar í einum bakka. Veitingin er frá Hydro Sport í Svørríki (sí fylgiskjal 4).

**Kostnaðarmeting**
Samlaði kostnaðurin er mettur til samanlagt: Kr. 2.965.805, umframt kommunalt MVG á kr. 185.363.
Samansett av:
Útgerð/bani frá Hydro Sport:kr. 1.820.310 (SEK2.321.420)
HVS-útreiðslur íroknað ókent 20% - kr. 475.000 (sí fylgiskjal 5)
Projektering, eftirlit - HVS kr. 70.000
Bygningsútreiðslur íroknað projektering, ráðgeving, eftirlit og ókent 20% kr. 540.495 (sí fylgiskjal 6)
Nýtt tún framvið høllini og hegn kr. 60.000
MVG (kommunalt) kr. 185.363

Sp/f Preben Hansen stendur fyri projektering og eftirliti av konstruktión og Sp/f PB Consult fyri projektering og eftirliti av HVS og el. Ætlanin er at bjóða bygningsarbeiðstøkuna, HVS-arbeiðstøkuna og el-arbeiðstøkuna út í undirhondsboði til 2 fyritøkur til hvørt faki, umframt at taka av tilboði frá Hydro Sport um veiting av bananum og uppseting av honum.

**Fígging**
Til verkætlanina eru tøkar á løgukarminum fyri 2016 tkr. 1.500. Restupphæddin á tkr. 1.652 verður skotið upp fíggjað av løgukarminum fyri 2016 fyri langhylin.

**Tíðarætlan**
Fyri at gera arbeiðið letur høllin ætlandi aftur 5. desember 2016 og verður stongd einar 3 vikur. Projektering og byggiarbeiðið á staðnum byrjar í november. Fyrivarni verður tikið fyri tíðarætlanini.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini til at innganga sáttmálar við arbeiðstakarar um tær 4 arbeiðstøkurnar. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 31. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Heitt verður samstundis á umsitingina um at leggja mál um hitapottar sunnanfyri svimjihøllina og russjibana til smábørn fyri nevndina á næsta fundi.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

# 204/16 Graslíki á komandi fótbóltsvøll í Hoyvík - "Hoyvíksvøllur"

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.04.2016 | 114/16 | 16/00407-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 163/16 | 16/00407-3 |
| 3 Mentamálanevndin | 04.05.2016 | 131/16 | 16/00407-3 |
| 4 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 151/16 | 16/00407-3 |
| 5 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 168/16 | 16/00407-3 |
| 6 Mentamálanevndin | 31.08.2016 | 218/16 | 16/00407-3 |
| 7 Mentamálanevndin | 18.08.2016 | 198/16 | 16/00407-3 |
| 8 Fíggjarnevndin | 23.08.2016 | 254/16 | 16/00407-3 |
| 9 Býráðsfundur | 23.08.2016 | 197/16 | 16/00407-3 |
| 10 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 285/16 | 16/00407-3 |
| 11 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 204/16 | 16/00407-3 |

**Málslýsing:**
Talan er um framhald av máli nr. 14/03366 – Samlað útbjóðing av undirhondsboð av nýggjum fótbóltsvølli í Hoyvík og útstykking við Djúpagil í Hoyvík – oman gil, ið aftur er framhald av málunum nr. 14/000714 – Staðseting av fótbóltsvølli í Hoyvík – Dalurin langi bóltvøllur (2010-0498) og máli nr. 14/01462 - Nýggjur fótbóltsvøllur í Hoyvík.

Arbeiðið við at gera fótbóltsvøllin verður ætlandi liðugt innan 2 mánaðir. Í verandi verkætlan er ikki íroknað graslíki, umframt undirlag (t.e. skerv, asfalt, sand, innfill, stoytdoyvingarlag), ið er neyðugt fyri at fáa ein vøll eftir nútíðans krøvum.

Í verandi verkætlan er ymiskt, ið ikki er íroknað verkætlanina, umframt graslíkisvøllin, eitt nú kloakkleiðingar við tilhoyrandi brunnum, el-arbeiðið, gittarmastur til vallarljós, áskoðarapláss, lendisjavning, betongtrappa, gøta og hegn, innkoyring og parkering frá Karlamagnusarbreyt, útskriftingarbenkur o.a. Tá verkætlanin er liðug verður nærri greitt hvat er eydnast at fáa við av hesum innanfyri verandi fíggjarkarm.

Tíðarætlan
Uttandura vallir og umsitingin hava saman við LBF P/F hava mett um tíðarætlan fyri at fáa lagt graslíki á í summar. Frá tí at samtykt fyriliggur vil samlaða tilgongd frá útboð til lisitatión verða umleið 4 vikur og síðani nevndarviðgerð og í býráðið umleið 3-4 vikur. Um málið verður samtykt í apríl kann vøllurin verða liðugur at taka í brúk í heyst. Sí hjálagt útbjóðingartilfar.

Mett verður at kostnaðurin fyri arbeiðið er umleið 3,6 mio.kr. alt eftir marknaðarstøðuni og kapping innan graslíkisveiting og innan tilfar og gerð av arbeiðinum. Hartil er sannlíkt at onnur liðugtger av økinum kring vøllin kann koma at kosta 2-3 mio.kr (við fyrivarni fyri nærri metingum tá verandi verkætlan er liðug í næstum – nýtt tilmæli kemur um tað tá).

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin av stjórnarskrivstovuni mæla nevndini til at samtykkja at heimilað umsitingini at fara undir útbjóðing av arbeiðinum við at leggja á graslíki vm. á Hoyvíksvøll og venda aftur til nevndina við einum úrsliti til støðutakan. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 06. april 2016:** Ein meiriluti Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr tekur undir við tilmælinum.

Minnilutin Jógvan Arge tekur støðu, tá greitt yvirlit er útvegað yvir kostnaðin av tí, sum higartil er gjørt við vøllin, og yvir mettan kostnað at gera vøllin lidnan.

Helena Dam á Neystabø var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti:**
Samlaði fíggjarkarmurin, ið játtaður er til arbeiðið at gera fótbóltsvøllin, er kr. 17,625 mió. Disponeraðar kostnaðarupphæddir eru kr. 17,227 mió. Avlopið er kr. 397.534.

Írestandi løgukarmurin til vøllin í Hoyvík fyri 2016 er kr. 2.000.000. Harumframt er samtykt við 1. viðgerð í býráðnum kr. 1.000.000 aftrat. Verður hetta samtykt við 2. viðgerð, er tøka játtanin sostatt kr. 3.397.534.

Kostnaðarmeting fyri verkætlanina við at leggja graslíkið er kr. 4.070.820 v/mvg.
Fíggjartørvur er sostatt kr. 673.286.

Tað eru eisini onnur arbeiði kring vøllin, sum ikki eru tikin við omanfyri – talan er um el-arbeiði, trappur, innkoyring og áskoðaraskýli, samlað kostnaðarmeting fyri hesi arbeiði er kr. 2.359.539 v/mvg.

Mett verður, at konta 5710 uttandura vallir kann fíggja írestandi partin til graslíkið og til okkurt av mest neyðugu arbeiðunum, sum eftir eru at gera kring vøllin, í alt kr.1.600.000, ið verður at játta til løgukontuna 5775 L57014 Fótbóltsvøllur í Hoyvík.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 3.000.000 av íløgukarminum 5775 ítróttaranlegg og kr. 1.600.000 av kontu 5710 uttandura vallir til løgukontu L57014 Fótbóltsvøllur í Hoyvík.

**Mentamálanevndin 4. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og heita á umsitingina um at leggja við eina greiða uppseting av kostnaðinum av vøllinum í Hoyvík til viðgerðina í fíggjarnevndini og býráðnum.

Halla Samuelsen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini við teirri broyting, at kr. 2.000.000,00 verða játtaðar av íløgukarminum 5775 Ítróttaranlegg og kr.

1.600.000,00 av konto 5710 uttandura vallir til løgukonto L57014 Fótbóltsvøllur í Hoyvík og beina málið í býráðið sum eykajáttan, ið krevst tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge og Jákup Dam.

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Tey, ið atkvøddu fyri, vóru: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigðursson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Jákup Dam.

Marin Katrina Frýdal greiddi ikki atkvøðu.

**Ískoyti**
P/F J&K Petersen er nú um at verða liðugt við sína arbeiðstøku, ið fevnir um gerð av vallarøkinum og sjálvum fótbóltsvøllinum til og við grovplanering. Arbeiðstøkan fevndi ikki um graslíki, umframt undirlag (t.e. fínplanering, drenasfalt, stoytdoyvingarlag vm.).

Drenasfalt:
Í upprunaliga tilboðnum hjá P/F J&K Petersen var fínplanering og áleggjan av drenasfalti. Hetta valdi Tórshavnar kommuna tá at taka úr tilboðnum hjá P/F J&K Petersen at fremja tað fyri seg. Undirveitarin hjá P/F J&K Petersen var Sp/f HJ Asfalt. Samskifti hevur verið við tað felagið, hvørt tað stóð við sínar upprunaligu einleikaprísir og um felagið kundi fremja arbeiðið innan umleið hálvan september. Felagið hevur váttað, at kunna fremja arbeiðið fyri einleikaprísirnar, tó við tí fyrivarni, at nøgdirnar av tilfarinum til fínplanering vera at avrokna t.d. við vektarseðlum ella øðrum hátti, partarnir semjast um. Hetta tí at ávís óvissa kann verða viðv. javnleika og tí kann krevja nakað meiri av tilfari. Arbeiðið verður framt sbrt. upprunaliga útbjóðingartilfarinum hjá Sp/f HMP Consult.

Kostnaðirnir fyri fínplanering sbrt. tilboð er 312.200.kr. og drenasfalt sbrt. tilboð 821.500.kr. Hartil er metingin um eykakostnaðir fyri eykafínplanering vm. umleið 230.000.kr. umframt kommunalt MVG og ókent.

Graslíki:
15. august 2016 var innboðin lisitatión uppá at leggja graslíkið. 5 feløg vóru boðin við og 3 lótu inn tilboð. Talan er um tilboð frá Polytan Danmark, Laiderz Aps. og Ide Møblar (P/F Føroya Møblasøla). P/F LBF hevur kannað innkomnu tilboðini um graslíkið, sí hjálagt fylgiskjal 1.

Mett verður, at lægsta tilboð lýkur ikki krøvini í mun til útbjóðingartilfarið, meðan hini tilboðini eru ov dýr í mun til tøka fíggjarkarmin.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at gera sáttmála við Sp/f HJ Asfalt um at fínplanera og áleggja drensafalt á Hoyvíksvøll fyri 1.449.000.

kr. og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og deildarleiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla harumframt til at bjóða graslíkið út av nýggjum.

**Mentamálanevndin 18. august 2016:** Ein samd nevnd tekur undir við fyrra tilmælinum um fínplanering, drenasfalt v.m. fyri kr. 1.449.000 og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Sigrun Mohr og Annfinn Brekkstein, samtykkir harumframt at taka av lægsta tilboðnum um graslíki við grønum gummigranulati kr. 2.298.000 u/mvg, og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur undir við tilmælinum frá fyrisitingini um at bjóða graslíkið út av nýggjum.

**Fíggjarnevndin 23. august 2016:** Samtykt at beina málið aftur í mentamálanevndina við atliti til at viðgera útbjóðingina av nýggjum, visandi til nýggjar upplýsingar í málinum.

**Býráðsfundur 23. august 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**:
**Asfaltundirlag ella fínplanering eina?**
a). Tórshavnar kommuna hevur asfalt á øllum fótbóltsvallunum undantikið Eysturvølli. Nakrir fótbóltsvallir kring landið (t.d. tann í Norðagøtu og á Eiði) hava undanframleidda stoytdoyvingarmottu beinleiðis omaná fínplanering.

Vallarreglugerðin 2016 hjá FSF hevur ikki ásetingar hesum viðvíkjandi, men vísa til javnleikakrøv og FIFA 2 Star reglur. Enn eru FIFA Quality Pro krøv ikki komin.

Fyrimunurin við ikki at leggja asfaltundirlag er, at kostnaðurin gerst nakað bíligari í fyrstu atløgu. Posturin fyri drensafalt í upprunaliga tilboðnum er ásettur til kr. 821.500 (tó vilja einleikaprísirnir fyri fínplanering helst gerast nakað hægri um asfaltering ikki er við). Vansin er tá, at tá graslíkið skal skiftast og um tað verða brúktar undanframleiddar stoyttdoyvingarmottur ístaðin fyri staðstoypt stoytdoyvingarlag, vil tað kunna viðføra ávís eykaabeiði við at rætta vøllin uppaftur. Bæði Niðari- og Ovari vøllur í Gundadali og vøllurin í Vika hava ikki havt stórvegis tørv á at verða upprættaðir í sambandi við skift av graslíki. Asfaltløgini eru nærum óskalaði frá uppruna av.

Mett verður at undarlagið á Hoyvíksvølli er so mikið gott at vónandi kemur hann ikki at seta seg nakað serligt, men torført er at geva nakra vissu fyri tí.

**Nýtt útboð?**
Í verandi støðu ber fíggjarkarmurin ikki at taka av sáttmála um fínplanering, asfaltering og einum høvuðstilboði um graslíkið (tvs. við staðstoyptum stoytdoyvingarlag og TPE-gummigranulati).

Hinvegin kann eisini umhugsast at velja aðra loysnir m.a. sum lýst í alternativunum í licitatiónini, sum innibera undanframleitt stoytdoyvingarlag/mottu og gummigranulat av slagnum gráum EPDM. Í hjálagda lista sæst uppseting við ymisku samansetingunum.

Hinvegin, um ynskið er at fáa bjóðað út av nýggjum, er hóskandi at gjøgnumganga útbjóðingartilfarið av nýggjum við atliti til, um ynskið er at fáa fleiri møguleikar frá teimum bjóðandi og møguliga enn fleiri bjóðandi, men har serliga staðstoypt stoytdoyvingarlag er alternativ og ikki treyt til høvuðstilboð, tó treytað av, at loysnirnar eru antin FIFA 2 Star ella Quality Pro góðkendar.

Løgfrøðilig metingin hjá løgdeildini er, at til ber at bjóða útaftur beinanvegin í innbodnari licitatión.

Av tí at heystið nærkast kann veðrið ávirka arbeiðið.

**Tilmæli:**

Asfaltundirlag:
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at gera sáttmála við Sp/f HJ Asfalt um at fínplanera og áleggja drenasfalt á Hoyvíksvøll fyri 1.449.000. kr.

Graslíki:
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at bjóða graslíkið út av nýggjum, har treytin fyri høvuðstilboði ikki longur er staðstoypt stoytdoyvingarlag og TPE-gummigranulat.

**Mentamálanevndin 31. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælunum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið viðv. asfaltundirlagnum í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge og Jákup Dam.

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal

## 205/16 Politikkur um upplýsingartrygd

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 291/16 | 16/03292-3 |
| 2 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 205/16 | 16/03292-3 |

**Málslýsing:**
Tórshavnar kommuna hevur arbeitt miðvíst við trygd í sambandi við kunningartøkni og trygd í sambandi við viðgerð av upplýsingum. Í 2015 eru trygdarskoðanir gjørdar á KT-deildini, á Sosialu Deild og á Snarskivuni og ein ætlan er løgd fyri trygdararbeiðinum í 2016, sum inniber, at ein politikkur fyri upplýsingartrygd skal orðast, ein váðagreining skal gerast og at trygdarskoðanir halda fram. Í 2016 er tað økið hjá Heilsu- og Umsorganartænastuni sum skal trygdarskoðast.

Kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003, sum hevur heimild í §31, stk. 7, í løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, er galdandi fyri heilt ella lutvíst elektroniska viðgerð av persónsupplýsingum og staðfestir eisini kravið um at yvirskipaðar reglur fyri nýtslu av kunningartøkni skulu lýsast.

Politikkurin um upplýsingartrygd fyri Tórshavnar kommuna er yvirskipaður og skapar rammurnar fyri tær reglugerðir, sum verða galdandi innan økið í framtíðini.

Í sambandi við yvirtøku av eldraøkinum hevur Dátueftirlitið havt eina drúgva viðgerð, sum í apríl 2016 endaði við, at eitt treytað loyvi var givið til Heilsu- og Umsorganartænastuna. Loyvið var treytað av, at **áðrenn 1. oktober 2016** skuldi TK taka stig til at

- trygdarskoða H&U
- gera eina váðagreining av TK
- gera ein yvirskipaðan politik fyri TK (politikkur um upplýsingartrygd eisini kallað KT-trygdarpolitikkur)

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, Miðfyrisitingarstjórin og KT-leiðarin mæla til at politikkurin "politikkur fyri upplýsingartrygd" verður góðkendur og beindur í býráðið.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

# 206/16 Regnvatnsleiðing úr Marknagili - projekt

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 29.04.2015 | 59/15 | 15/01396-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.05.2015 | 123/15 | 15/01396-2 |
| 3 Býráðsfundur | 21.05.2015 | 95/15 | 15/01396-2 |
| 4 Tekniska nevnd | 13.01.2016 | 3/16 | 15/01396-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 18/16 | 15/01396-2 |
| 6 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 25/16 | 15/01396-2 |
| 7 Tekniska nevnd | 04.05.2016 | 58/16 | 15/01396-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 171/16 | 15/01396-2 |
| 9 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 153/16 | 15/01396-2 |
| 10 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 206/16 | 15/01396-2 |

**Málslýsing**:
Víst verður til mál nr. 14/04040, har býráðið 18. september 2014 samtykti at játta kr. 10,8 mió. til arbeiðið at leggja regnvatnsleiðing frá skúladeplunum oman til Sandá fíggjað av langtíðar íløgum fyri kloakkir.

Í sambandi við arbeiðið at byggja skúladepilin í Marknagili, hevur Landsverk gjørt avtalu við kommununa, j. nr. 14/00941/188, um at leggja pening út til fíggingina av arbeiðinum til regnvatnsleiðing v.m.

Útbjóðingartilfarið til 1. byggistig til regnvatnsleiðing úr Marknagili oman í Sandá fór út 20. mars 2015. Avgjørt var at bjóða arbeiðið út í 2 byggistigum.

- Byggistig 1 er frá Landavegnum oman í Sandá
- Byggistig 2 er frá Marknagili til Landaveg.

Grundin til at avgjørt var at bjóða arbeiðið út í tveimum arbeiðstøkum er, at tað er ikki endaliga staðfest, hvussu vegurin verður gjørdur í sambandi við nýggja Vesturskúlan og best hevði verið um regnvatnsleiðingin verður løgd samstundis sum vegurin verður gjørdur.

Teir bjóðandi vóru:

- Articon
- J&K Contractors
- Plan v/Johannes Hellisdal
- Maskinkoyring
- P/F Tórhallur Hansen
- Andrias Berg

Lisitatión varð hildin 13.04.2015. Víst verður til lisitatiónsprotokoll j. nr. 15/01396-3. Av innkomnu tilboðunum var lægsta boðið frá p/f Tórhallur Hansen áljóðandi uml. 6,1 mió. kr.

Umsitingin kunnar um lisitatiónsúrslitið og tilmæli frá rágeva j.nr. 15/01396-4 og um hvussu farið verður undir arbeiðið.

**Tekniska nevnd 29. apríl 2015:** Kunnað varð um málið. Nevndin samtykti at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 18. maj 2015:** Samtykt at taka av lægsta tilboðnum frá P/F Tórhalli Hansen áljóðandi kr. 6.163.000,- og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 21. mai 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í Íløguætlanini fyri 2016 eru avsettar kr. 10,8 mió. til kloakk í Marknagili.
Víst verður til mál nr. 14/04040, har býráðið 18. september 2014 samtykti at játta kr. 10,8 mió. til arbeiðið at leggja regnvatnsleiðing frá skúladeplunum oman til Sandá fíggjað av langtíðar íløgum fyri kloakkir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 10,8 mió. av íløgukarmi fyri kloakkir 6875 - Kloakk í Marknagili - fyri fíggjarárið 2016 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 13. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Íbúgvar í grannalagnum í Lìtlagerði hava gjørt vart við at gongubreytirnar í økinum treingja til ábøtur. Arbeiðstakarin hevur givið umsitingini tilboð upp á gerð av gongubreytum og kemur hetta at kosta uml. 0,6 mió. kr.

Eftir sum peningur ikki er tøkur innan játtanina fyri regnvatnsarbeiðið, kann fígging útvegast frá markaðum íløgum til vegir, kto. 8175, fyri fíggjarárið 2016. Tøkar eru kr. 2,3 mió. til ymsar vegaætlanir fyri 2016.

**Tilmæli:**
Vísandi til at stórur tørvur er at fáa dagført gongubreytirnar í Lítlagerði mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til at játta kr. 0,6 mió. av íløgum fyri vegir 8175 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 04. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>12. september 2016 | Blað nr.: 13304 |
| | | Formansins merki: |

# 207/16 Eftirlitsfrágreiðing 09.06.2016 - Tyrvingarplássið í Húsahaga

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.09.2016 | 48/16 | 16/02610-3 |
| 2 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 207/16 | 16/02610-3 |

**Málslýsing:**
Umhvørvisstovan var hin 9. juni á eftirlitisvitjan á tyrvingarplássinum í Húsahaga. Í eftirlitisfrágreiðingini biður Umhvørvisstovan kommununa um eina frágreiðing um, hvat ætlanin er við tyrvingini, tá núverandi øki er fult. Frágreiðingin skuldi vera Umhvørvisstovuni í hendi 15. august, men freistin er longd til 1. oktober vegna summarfrítíðina.

Umsitingin vísir í hesum sambandi til mál 16/02171, sum var fyri á fundi í náttúru- og umhvørvisnevndini tann 1. juni 2016, har støðan viðvíkjandi tyrvingarplássinum á Glyvursnesi er lýst.

Tyrvingarplássið í Húsahaga er víðkað í 5 umførum síðani 2003. Verandi øki, sum varð tikið í nýtslu í 2009, fyllist skjótt, og nú verður mett, at plássið verður fult um umleið 2 ár. Hetta økið varð upprunaliga mett at kunna nøkta tørvin í 5-8 ár, t.v.s. til 2014-2017.

Kommunan hevur fyrr samtykt at nýta grótbrotið á Glyvursnesi til nýtt tyrvingarpláss, men økið er ikki tøkt enn, tí ognarviðurskiftini eru ikki fingin uppá pláss. Útbyggingin av Tórshavnar Havn fer eisini at hava við sær, at ikki slepst framat grótbrotinum fyrr enn um umleið 3 ár vegna virksemi í grótbrotinum, og harumframt tekur tað tíð at gera økið klárt til tyrving. Men tá grótbrotið á Glyvursnesi aftaná havnaútbyggingina verður tøkt at nýta til tyrvingarpláss, verður hetta eitt sera vælegnað stað og langtíðarloysn til tyrving, og tískil eigur kommunan sum áður samtykt at staðseta nýtt tyrvingarpláss í grótbrotinum á Glyvursnesi.

Tískil verður neyðugt at finna eina fyribils loysn til tyrvingina, um verandi økið sum væntað verður fult um 2 ár. Tað er áður kannað (Rambøll, 2005), um til ber at leggja nýtt tyrvingarpláss (ella víðka verandi tyrvingarpláss) í Húsahaganum, men niðurstøðan var, at hetta ikki er gjørligt, tí økið er kleimt inni millum vatnbrunnin og háspenningslinjur og at landslagið annars avmarkar víðkanarmøguleikarnar.

Einasti viðkanarmøguleiki á verandi tyrvingarplássi í Húsahaganum er at tyrva útyvir verandi rottangapláss. Tann loysnin krevur tó sjálvsagt, at viðgerðin av rottangaevju verður flutt á annað stað. Tórshavnar kommuna hevur samtykt og skrivað undir ætlanaravtalu við IRF um at samstarva um og staðseta nýggja rottangaskipan á Hagaleiti í Leirvík, so um hendan ætlanin ber á mál, verður viðgerðin av rottangaevju flutt úr Húsahaganum. Fyrireikingarnar til ætlanina á Hagaleiti eru tó ikki komnar á mál enn, so enn ber ikki til at siga við vissu, um ætlanin gerst veruleiki. Tí kann framvegis verða neyðugt at hugsa um eina “alternativa” fyribils loysn fyri tyrvingina, um rottangaøkið ikki kann flytast. Hendan alternativa fyribils loysn má so verða at finna eitt hóskandi øki til eina fyribils goymslu at leggja tyrvingartilfar á, og so flyta tað aftur á eitt nýtt tyrvingarpláss, tá tað einaferð verður liðugt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla til at samtykkja omanfyri lýstu ætlan fyri tyrvingarpláss, t.v.s.

- **Langtíðarloysn:** Framtíðar Tyrvingarpláss verður í grótbrotinum á Glyvursnesi, tá ið økið verður tøkt aftaná Havnaútbyggingina.
- **Fyribils loysn A:** Tá ið verandi øki er fult, heldur tyrvingin áfram inn yvir verandi rottangapláss. Rottangaviðgerðin verður flutt á Hagaleiti í samstarvi við IRF.
- **Fyrbils loysn B:** Um rottangaviðgerðin ikki kann flytast, áðrenn tyrvingarøkið verður fult, verður eitt hóskandi øki funnið, helst innanfyri verandi tyrvingarpláss, har tilfar at tyrva kann leggjast á fyribils goymslu, og síðani verður tilfarið flutt aftur á eitt nýtt tyrvingarpláss, tá tað verður tøkt.

og at umsitingin sendir frágreiðing til Umhvørvisstovuna samsvarandi hesum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. september 2016:** Nevndin kann ikki góðtaka verandi støðu á tyrvingarplássinum og heitir tí á býráðið um beinanvegin at skipa soleiðis fyri, at tyrvingarplássið kann flyta út í grótbrotið á Glyvursnesi sum skjótast.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

## 208/16 Forkanningar : Nýtt tyrvingarpláss (2003-2242)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.06.2016 | 40/16 | 16/02171-45 |
| 2 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 219/16 | 16/02171-45 |
| 3 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 208/16 | 16/02171-45 |

**Málslýsing:**
Víst verður til mál 2003-0915 um tyrvingarplássið í Húsahaga. Tyrvingarplássið í Húsahaga verður fult um fá ár, og neyðugt er við drúgvum fyrireikingum, áðrenn annað øki kann takast í nýtslu sum tyrvingarpláss.

Umsitingin hevur í hesum sambandi, saman við ráðgevandi verkfrøðingunum sp/f Martin E. Leo, gjørt eina forkanning, ið er ætlað at vera grundarlag undir eini verkætlan um nýtt tyrvingarpláss, j.nr. 200302242-3-SG.

Í forkanningini verða nevndir ymsir møguleikar fyri nýggjum tyrvingarplássi, t.d. grótbrotini á Glyvursnesi, í Hundsarabotni og á Sundi.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**
Út frá kanningini verður mett, at skilabest er at arbeiða víðari við tveimum møguleikum, ávíkavist Glyvursnesi og Hundsarabotni. Eisini eigur at verða kannað um og í hvønn mun IRF er sinnað at samstarva við Tórshavnar kommunu um nýtt tyrvingarpláss.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at neyvari kanningar verða gjørdar av ávíkavist Glyvursnesi og Hundsarabotni sum tyrvingarpláss, herundir kostnaðarmetingar av neyðugum íløgum og rakstrarútreiðslum, at leggja fyri nevndina.

Tekniski stjórin mælir samstundis til at avsettar verða kr. 500.000,00 til projektering.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 9. desember 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum.

Eisini samtykt at umsitingin útgreinar tørvin á betri reinsiútbúnað enn tað, ið nú verður brúkt, og kostnaðin av hesum.

**Ískoyti:**
Ráðgevandi verkfrøðingafelagið sp/f Martin E. Leo hava saman við donsku ráðg. verkfr. fyritøkuni Rambøll A/S, gjørt nærri kanningar (Notat, dagfest 15. apríl 2004, j. nr. 200302242-8). Hesi pláss eru tikin við í kanningina:
1. Grótbrotið á Glyvursnesi
2. Grótbrotið í Hundsarabotni
3. Útbygging í Húsahaganum.

Í hesum sambandi er gjørda arbeiðið grundað á hesi viðurskifti:
4. Ávirkan á landslag og bústaðir.
5. Ávirkan á áir og firðir.

6 Nýtsla av økinum og náttúrutilfeingi.
7 Atkomuviðurskifti og flutningsfrástøða.

T.v.s. at tað í fyrsta umfari ikki beinleiðis verður tikin støða til plásstørv, rakstrarútreiðslur, funktión, reinsiatgerð, fyribils kostnaðarmeting v.m.. Tó bendir alt á sambært forkanningini, at viðv. plásstørvi, er Glyvursnes eisini best egnaða staðið.

Niðurstøðan í kanningini er, at eitt tyrvingarpláss, sum bæði tekniskt og umhvørvisliga verður mett at vera ein tíðarhóskandi loysn, við fyrimuni kann staðsetast í grótbrotinum á Glyvursnesi.

Vísandi til forkanning og kanningar, sum eru gjørdar á teimum nevndu støðunum saman við Rambøll A/S, mælir ráðgevandi verkfrøðingafelagið Sp/F Martin E. Leo til, at nýggja tyrvingarøkið verður í grótbrotinum á Glyvursnesi.

**Tilmæli:**
*Vísandi til umrøddu kanning og tilmæli frá ráðgevunum, mælir tekniski stjórin til, at grótbrotið á Glyvursnesi verður valt til nýtt tyrvingarpláss. Víðari verður mælt til at gera projektuppskot við tekniskari/búskaparligari greining av:*
8 Ruskmongdum/livitíð
9 Innrætting av økinum
10 Val av geologiskari verju
11 Uppsamling og reinsing av frárenning frá økinum
12 Gerð av kostnaðarmeting og tíðarætlan

*Eisini verður mælt til:*
at søkt verður um prinsipiella umhvørvisgóðkenning av økinum, tá ið neyðugt umsóknartilfar fyriliggur.
at kannað verður um friðingarmyndugleikarnir skulu geva loyvi sambært náttúrufriðingarlógini og um so er, at søkt verður um loyvi.
at heitt verður á fíggjarnevndina um at útvega lendi.
at heitt verður á byggi- og býarskipanarnevndina um at gera neyðugu broytingarnar í byggisamtyktini og at avseta økið til tyrvingarpláss.
at heitt verður á teknisku nevnd um at dagføra vegasambandi soleiðis, at tað verður hóskandi til regluliga tunga ferðslu.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 19. mai 2004:** Nevndin samtykti at umsitingin kannar møguleikan fyri at finna annað øki til tyrvingarpláss enn Glyvursnes.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við Ráðgevandi verkfrøðingafelagnum sp/f Martin E. Leo og Rambøll kanna aðrar møguleikar fyri tyrvingarplássi. Í hesum umfari eru hesi støð kannað:
13 Grótbrotið á Sundi.
14 Økið sunnan fyri Glyvursnes, í Glyvurshaganum.
15 Økið við gomlu sildaverkssmiðjuna, sunnan fyri Velbastað.
16 Grótbrotið á Glyvursnesi – enn einaferð.
17 Fossdalur norðan fyri Velbastað.

Niðurstøðan er, at av teimum higartil kannaðu økjunum er Grótbrotið á Glyvursnesi bæði umhvørvisliga, tekniskt og tá hugsað verður um nýtslutíðina best egnaða øki.

Víst verður annars til niðurstøðuna og raðfestingina í hjálagda notati.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin heldur fast um tilmælið til seinasta fundin hin 19. mai 2004.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 23. juni 2004**: Ein meiriluti, Høgni Mikkelsen, Schumann Hjaltalin og Tórfinn Smith, samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum.

Ein minniluti, Beate L. Samuelsen, tók ikki undir við tilmælinum.

Ein annar minniluti, Hildur Eyðunsdóttir, krevur málið fyri býráðið.

**Býráðið 2. september 2004:** Atkvøtt var um minnilutatilmælið frá Beate L. Samuelsen um at beina málið í heilsu- og umhvørvisnevndina sum var samtykt við 9-1 atkvøðum.

Fyri atkvøddu Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Schumann Hjaltalin, Høgni Mikkelsen, Jákup S. Joensen, Heðin Mortensen, Jan Christiansen, Elin Lindenskov og Hildur Eyðunsdóttir. Ímóti atkvøddi Leivur Hansen.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 9. september 2004:** Umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Ole Michaelsen frá Rambøll, ið er serkønur innan tyrvingarpláss, og sum saman við Sp/F Martin E. Leo hevur gjørt forkanningarnar í málinum, hevur framløgu um evnið.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 3. februar 2005:** Kunnað var um málið.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 14. september 2006:** Nevndin samtykti at heita á umsitingina um at útvega ítøkiligari upplýsingar fyri útvegan og rakstur av tyrvingarplássi á Sundi samanborið við tyrvingarpláss á Glyvursnesi og at umsitingin kannar møguleika fyri íbinding í landsvegin á Sundi at leggja fyri nevndina á næstkomandi fundi.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við ráðgeva útvegað fleiri upplýsingar fyri útvegan og rakstur av tyrvingarplássi á Sundi samanborið við tyrvingarpláss á Glyvursnesi.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 7. desember 2006:** Ein minniluti, Beate L. Samuelsen og Marin Katrina Frýdal, mælir til at nýta økið á Sundi til tyrvingarpláss.

Ein annar minniluti, Jan Christiansen, mælir til at nýta økið á Glyvursnesi til tyrvingarpláss og vísir til tilmælið frá tekniska stjóranum til fundin í nevndini tann 19. mai 2004.

Ein triði minniluti, Katrin Dahl Jakobsen og Hildur Eyðunsdóttir, tekur støðu á býráðsfundi.

Ein samd nevnd mælir til at beina málið í byggi-og býarskipanarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. desember 2006:** Nevndin samtykti at kanna aðrar møguleikar fyri staðseting av tyrvingarplássi at leggja fyri nevndina á komandi fundi.

**Tekniska nevnd 13. desember 2006:** Málið tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur sambært nevndarsamtykt frá 11. des. 2006 kannað aðrar møguleikar fyri staðseting av tyrvingarplássi. Notat fyriliggur í málinum, sum tekur útgangsstøði í nýggjum tyrvingarplássi á økinum við Lambafelli.

Býarverkfrøðingurin kemur at greiða frá uppskotinum og kemur við tilmæli til fundin.

**Tilmæli:**
*Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at Glyvursnes bæði fíggjarliga, umhvørvisliga og í mun til livitíð er skilabesta loysnin, og vísa tí til tilmælið til fundin 19. mai 2004, ið er soljóðandi:*

*Vísandi til umrøddu kanning og tilmæli frá ráðgevunum, mælir tekniski stjórin til, at grótbrotið á Glyvursnesi verður valt til nýtt tyrvingarpláss. Víðari verður mælt til at gera projektuppskot við tekniskari/búskaparligari greining av:*
18 Ruskmongdum/livitíð.
19 Innrætting av økinum.
20 Val av geologiskari verju.
21 Uppsamling og reinsing av frárenning frá økinum.
22 Gerð av kostnaðarmeting og tíðarætlan.

*Eisini verður mælt til:*
at søkt verður um prinsipiella umhvørvisgóðkenning av økinum, tá ið neyðugt umsóknartilfar fyriliggur.
at kannað verður um friðingarmyndugleikarnir skulu geva loyvi sambært náttúrufriðingarlógini og um so er, at søkt verður um loyvi.
at heitt verður á fíggjarnevndina um at útvega lendi.
at heitt verður á byggi- og býarskipanarnevndina um at gera neyðugu broytingarnar í byggisamtyktini og at avseta økið til tyrvingarpláss.
at heitt verður á teknisku nevnd um at dagføra vegasambandi soleiðis, at tað verður hóskandi til regluliga tunga ferðslu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 5. februar 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein meiriluti, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Bjarti Mohr og Leivur Hansen, samtykti at taka undir við tilmælinum og mæla í hesum viðfangi staðiliga til at skundað verður undir Glyvursvegin og brúnna úm Sandá.

Ein minniluti: Sjúrður Olsen, tekur ikki undir við ætlanini, soleingi nýggj brúgv og Glyvursvegurin ikki er gjørd.

**Tilmæli:**
*Vísandi til tilmælið og til samtyktina í byggi- og býarskipanarnevndini 5. februar 2007 mæla kommunustjórin, tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og*

*býararkitekturin til, at fíggjarnevndin:*

1 *ger avtalu við Búnaðarstovuna og festaran um útvegan ella leigu av lendinum*
2 *áleggur teknisku umsitingini at bjóða út prosjekteringsarbeiðið fyri sjálvt tyrvingarplássið millum føroyskar og útlendskar ráðgevarar at leggja fyri nevndina aftur*
3 *játtar pening til forprosjekt fyri tyrvingarplássið - fyribils mett til kr. 700.000 at fíggja av íløgum fyri 2007*
4 at heitt verður á fíggjarnevndina um at játtað pening til dagføring av vegasambandi, soleiðis at tað verður hóskandi til regluliga tunga ferðslu - fyribils mett til kr. 1.000.000, at fíggja av íløgum fyri 2007

**Fíggjarnevndin 16. februar 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Eisini samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 1.700.000 av íløgum.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 20. februar 2007:** Kunnað varð um málið.

**Býráðið 22. februar 2007:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov, Bjarti Mohr, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Beate L. Samuelsen og Sjúrður Olsen.

**Tilmæli:**
Vísandi til at tað krevur ov nógva umsitingarliga orku at fyrireika útbjóðingartilfar til ráðgeva smb. punkt 2 í omanfyri standandi tilmæli, mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til, at heitt verður á ráðgevandi fyritøkuna Rambøll um at gera byggiskrá og projekteringsarbeiðið fyri tyrvingarplássið.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 19. juni 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum, og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Býráðið 21. juni 2007:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov, Bjarti Mohr, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Beate L. Samuelsen og Sjúrður Olsen

**Ískoyti:**
Bygginevnd varð vald í 2008 og sótu hesi í nevndini: Elin Lindenskov, Jan Christiansen, Annika Berg (seinni Súni Christiansen), Boði Haraldson, Kári Finnsson og Tina Johannesen.

Bygginevndin heitti 25. november í 2010 á leiðsluna um at fáa ognarviðurskiftini í rættlag og samstundis avgjørdi bygginevndin at leggja arbeiðið niður fyribils, til ognarviðurskiftini vóru komin upp á pláss.

Heilsu- og umhvørvisnevndin hevði málið aftur til viðgerðar í 2010, har nevndin tann 23. november samtykti (j.nr. 14/00380-28): Vísandi til at málið er av alstórum týdningi og hevur skund, samtykti nevndin at heita á borgarstjóran, um at taka málið upp við Innlendismálaráðið beinanvegin, fyri at fáa greiðu á ognarviðurskiftunum í grótbrotinum.

Tilfar sum gjørt í sambandi við fremjan av ætlanini er m.a.:
1. Skitsuprojekt, dagfest februar 2008 frá Rambøll
2. Miljøvurdering, dagfest mars 2010 frá Rambøll
3. Projekt av "kloakk út á sjógv", frá PB Consult

Ognarviðurskiftini eru enn ikki komin upp á pláss.

Seinastu árini er nógv tilfar koyrt inn á økið, serliga er tað tilfar frá arbeiðinum at gera Glyvursvegin, sum fyllir nógv. Hetta broytir fortreytirnar fyri tí arbeiðinum sum er gjørt, serliga viðvíkjandi skipan av økinum.

Verandi tyrvingarpláss í Húsahaganum er um at verða fult, soleiðis at kommunan innan stutta tíð skal hava útvegað annað tyrvingarpláss.

Neyðugt verður eisini at gera vegasambandi til øki á Glyvursnesi soleiðis, at tað er egnað til tunga ferðslu.

Viðmerkjast skal, at aðrar ætlanir hava verið við økinum á Glyvursnesi, herundir golfvøllurin, men eru hesar ikki tiknar við í hesa málslýsing.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á kommunalu brennistøðini og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til:
- at kommunan beinanvegin tekur stig til at fáa ognarviðurskiftini upp á pláss, soleiðis at tyrvingarpláss kann gerast í grótbrotinum á Glyvursnesi
- at bygginevnd verður sett.
- at kannað verður hvønn týdning tað hevur fyri ætlanina, at nýtt grótbrot skal gerast í sambandi við nýggju havnaútbyggingina.
- at verandi projekttilfar o.a. verður dagført og tillagað verandi støðu, herundir eisini neyðug myndugleikaloyvi.
- at tað sum er eftir av játtaðum íløgum til nýtt tyrvingarpláss, íalt kr. 800.000, verður nýtt til dagføring av projekttilfari o.a.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at atlit verða tikin til ætlanina at leggja ein golfvøll á økinum. Málið verður beint í fíggjarnevndina í sambandi við ognarviðurskiftini.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum viðv. ognarviðurskiftunum.

**Ískoyti:**
Kommunustjórin og tekniski stjóri mæla býráðnum til at velja bygginevnd til tyrvingarplássið.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt at velja Sigrun Mohr og Marin Katrinu Frýdal í bygginevndina.

## 209/16 Kommunala Brennistøðin : Útskifting av skrottpressu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 82/14 | 14/01624-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.05.2014 | 129/14 | 14/01624-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.05.2014 | 97/14 | 14/01624-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 06.04.2016 | 27/16 | 14/01624-1 |
| 5 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.06.2016 | 37/16 | 14/01624-1 |
| 6 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.09.2016 | 47/16 | 14/01624-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 281/16 | 14/01624-1 |
| 8 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 209/16 | 14/01624-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Skrottpressan til bil- og jarnskrott hjá Kommunalu Brennistøðini er frá 1998. Pressan varð høvuðsumvæld í 2007/2008 fyri uml 0,6 mió. Í 2013 vóru eisini nógvir tekniskir trupulleikar, ið kostaðu nógv at umvæla, og sum viðførdu, at nógv rakstrartíð varð mist. Tað er óheppið, at rakstrartíð verður mist, tí bilar og jarnskrott hópar seg upp beinanvegin, og tá ber ikki til at arbeiða rationelt, umframt at tað viðførir tørv á eyka fólki og yvirtíð at arbeiða tilfari undan aftur, tá ið pressan aftur er í lagi.

Pressan, sum er 16 ára gomul, er nú í rættiliga ringum standi, og serfrøðingar hava mett, at tað ikki longur loysir seg at umvæla, men at rættast er at útskifta pressuna við eina nýggja.

Skrottpressan er eitt sera týdningarmikið amboð í rakstrinum á jarnplássinum. Við at pressa bilvark og skrott, minkar rúmdin nógv, og harvið verður eisini nógv spart uppá flutningsútreiðslur.

Hetta er avgerandi fyri, at fíggjarliga úrtøkan burturúr jarnskrotti er á hampuliga góð, og at tað harvið ber til at lata kundunum eitt hampuliga stórt gjald fyri at innlata jarnskrott.

Ein nýggj skrottpressa kostar umleið 4 mió umframt flutning, uppseting, mvg o.a., so alt í alt kemur kostnaðurin at vera umleið 5 mió. Soleiðis sum rakstrarjáttanin hjá KB er samansett, ber ikki til at fíggja kostnaðin av rakstri.

**Tilmæli:**
Vísandi til týdningin av skrottpressuni sum partur av fíggjarliga rakstrinum av brennistøðini, og sum tænastuveiting, umframt at verandi skrottpressa er ov gomul og slitin til at blíva umvæld, mæla tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini til, at kr. 5 mió. til nýggja skrottpressu verður raðfest á íløguætlanini, so nýggj pressa kann útvegast sum skjótast.

**Tekniska nevnd 30. april 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á Íløguætlanini fyri 2016 er avsett játtan til nýggja skrottpressu.

Kommunala Brennistøðin ynskir eina (næstan) sama slag skrottpressu sum verandi, av hesum orsøkum:

- Verandi fundament vil kunna brúkast til eina nýggja pressu, um hon er líka, annars kann verða, at nýtt fundament má gerast.
- Royndirnar eru góðar við hesi skrottpressu, hon hevur sum heild riggað væl.
- Pressan er hóskandi til tørvin
- Starvsfólkini hava fingið royndir við nýtslu og viðlíkahaldi.

Kommunala Brennistøðin metir, at tað er ov stórur váði at royna eitt annað slag av skrottpressu, tá ið góðar royndir eru við verandi, og tí ber ikki til at bjóða veitingina út millum fleiri veitarar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla til, at nýtt tilboð verður innheintað uppá (næstan) sama slag skrottpressu sum verandi frá Lefort Machines, sum hevur framleitt verandi skrottpressu, at leggja fyri nevndina til góðkenningar.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 06. apríl 2016:** Útsett.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Kommunala Brennistøðin hevur fingið tilboð, dagfest 10. august 2016, frá Lefort UK uppá eina Lefort Conkeror 600 skrottpressu áljóðandi 550.000 €. Lefort UK vil eisini taka gomlu skrottpressuna í býti fyri 40.000 €, so nettoprísurin verður 510.000 €. Harumframt kemur flutningur, kranaleiga, el-víðkan, ókent og MVG. Kostnaðarætlanin sær tí soleiðis út:

| | | kurs | |
|---|---|---|---|
| Skrottpressa, netto: | € 510.000,00 | 7,5 | kr. 3.825.000,00 |
| Flutningur | | | kr. 160.000,00 |
| Kranaleiga | | | kr. 40.000,00 |
| El-skipan víðkan | | | kr. 110.500,00 |
| Ókent | 10% | | kr. 413.550,00 |
| <u>MVG</u> | 6,25% | | <u>kr. 284.315,63</u> |
| **Í alt** | | | **kr. 4.833.365,63** |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla til, at taka av tilboðnum frá Lefort UK uppá skrottpressu, og at játtaðar verða kr. 4.850.000,- til verkætlanina av íløgukarminum á deild 7175 (Renovatión) í 2016, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>12. september 2016 | Blað nr.: 13315 |
| | Formansins merki: |

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>12. september 2016 | Blað nr.: 13316 |
| | Formansins merki: |

# 210/16 Umhvørvispolitikkur hjá Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 11.02.2015 | 7/15 | 14/05441-1 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 03.09.2015 | 43/15 | 14/05441-1 |
| 3 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 04.11.2015 | 55/15 | 14/05441-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 13.01.2016 | 6/16 | 14/05441-1 |
| 5 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 02.03.2016 | 17/16 | 14/05441-1 |
| 6 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 20.04.2016 | 31/16 | 14/05441-1 |
| 7 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 04.05.2016 | 35/16 | 14/05441-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 25.05.2016 | 145/16 | 14/05441-1 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.05.2016 | 164/16 | 14/05441-1 |
| 10 Trivnaðarnevndin | 30.05.2016 | 32/16 | 14/05441-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 01.06.2016 | 61/16 | 14/05441-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 16.06.2016 | 243/16 | 14/05441-1 |
| 13 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.09.2016 | 50/16 | 14/05441-1 |
| 14 Vinnunevndin | 06.09.2016 | 31/16 | 14/05441-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 279/16 | 14/05441-1 |
| 16 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 210/16 | 14/05441-1 |

**Málslýsing**:
Umsitingin er í ferð við at gera uppskot til ein yvirskipaðan umhvørvispolitikk fyri Tórshavnar kommunu. Í hesum sambandi verður skipað fyri evnisdegi fyri nevndarlimunum í náttúru- og umhvørvisnevndini um gerð av umhvørvispolitikki fyri Tórshavnar kommunu.

Ætlanin er at evnisdagurin skal vera í Norðradali tann 23. februar. Til dagin luttaka umboð frá ymisku deildunum í umsitingini, sum hava framløgur um arbeiðsøkið innan umhvørvi í Tórshavnar kommunu. Somuleiðis verður uppskot til umhvørvispolitikk lagt fram, har kjak verður um stevnumið fyri ymisku umhvørvisøkini.

Umsitingin hevur gjørt uppskot um skrá fyri evnisdegi um umhvørvispolitkk hjá Tórshavnar kommunu.

**Skjøl:**
Skjal sum er viðkomandi í sambandi við viðgerðina av málinum:
1. 14/05441-2 Skrá til evnisdag – endalig

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin tekur undir við, at umsitingin skipar fyri evnisdegi fyri nevndarlimunum um umhvørvispolitikk fyri Tórshavnar kommunu, eftir viðlagda uppskoti um skrá fyri evnisdag um umhvørvispolitikk.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 11. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

Náttúru- og umhvørvisnevndin hevur ynski um at gera ein yvirskipaðan umhvørvispolitikk fyri Tórshavnar kommunu. Evnisdagur um umhvørvispolitikk hjá Tórshavnar kommunu varð hildin í Norðradali 16. mars fyri nevndarlimunum í náttúru- og umhvørvisnevndini. Somuleiðis luttóku umboð frá ymisku deildunum í umsitingini, sum høvdu framløgur um ymisku økini innan umhvørvið. Á evnisdegnum varð skipað fyri bólkaarbeiði um visjónir fyri umhvørvispolitikkin.

Við støði í hesum, er eitt fyribils uppskot gjørt um bygnaðin av umhvørvispolitikkinum, tvs. yvirskipaðu visjónina og hvørji fokusøkini eru.

Endamál/visjón: Tórshavn skal vera ein grønur býur

| | |
|---|---|
| Fokusøki 1: Varandi orka | orka, ferðsla |
| Fokusøki 2: Okkara náttúra | dálking, heilsu- og umhvørvisskaðilig evni, útilív, virksemi |
| Fokusøki 3: Einki burturkast | endurnýtsla, skiljing, virksemi |
| Fokusøki 4: Kommunan sum stovnur | bygningar, orka, innkeypspolitikkur, veitarar, vistfrøði, skiljing, grønur roknskapur |

Arbeiðið kundi verðið skipað soleiðis, at settur verður ein stýrisbólkur við umboðum úr náttúru- og umhvørvisnevndini og umboðum úr umsitingini hjá Tórshavnar kommunu.

Harafturat at undirbólkar verða gjørdir, til at orða mál og átøk fyri hvørt fokusøki sær. Hesir mannaðir við umboðum úr náttúru- og umhvørvisnevndini, umsitingini og øðrum viðkomandi áhugapørtum.

Umsitingin metir, at arbeiðið við at orða umhvørvispolitikkin verður liðugt desember 2015 ella januar 2016.

**Skjøl**
Skjal sum er viðkomandi í sambandi við viðgerðina av málinum:

1. 14/05441-7 Upplegg til umhvørvispolitikk

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til:

- at nevndin velur ein stýrisbólk, sum kemur at gera ein umhvørvispolitikk at leggja fyri nevndina
- at eitt starvsfólk á byggi- og umhvørvisdeildini verður skrivari og kemur at samskipa arbeiðið
- at stýrisbólkurin verður heimilaður at seta undirbólkar at arbeiða við ymsu økjunum innan umhvørvispolitikkin

at miðað verður eftir at hava uppskotið liðugt at leggja fyri nevndina um ársskiftið 2015/16.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 03. september 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at velja forkvinnuna, næstforkvinnuna, tekniska stjóran og leiðaran á byggi- og umhvørvisdeildini í stýrisbólkin.

Kunnað verður um gongdina í málinum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 04. november 2015:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Ymiskir arbeiðsbólkar hava arbeitt við økjunum Hiti og streymur, Flutningur, Bátar og skip, Dálking, Burturkast og Kommunan sum stovnur í umhvørvispolitikkinum. Sum heild hava fyrstu arbeiðsbólkafundirnir hepnast væl, og nógv vitan er blivin býtt út, og fleiri hugskot hava verið frammi. Seinnu arbeiðsbólkafundir, har seinasta hond verður løgd á málini í umhvørvispolitikkinum, verða í jan/feb. Miðað verður eftir, at fáa allar býráðslimir at koma til arbeiðsfundirnar.

Eftir arbeiðsfundirnar, fer umsitingin at gera eitt uppskot til umhvørvispolitikk, sum síðan skal góðkennast av stýrisbólkinum og viðgerast í býráðsnevndum, áðrenn málið verður lagt fyri á býráðsfundi. Hetta verður væntandi í mars 2016.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 13. januar 2016:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Arbeitt hevur verið við at savna vitan um hvørji átøk eru hugsandi í Tórshavnar kommunu, til tess at røkka teimum málum, sum eru neyðug fyri at varðveita eitt reint umhvørvi. Hendan vitan liggur til grund fyri lutmálini í umhvørvispolitikkinum.

Fyribils uppskot til umhvørvispolitik verður framlagt, j.nr. 14/05441-30.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 02. mars 2016:** Framlagt og avgjørt varð at hava ein temadag.

**Ískoyti:**
Uppskot til umhvørvispolitikk j.nr. 14/05441-30 verður lagt fyri náttúru- og umhvørvisnevndina. Nattúru- og umhvørvisnevndin ger viðmerkingar til uppskotið, áðrenn tað verður lagt fyri byggi- og býarskipanarnevndina, trivnaðarnevndina, vinnunevndina, teknisku nevnd og mentamálanevndina. Tá uppskotið er viðgjørt í hesum nevndum, verður umhvørvispolitikkurin tillagaður møguligum viðmerkingum og kemur aftur í náttúru- og umhvørvisnevndina, áðrenn hann fer fyri fíggjarnevndina og býráðið.

**Tilmæli:**
Stýrisbólkurin mælir til at taka undir við umhvørvispolitikkinum, og senda hann til ummælis í byggi- og býarskipanarnevndini, trivnaðarnevndini, vinnunevndini, teknisku nevnd og mentamálanevndini.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 20. apríl 2016:** Umrøtt og verður lagt fyri aftur á komandi fundi.

**Ískoyti:**
Umsiting hevur gjørt tillagingar sambært tí, sum varð avgjørt á seinasta nevndarfundi, harumframt hevur Lena Reinert rættlisið umhvørvispolitikkin.

Uppskotið verður lagt fram á fundinum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 04. mai 2016:** Samtykt at taka undir við uppskotinum til umhvørvispolitikk, sum varð lagt fram á fundinum og senda hann til ummælis í byggi- og

býarskipanarnevndini, trivnaðarnevndini, vinnunevndini, teknisku nevnd og mentamálanevndini, at leggja fyri nevndina aftur.

**Mentamálanevndin 25. mai 2016:** Nevndin hevur umrøtt politikkin og tekur undir við uppskotinum til umhvørvispolitikk við teirri viðmerking at miðað verður eftir at útvega neyðugar heimildir til tess at tryggja at náttúru og bygt øki verða vard móti óruddi og burturkasti.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. mai 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Trivnaðarnevndin 30. mai 2016:** Samtykt at taka undir við uppskotinum til umhvørvis-politikk, sum varð lagt fram á fundinum.

**Tekniska nevnd 01. juni 2016:** Samtykt at taka undir við uppskotinum til umhvørvispolitikk.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Smávegis broytingar eru gjørdar í tekstinum til umhvørvispolitikkin. Hesar broytingar eru serliga onkur smávegis rætting, og onkur setningur er orðaður øðrvísi, so setningurin bleiv lættari at skilja. Harafturat er ein stuttur tekstur komin afturat í byrjanini um umhvørvisarbeiðið í Tórshavnar kommunu.

Somuleiðis eru tvær viðmerkingar gjørdar, ein til eitt mál undir *Varandi orku* og seinna viðmerkingin er til eitt mál undir *Einki burturkast*.

Hesi skjøl eru viðkomandi fyri viðgerðina av málinum:

- Umhvørvispolitikkur (upprunaligt uppskot)
- Umhvørvispolitikkur (við broytingum sum síggjast)
- Umhvørvispolitikkur (við broytingum)

Umhvørvispolitikkurin manglar enn at fara fyri vinnunevndina og fíggjarnevndina, áðrenn hann fer til viðgerðar í býráðnum. Tí er umráðandi at hesar broytingar koma fyri náttúru- og umhvørvisnevndina, áðrenn politikkurin fer víðari í hinar nevndirnar og býráðið.

**Faldari til umhvørvispolitikk**
Tá umhvørvispolitikkurin er samtyktur í býráðnum, er ætlanin at umhvørvispolitikkurin kemur at liggja sum ein faldari í Snarskivuni og á heimasíðuni. Umhvørvispolitikkurin eigur somuleiðis at verða sendur til viðkomandi myndugleikar, stovnar v.fl. í kommununi. Tí mælir umsitingin til, at umhvørvisfaldarin í fyrstu atløgu verður prentaður í 1.000 eintøkum.

Umhvørvispolitikkurin hevur fyribils fingið heitið “Grønt lív”. Men í sambandi við gerð av faldara til umhvørvsipolitikkin, mælir umsitingin til, at kapping verður skrivað út um at gera uppskot til eitt heiti til umhvørvispolitikkin og gerð av einum búmerki.

Ymiskar umhvørvis- og náttúrumyndir eru gjørdar til faldaran, og umsitingin hevur fingið eitt fyrsta uppskot til uppsetan av faldaranum. Uppskot til faldara til umhvørvispolitikkin kemur fyri á næsta fundi í náttúru- og umhvørvsinevndini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til:

1. at nevndin ger viðmerkingar til og annars góðtekur nýggjan tekst um umhvørvisarbeiði í Tórshavnar kommunu.
2. at nevndin góðtekur smávegis broytingar, sum eru gjørdar í tekstinum til umhvørvispolitikkin.
3. at nevndin umrøður og tekur støðu til viðmerkingar til mál undir *Varandi orku* og mál undir *Einki burturkast*.
4. at faldarin til umhvørvispolitikkin verður prentaður í 1.000 eintøkum.
5. at kapping verður skrivað út um heiti og búmerki til umhvørvispolitikkin og faldaran.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Vinnunevndin 06. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og vinnunevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

# 211/16 Klagur um larm í Kollafirði vegna skip sum liggja við kei

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 25.11.2015 | 59/15 | 15/03123-10 |
| 2 Vinnunevndin | 01.02.2016 | 5/16 | 15/03123-10 |
| 3 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.09.2016 | 51/16 | 15/03123-10 |
| 4 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 211/16 | 15/03123-10 |

**Málslýsing:**
Síðstu tíðina eru fleiri klagur komnar inn til kommununa um larm og royk frá skipum, sum liggja við kei í Kollafirði. Byggi- og umhvørvisdeildin hevur verið á eftirliti nakrar ferðir á keiini, har skipini liggja, og yviri á Signabø, har klagurnar koma frá.

Tey skip, sum klagað verður um, eru sum oftast útlendsk skip, oftast russiskir trolarar, men eisini føroysk skip av ymsum slag. Á eftirlitinum hevur ikki verið so nógvur roykur, at umsitingin metir, at tað eigur at verða ein ampi fyri íbúgvarnar.

Larmurin er ofta nógvur á sjálvari keiini, tá fleiri skip liggja við bryggju í senn og mátingar, sum eru tiknar á Signabø um dagin, vísa, at ljóðstøðið er ov høgt, um hetta er sami larmur sum um náttina. Umhvørvisstovan hevur tikið hesar mátingar, sum tó bert eru vegleiðandi (sí skjal j.nr. 2015/03123-8).

Fólk á Signabø klaga um at tey fáa ikki sovið fyri larmi. Tað eru serliga teir djúpu tónarnir frá skipunum sum órógva. Ein borgari hevur boðað frá, at hon hevur meldað seg sjúka frá arbeiði einstakar dagar, tí at hon ikki fekk náttarfrið. Onkur annar hevur fyrr boðað frá, at hann hevur tikið sovitablettir fyri at sovna í larminum.

Kommunan hevur fingið vegleiðandi mátingar frá Umhvørvisstovuni, sí skjal j.nr. 2015/03123-8, sum benda á, at markvirðið ikki varð yvirhildið tann dagin, mátingarnar vórðu tiknar. Hesar mátingar eru tó bert vegleiðandi og kunnu ikki brúkast sum prógv. Eisini skal her upplýsast, at mátingar ikki eru gjørdar um náttina síðani 2007, men at skip, sum liggja við kei, liggja við motorum koyrandi alla náttina, tí teir ikki fáa streym úr landi.

Byggi- og umhvørvisdeildin hevur samskift við Tórshavnar Havn um trupulleikan og gjørt vart við klagurnar. Tórshavnar Havn er eisini gjørd varug við, at vegleiðandi mátingar frá Umhvørvisstovuni benda á, at ljóðstøðið er ov høgt á Signabø um náttina.

Hóast hetta samskifti, sum hevur verið millum byggi- og umhvørvisdeildina og Tórshavnar Havn, so er støðan tann sama og borgarar á Signabø eru enn plágaðir av larmi. Tórshavnar Havn hevur upplýst, at tá ið klagað verður, so leggja teir dent á hvat tað er fyri skip og síðani verður samskift við tað einstaka skipið. Umsitingin metir, at samlaða ljóðstøðið ikki eigur at fara upp um ásett markvirðir og er í so máta ikki áhuga í hvør tað er sum larmar.

Yvirskipað sæð, stendst samlaði larmurin av virkseminum hjá Tórshavnar Havn, og av tí at tað er ymiskt hvussu nógv skip liggja við kei, so er trupult at stýra ljóðstøðinum á henda hátt.

Mett verður tí, at tað er neyðugt at taka málið upp til umrøðu, herundir eisini at kanna eftir um tað er møguligt at veita streym úr landi. Hetta kemur at loysa trupulleikan við larmi og royki og harafturat er ein slík tilgongd eisini í tráð við umhvørvispolitikkin hjá Tórshavnar kommunu og við visiónina um at brúka meira grøna orku á landi.

Soleiðis ber til at fáa skip til at brúka grøna orku, tá tey liggja við bryggju. Eitt hugskot er at kommunan, sum ein liður í hesum arbeiði, setir seg í samband við landsmyndugleikarnar fyri at fáa flutt hesi viðurskifti til at fevna um alt landið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin umrøður málið og beinir málið í vinnunevndina til at viðgera hvørjir møguleikar eru, herundir reglur, mannagongdir og møguleikan at fara undir eina tilgongd, at veita streym úr landi.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 25. november 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Eins og vegir verða nýttir til flutning, verða havninar eisini brúktar til flutning av fólki og farmi. Havninar hava serliga stóran týdning í Føroyum, tí her skal allur farmur og fiskur, og partvíst fólk, avgreiðast.
Í okkara grannalondum verður roynt at flyta so nógv av farminum sjóvegis, tí hetta er meira umhvørvisvinarligt, enn at koyra eftir vegunum.
Tá myndugleikar fáa klagur um larm í havnunum, eiga hesar at verða viðgjørdar í einum størri umhvørvis- og nyttu samanhangi, heldur enn at seta strong krøv um at yvirhalda onkur markvirðir.
Tað kunna ikki bara verða sett krøv til larm frá skipum, og ongi krøv sett til vegir í tættbygdum øki við nógvari ferðslu.

Fyri nøkrum árum síðani vóru serliga nógvir trolarar og farmaskip úr Eysturevropa og umskipaðu í Kollafirði. Av tí at tað vóru nógvar klagur úr Kollafirði, fluttu nevnda virksemi til aðrar havnir í Føroyum.
Nevnda slag av umskiping hevur ikki verið í Kollafirði í 2015, við undantak av nøkrum heilt fáum døgum.
Tá tað í 2015 verður klagað um larm og royk frá skipum, sum liggja á Kollafirði, má tað ásannast, at klagararnir á Signabø eru meira følsom fyri larmi frá havnarløgum enn onnur fólk, sum búgva á Langasandi og annars aðrastaðni í Føroyum.

Tað verður tosað um vegleiðandi markvirði fyri óljóð. Hesi markvirði eru galdandi fyri tað einkulta skipið, og ikki samlað fyri alt havnaøkið sí j.nr. 15/03123- ?.

Í einum vegleiðandi skrivi frá Miljøstyrelsen, sí j.nr. 15/03123-? verður m.a. sagt soleiðis:

- *Som et væsentligt grundlag for en afgørelse om at gribe ind over for generende støj fra skibe i havn, skal miljømyndigheden kende til de tekniske muligheder for at reducere støjen. Det indgår i en vurdering af, om indgrebet er proportionalt.*
- *Miljøstyrelsen finder, at der i forbindelse med overvejelser om indgreb overfor skibe i havn bør indgå et overordnet hensyn til, hvordan godstransporten alternativt kan håndteres, herunder overvejelser af de miljømæssige og trafikale konsekvenser. Ligeledes bør det inddrages hvor ofte, de aktiviteter forekommer, som giver anledning til generende støj.*
- *Strømforsyning fra land vil fjerne både støj og luftforurening fra hjælpemotorer. Det er imidlertid ikke endnu fælles standarder for strømforsyning af skibe, så løsningen kan ikke bruges, når det kommer forskellige skibe til en havn eller virksomhed.*

- *Der er en række muligheder for, at havnevirksomheder kan reducere støjen fra losse- og lasteaktiviteter, men derimod meget begrænsede muligheder for at nedbringe støjen fra skibenes hjælpemaskineri.*
- *Hvis der i konkrete situationer gribes ind overfor generende støj fra skibe i havn, vurderer Miljøstyrelsen, at det i en årrække kan være nødvendigt at acceptere højere støj fra skibenes hjælpemaskineri end fra andre støjkilder.*
- *Sker indgrebet ved at fastsætte støjgrænser for skibe i havn, bør der sættes særskilte grænser for støjen fra hjælpemaskineriet, idet der tages særligt hensyn til, at der i praksis er begrænsede mulighrder for at nedbringe støjen.*

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Tað má ásannast, at tað ikki er møguligt at veita streym frá landi til øll skip, men miðast skal ímóti at veita streym frá landi har hetta er tøkniliga og fíggjarliga ráðiligt..

Tað er ikki møguligt hjá øllum skipum at larma minni enn eitt ávíst, tí má markvirðið fyri larm frá motorum hækkast, og verða eins fyri alt landið.

**Vinnunevndin 01. februar 2016:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Málið hevur verið fyri í vinnunevndini, har kunnað varð um málið. Tilmæli frá havnameistaranum er, at markvirðið má hækkast, soleiðis at ávís skip sum, ikki kunnu larma minni enn eitt ávíst, verða lógliggjørd. Hetta vil umsitingin ikki viðmæla, tó at tað kanska er rímiligt at geva undantaksloyvi til skip sum t.d. eru bygd innan eitt ásett ár.

Tey markvirði, sum umsitingin gongur eftir, eru at finna í vegleiðing fyri
Miljøstyrelsens vejledning nr. 5/1984 « Ekstern støj fra virksomheder». Virðini eru at síggja í niðanfyristandandi talvu:

| Mandag - fredag kl. 07 - 18, lørdag kl. 07 - 14 | Mandag - fredag kl. 18 - 22, lørdag kl. 14 - 22, søn- og helligdag kl. 07 - 22. | Alle dage kl. 22 - 07 | |
|---|---|---|---|
| 1. Erhvervs- og industriområder | 70 dB | 70 dB | 70 dB |
| 2. Erhvervs- og industriområder med forbud mod generende virksomheder | 60 dB | 60 dB | 60 dB |
| 3. Områder for blandet bolig- og erhvervsbebyggelse, centerområder (bykerne) | 55 dB | 45 dB | 40 dB |
| 4. Etageboligområder | 50 dB | 45 dB | 40 dB |
| 5. Boligområder for åben og lav boligbebyggelse | 45 dB | 40 dB | 35 dB |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 6. Sommerhusområder og offentligt tilgængelige rekreative områder | 40 dB | 35 dB | 35 dB |

Í Føroyum eru eingi lógarásett krøv fyri larm, men mugu vit roknað við, at føroyingar eins og onnur hava tørv á friði har tey búgva. Tískil metir umsitingin tað verða neyðugt at halda seg til somu virðir her sum aðrastaðni.

Tórshavnar kommuna fer framyvir eins og áður at fáa klagur um larm frá skipum og tað er neyðugt at vit taka borgarar og teirra klagur í álvara.

Inntil víðari hava vit ikki aðra mannagongd enn at tá klagur koma inn, so boðar umsitingin havnamyndugleikanum frá, sum so skal seta seg í samband við skipið klaga verður um, at fáa ljóðstøðið niður.

Kommunan hevur eisini møguleika at fáa ljóðkanningar gjørdar, men hetta tekur longri tíð og kann ikki loysa trupulleikan við tí ítøkiliga skipinum, sum liggur við kei beint tá. Tá kanningarnar verða gjørdar, er skipið langt síðani farið frá bryggju aftur.

Tey skipini, sum klaga verður um, liggja ofta í ógvuliga stutta tíð, so í sær sjálvum skuldi hvørt skip ikki verið ein trupulleiki. Men fólk, sum búgva á Signabø, búgva har alt árið og tískil eru tað tey somu sum fáa ampa av øllum skipunum, sum liggja við kei.

Sjónarmiðið hjá umsitingini er, at hetta er virksemi hjá Tórshavnar Havn, sum sostatt hevur ábyrgdina av at halda ljóðstøðið niðri undir markvirðunum, sum eru ásett.

Umsitingin metir, at framyvir, tá klagur koma inn, so skal umsitingin fara á eftirlit og gera eina máting (við hondmátara, er bert vegleiðandi), og um ljóðstøðið fer upp um markvirðið, skal Tórshavnar Havn fráboðast og seta seg í samband við skipið, sum er uppruni til larmin. Skal meir gerast við mannagongdir á økinum, so má hetta takast upp í umhvørvispolitikkinum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. september 2016:** Vísandi til at ongi lógarkrøv eru um markvirði fyri larm frá motorum, heitir nevndin á býráðið um at biðja landsstýrið um at áseta markvirði, sum eru galdandi fyri alt landið.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt at heita á Kommunufelagið um, at biðja landsstýrið áseta markvirði galdandi fyri alt landið.

# 212/16 Uppskot til broyting av serstøku byggisamtykt nr. 7 og almennu byggisamtyktini við Óðinshædd

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 26.08.2016 | 208/16 | 16/02881-1 |
| 2 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 212/16 | 16/02881-1 |

**Málslýsing:**
Við eini broyting í byggisamtyktini legði kommunan í 1999 fimm grundøkir, matr. nr. 1322g, 1322h, 1322i, 1322k og 1322l til skrivstovubygningar eystan fyri vegin fram við Óðinshædd. Grundstykkini vóru seld og nógvar ymiskar ætlanir hava verið her, men enn er ikki so nógv hent og onkur av stykkjunum hava eisini skift eigara. Trý av grundstykkjunum eru útgrivin og á einum stykki er bygging í gongd.

Bústaðir hava bygt íbúðir vestan fyri vegin og hava víst áhuga í at halda fram við bygging í økinum. Teir hava gjørt avtalu við eigararnar av matr. nr. 1322i og 1322k og fingið tilsøgn frá kommununi um at keypa matr. nr. 1322l, um byggisamtyktin verður broytt soleiðis, at bústaðir kunnu byggjast her (15/02808).

Leiðslan hevur heitt á býarskipanardeildina um at skipa fyri at eitt uppskot til broyting av byggisamtyktini verður lagt fyri byggi- og býarskipanarnevndina soleiðis, at bústaðir kunnu byggjast í økinum.

Býarskipanardeildin mælir til at broyta serstøku byggisamtykt nr. 7 soleiðis, at matr. nr. 1322i, 1322k og 1322l verður broytt frá F til B4 og í almennu byggisamtyktini verður frá B10 til A1 fyri sama økið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at góðkenna broytingina av serstøku byggisamtykt nr. 7 og almennu byggisamtyktini sambært kortskjølum, dagfest 14.07.2016 og beina málið í býráðið til samtyktar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

## 213/16 Serstøk byggisamtykt fyri útstykking á Hamrabøi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 26.08.2016 | 209/16 | 16/02924-1 |
| 2 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 213/16 | 16/02924-1 |

**Málslýsing:**
Nú vera fyrireikingar gjørdar at selja tey 22 grundstykkini, sum nú eru í gerð á Hamrabøi í Kollafirði.

Í hesum sambandi hevur býarskipanardeildin gjørt eitt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri skipan og bygging í økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at góðkenna serstøku byggisamtyktina og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

# 214/16 Uppskot til regulering av almennu byggisamtyktini vestan fyri Villingardalsvegin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 26.08.2016 | 205/16 | 16/02840-1 |
| 2 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 214/16 | 16/02840-1 |

**Málslýsing:**
Eigararnir av traðunum matr. nr. 1345a, 1346a og 1347 hava sent umsókn um felags útstykking av ognunum (j.nr. 14/01474). Hetta málið hevur koyrt í langa tíð uttan nakað úrslit m.a. tí at vegalinjan, sum Landsverk hevur lagt til nýggja innkomuvegin til Havnina, liggur uppat traðunum.

Traðirnar matr. nr. 1345a, 1346a og 1347 við Villingadalsvegin, liggja, í almennu byggisamtyktini, fyri størsta partin í A1-øki og restin liggur í 4. grundumráði.

Eigararnir ynskja at fáa broytt byggisamtyktina, soleiðis at parturin av ognunum, sum liggur í 4. grundumráði, verður broyttur til A1-øki.

Málið, um útstykking av ognunum, var aftur viðgjørt í byggi- og býarskipanarnevndini tann 7. juni 2016. Nevndin samtykti at góðkenna útstykkingarætlanina, treytað av at Landsverk gevur sítt tilmæli og at byggisamtyktin verður broytt, soleiðis at parturin av ognunum, sum liggur í 4. grundumráði, verður broytt til A1-øki.

Í hesum sambandi hevur býarskipanardeildin gjørt uppskot til at regulera almennu byggisamtyktina soleiðis, at A1 øki fylgir markinum av øllum traðunum vestan fyri Villingadalsvegin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at byggisamtyktin verður broytt sambært kortum, dagf. 8. juli 2016 og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. august 2016:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Helena D. á Neystabø, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Jákup Dam, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>12. september 2016 | Blað nr.: 13328<br><br>Formansins merki: |

# 215/16 Serstøk byggisamtykt fyri útstykking undir Kongavarða

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 26.08.2016 | 207/16 | 16/02859-1 |
| 2 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 215/16 | 16/02859-1 |

**Málslýsing:**
Nú vera fyrireikingar gjørdar at selja tey 48 grundstykkini, sum nú eru í gerð undir Klongavarða á Argjum.

Í hesum sambandi hevur býarskipanardeildin gjørt eitt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri skipan og bygging í økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at góðkenna serstøku byggisamtyktina og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

# 216/16 Umsókn um broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 1045q, Tórshavn.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 26.08.2016 | 204/16 | 16/01463-2 |
| 2 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 216/16 | 16/01463-2 |

**Málslýsing:**
Umsókn dagfest 23. mars 2016, um broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 1045q, Bóndaheygur 27, frá A1 til A3 øki.

Á ognini stendur ein vinnubygningur, sum umsøkjarin ætlar at byggja um til íbúðir.

Tá vit móttóku umsóknina um broyting av byggisamtyktini frá A1 til A3 øki, soleiðis at íbúðir kundu innrættast á økinum, lá ein onnur broyting av byggisamtyktini frammi til hoyringar, sum loyvir íbúðum í A1-øki við serstakari byggisamtykt. Hendan broytingin í byggisamtyktini var gjørd fyri at sleppa frá at broyta almennu byggisamtyktina frá A1 til A3, har man ætlaði at byggja íbúðir (j.nr. 15/02287). Tí bíðaðu vit við at viðgera hesa umsóknina, til tann broytingin var góðkend. Hendan broytingin var góðkend seinast í apríl mánaði 2016.

Nú hevur býarskipanardeildin gjørt eitt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 1045q, Tórshavn, sum loyvir umbygging av verandi vinnubygningi á ognini til íbúðir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt og beina tað víðari til býráðið til samtyktar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

# 217/16 Serstøk byggisamtykt fyri útstykking 200 - við Myllutjørn - eystanfyri Karlamagnusarbreyt - broyting av byggisamtykt (2007-1719)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.05.2016 | 145/16 | 16/01991-55 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 26.08.2016 | 191/16 | 16/01991-55 |
| 3 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 217/16 | 16/01991-55 |

**Málslýsing:**
"Útstykking 200", eystan fyri Karlamagnusarbreyt og norðan fyri Hoyvíkar skúla, er uml. 22.000 fermetrar til støddar. Henda útstykking liggur í einum A3 øki, sum sambært byggisamtyktini, kann nýtast til bústaðir.

63 grundøki, ið eru 200 fermetrar til støddar. Samlaða grundøkið er 300 fermetrar fyri hvørt, har uml. 100 fermetrar verða lagdir til fríøki, sokallað Tún. Túnini eru 3 í tali, og liggja hesi við atgongd frá Karlamagnusarbreyt.

Atgongd verður til alla útstykkingina frá Karlamagnusarbreyt. Í uppskotinum eru 3 atkomur. Framvið útstykkingini á atkomusíðuni móti Karlamagnusarbreyt, verður ein býlingsvegur, ið kann nýtast, um tørvur skuldi verið á tí. Hetta kann t.d. verða galdandi um ein av atkomuvegunum er ringur at koyra eftir í t.d. hálku ella av aðrari orsøk.

Atkomuvegurin leiðir bilar og fólk inn til Túnini, ið verða savnandi fyri býlingin. Frá Túnunum verða minni húsavegir inn til tey einstøku húsini. Øll felagsparkering, renovatión, møguliga postskipan, bilavask o.a. og spæl verður miðsavnað um Túnini.

Til hvørt Túnið hoyra uml. 20 hús. Húsini standa á einum grundøki, ið eru uml. 200 fermetrar til støddar. Húsini eru 8,75 x 6,25 metrar til støddar, úthúsini/bilhúsini eru 5,50 x 3,75 metrar til støddar. Planering og sokklar til húsini og úthúsini/bilhúsini verða staðsettir av TK.

Staðsetingin av húsum og úthúsum/bilhúsum verður samtykt í eini serstakari byggisamtykt fyri "Útstykkingina 200", eystan fyri Karlamagnusarbreyt

Nú er eitt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri "Útstykking 200" gjørt.

Serstaka byggisamtyktin ásetur treytir fyri bygging v.m. og nágreinar ymisk viðurskifti í økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at uppskotið um serstaka byggisamtykt fyri "Útstykking 200" verður góðkend.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. juni. 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 21. juni 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Nú avgerð er tikin um at fara í gongd við útstykkingina við Mylnutjørn, hevur umsitingin gjørt uppskot til at tillaga ætlanina soleiðis, at tað slepst undan at byggja brandmúrar ímóti

grannamarki. Eisini er uppskot gjørt til at geva loyvi til at byggja karnappar, svalar o.a. eftir at fyrispurningar um hettar eru komin frá teimum sum hava fingið tillutað stykkir.

Tí hevur umsitingin gjørt uppskot um broytingar í serstøku byggisamtyktini hesum viðvíkjandi.

Tær flestu broytingarnar eru í § 4 um bygging, stødd, staðseting og snið húsanna.

Serstaka byggisamtyktin verður løgd fram á fundinum og uppskot til broytingarnar verða gjøgnumgingnar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at uppskotið um broyting av serstøku byggisamtykt fyri ”Útstykking við Mylnutjørn”, j.nr. 2007-1719/12, verður góðkend.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. februar 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

**Býráðið 25. februar 2010:** Einmælt samtykt við tí ískoyti, at heiti skal broytast til “Útstykking við Myllutjørn”.

**Ískoyti:**
Seinasta freist at koma við mótmælum ella broytingaruppskotum til serstøku byggisamtyktina var 19. apríl 2010.

Kommunan hevur móttikið tvey mótmæli/broytingaruppskot.

Tað eina mótmælið er felags frá 14 av keyparunum og snýr seg um avmarkingarnar av vindeygum ímóti marki.

Hitt mótmælið/broytingaruppskotið snýr seg um møguleika at samanbyggja sethús og bilhús og at nýta bilhústakið til altan.

Ummæli av mótmæli/broytingaruppskotum og tilmæli koma til fundin.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. apríl 2010:** Nevndin samtykti at at beina málið í bygginevndina til ummælis áðrenn støða verður tikin.

**Ískoyti:**
Skriv er komið frá bygginevndini dagfest. 18 mai 2010, j.nr. 2007-1719/23. Skrivið verður framlagt á fundinum.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at uppskotið um broyting av serstøku byggisamtykt fyri ”Útstykking við Mylnutjørn”, j.nr. 2007-1719/12, verður góðkend.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mai 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við viðmerkingunum frá bygginevndini í skjali nr. 2007-1719/23 og heitir á umsitingina at kanna eftir um hesar kunnu arbeiðast inn í serstøku byggisamtyktina.

**Ískoyti:**
Umsitingin kemur við tilfari til fundin.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. juni 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við uppskotinum til serstaka byggisamtykt við hesum broytingum:

*§4, stk. 6.2.: Húsaendi móti koyrivegi kann ikki hava vindeygu nærri enn 0,9 m upp frá gólvi á 1. hædd.*

*Nýtt §4, stk. 6.3: Húsaendi móti fríøki og gøtu, felagsøkini undantikin, kann ikki hava vindeygu nærri enn 0,6 m upp frá gólvi á 1. hædd.*

**Býráðið 24. juni 2010:** Einmælt samtykt, at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini 14. juni 2010, við tí ískoti til §4 stk. 1.5, at ásetingin ikki er galdandi fyri hús 8, 23, 38 og 54.

**Ískoyti:**
Seinasta freist at mótmæla uppskotinum til serstaka byggisamtykt var mánadagin 30. august.

Tá freistin var farin hevði TK móttikið eitt mótmæli/broytingaruppskot.

Hetta mótmæli er frá eigaranum av stykki 27, sum hevur felagsøki/tún sum granna. Hann ynskir at húsini, sum standa í mark ímóti felagsøki skulu hava somu undantøk sum tey sum standa í mark ímóti fríøki. T.v.s. ongar treytir um betongvegg í 3 m hædd og ongar avmarkingar vindeygum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at halda fast við býráðssamtyktina frá 24. juni 2010 vísandi til, at broytingar í avmarkingunum ímóti felagsøkjum/túnum vil viðføra stórar skerjingar fyri nýtsluna av hesum, ið eru ætlaði sum tilhaldspláss hjá øllum íbúgvunum í økinum umframt vegatgongd til og frá húsunum.

Jan Christiansen var ikki við til hetta málið.
Elin Lindenskov var við til hetta málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. september 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 21. oktober 2010:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Bygginevndin fyri Myllutjørn hevur við skrivi dagfest 9. juni 2011 heitt á byggi- og býarskipanarnevndina um at loyva at bilhúsini verða gjørd breiðari, soleiðis at tey flukta við sethúsini.

Sambært verandi ásetingum eru grundstykkini 10,5 m breið, byggifeltið til sethúsið er 6,25 m og til bilhúsið 3,75 m.

Í serstaku byggisamtyktini stendur soleiðis í §4:

> Stk. 2 Byggifelt 2 er til bilhús/úthús
> Mest 2.1. loyvda stødd mált uttan er 5,50 x 3,75 m.
> 2.2. Byggjast kann í einari hædd.
> 2.3. Mest loyvda hædd er 4,50 m mált frá planeringshædd, tó er mest loyvda hædd móti granna 2,5 m.
> 2.4. Síða í mark skal verða 20 cm betongveggur í 2,5 m hædd. Hetta er tó ikki galdandi fyri hús nr. 15, 30, 45 og 64

2.5. Tak skal verða minst BD-húsalutur 60. Hetta er tó ikki galdandi fyri hús nr. 15, 30, 45 og 64
Sí kortskjal nr. 3 og 4.

Um bilhúsini skulu breiðkast soleiðis at tey flukta við sethúsini, kunnu byggifeltini víðkast, soleiðis at breiddin verður 4,25 m.

Hendan broyting kann ikki gerast sum frávik, tí hon rúmast ikki innanfyri ásetingarnar í Serstøku byggisamtyktini §7 um undantaksloyvi frá byggisamtyktini og broytingar, har tað stendur, at byggivaldið kann geva smávegis lættar frá reglunum í hesi byggisamtykt, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Skulu byggifeltini til bilhús/úthús gerast størri, so er neyðugt at broyta serstøku byggisamtyktina tilsvarandi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta serstøku byggisamtyktina, soleiðis at byggifeltið til bilhúsið verður breiðkað frá 3,75 m til 4,25 m.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. juni 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 16. juni 2011:** Einmælt samtykt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. oktober 2011:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Skriv er komið frá einum eigara við Myllutjørn um at sleppa kravinum um brandvegg móti túni/spæliplássi. Hennara grundstykki er út móti einum túni/spælipássi og er kravið har, at brandveggur skal verða í mark. Sethús nr. 8, 23, 38, og 54 eru tey einastu ið eru undantikin frá ásetingunum í serstøku byggisamtyktini um brandvegg í mark.
Sí skriv frá eigara og yvirlitskort yvir útstykkingina.

**Formaðurin í byggi- og býararnevndini hevur biðið um at fáa málið á skrá.**

**Byggi- og býarskipanarnevndin 7. november 2011:** Nevndin samtykti at taka málið upp saman við umbønini sum væntandi kemur frá eigarafelagnum um at bjálva betongveggirnar uttaná.

**Ískoyti:**
Eigarafelagið við Myllutjørn søkir við skrivi, dagfest 22. mars 2016 um loyvi til at gera bilhúsini 1,5 m longri.

Sambært serstøku byggisamtyktini §2, stk. 5 eru byggifeltini til úthús/bilhús 5,50 x 4,25 metrar til støddar. Eigarafelagið við Myllutjørn ynskir at fáa hettar broytt til 7,00 x 4,25 metrar.

Grundgevingin er, at við Myllutjørn búgva fyri tað mesta bara ungar familjur við fleiri børnum og hava tey tí stórar bilar, upp til 5 metrar til longdar. Tá bilhúsið er 5,50 metrar til longdar, er ikki møguligt at ganga rundan um bilin í garasjuni og heldur ikki ber til at hava annað í garasjuni, tí tað er ikki pláss.

Viðmerkingar frá umsitingini:
Hendan broyting kann ikki gerast sum frávik, tí hon rúmast ikki innanfyri ásetingarnar í Serstøku byggisamtyktini §7 um undantaksloyvi frá byggisamtyktini, har tað stendur, at byggivaldið kann geva smávegis lættar frá reglunum í hesi byggisamtykt, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Skulu byggifeltini til bilhús/úthús gerast størri, so er neyðugt at broyta serstøku byggisamtyktina tilsvarandi.

Sambært serstøku byggisamtyktini fyri øki gr. 4 stk. 5 telur úthús/bilhús ikki við í útrokning av nýtslustigi.

Byggifeltini til sethús og úthús/bihús eru eins stór fyri øll stykkini, men staðsetingin á stykkini eru ymisk, nøkur bilhús standa 5 m frá vegnum og nøkur standa longur inni á stykkinum og tí er ymiskt hvussu væl tað ber til at víðka um bilhúsini.

Ein stórur partur av húsunum eru bygd, og hava hesi bygt út frá teimum byggifeltum sum eru í dag.

Nøkur bilhús eru bygd eftir ásetingunum sum eru í dag.

Hjálagt eru kortskjøl av verandi byggisamtykt, j.nr. 16/01991-56.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at býarskipanardeildin ger uppskot til broyting í serstøku byggisamtyktini, soleiðis at ynski um størri bilhús kann gangast á møti, har tað ber til.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Eftir umsókn frá eigarafelagnum við Myllutjørn hevur byggi- og býarskipanarnevndin samtykt, at býarskipanardeildin skal gera uppskot til broyting i byggisamtyktini, soleiðis at bilhúsini/úthúsini kunnu víðkast 1,5 m í longdini til 7 m.

Útstykkingin er skipað soleiðis, at øll stykkini eru somu stødd við somu stødd av byggifeltum. Byggifeltini til bilhús/úthús eru ávikavist 5 m og 9,8 m frá vegnum. Tað er týdningarmikið at frástøðan frá innkoyringini til bilhúsið er minst 5 m, soleiðis at ein bilur kann standa her, og eisini tí at innkoyringarvegirnir eru so smalir, at ikki ber til at venda bilinum uttan at koyra inn á grundstykkini.

Víddin á stykkinum ger, at tað ikki er pláss fyri at staðseta bilhús og sethús síð um síð. Tí ber illa til at víðka bilhúsið á teimum stykkjunum, har bilhúsið stendur 5 m frá vegnum, tí har er bert ein metur ímillum sethús og bilhús. Her kundi man í staðin loyvt at byggja eitt úthús fast í bilhúsið, sum er t.d. 2,75 m breitt og 2,25 m langt.

Á stykkjunum, har húsini eru bygd í mark ímóti vegnum við innkoyringini til húsini, eru byggifeltini til bilhús 9,8 m frá vegnum. Her ber til at víðka bilhúsið 1,5 m, sí hjáløgdu tekningar.

Somuleiðis er fyrispurningur sendur kommununi um ynski um at fáa broytt serstøku byggisamtyktina soleiðis, at møguleikar verða at byggja altanir. Býarskipanardeildin hevur gjørt

uppskot til at loyva altanir ímillum útbygningarnar byggifelt 3 og 4, sí hjáløgdu tekning. Av tí at minni enn 5 m kann koma at verða ímillum sethúsini, er neyðugt at krevja at altanirnar verða gjørdar úr tilfari, sum ikki kann brenna.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at taka støðu til um serstaka byggisamtyktin fyri útstykkingina við Myllutjørn skal broytast soleiðis, at á stykkjunum har úthús/bilhus er 9,8 m frá innkoyringarvegi, kunnu leingja bilhúsið 1,5 m og á stykkjum har úthús/bílhús er 5 m frá vegi, kann eitt úthús 3 m breitt og 1,5 m langt byggjast afturat bilhúsinum sambært hjáløgdu kortum. Harumframt verður mælt til at taka støðu til um bygging av altanum skal loyvast sambært hjáløgdu tekningum og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. august 2016:** Samtykt at broyta byggisamtyktina sambært tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

# 218/16 Avtøka av serstakari byggisamtykt fyri útstykking undir Gráasteini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 26.08.2016 | 206/16 | 16/02858-1 |
| 2 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 218/16 | 16/02858-1 |

**Málslýsing:**
Í 2008 hevði kommunan móttikið fleiri umsóknir at sundurbýta ognir undir Gráasteini. Allar hesar ognirnar liggja niðanfyri íbúðarbyggingina undir Gráasteini og liggja síð um síð. Talan er um ognirnar:

| | | |
|---|---|---|
| Matr.nr.1116a | Elly Nielsen. | 2006-3219 |
| Matr.nr.1118b | Finnur J. Rubeksen. | 01/00759 |
| Matr.nr.1119 | Sp/f K.J.Contractors. | 2005-2003 |
| Matr.nr.1120a. | Hendrik Rubeksen. | 2005-1683 |

Kommunan valdi tí at gera eina samlaða serstaka byggisamtykt fyri allar hesar ognirnar, við felags vegum, fríøkjum, leiðingum v.m.

Hendan serstaka byggisamtyktin fekk ikki góða undirtøku frá eigarunum av ognunum, sjálvt um umsitingin hevði nógvar fundir við teir einstøku eigararnar.

Síðani er einki hent í økinum, men kommunan hevur móttikið nýggjar útstykkingarætlanir, sum ikki fylgja serstøku byggisamtyktini.

Ásannandi at helst einki hendur á økinum so leingi at serstaka byggisamtyktin er galdandi, hevur leiðslan mælt til at avtaka serstøku byggisamtyktina fyri útstykking undir Gráasteini.

Seinastu tíðina hevur samskifti verið við eigararnar av matr. nr. 1116a og 1118b, Tórshavn, um at koma við eini samskipaðari ætlan fyri teirra ognir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at serstaka byggisamtyktin fyri útstykking undir Gráasteini verður avtikin og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>12. september 2016 | Blað nr.: 13337 |
| | | Formansins merki: |

# 219/16 A-PLAN : Umsókn um byggiloyvi til kova við skálkalág á ognina matr. nr. 553, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 26.08.2016 | 213/16 | 16/01882-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 260/16 | 16/01882-5 |
| 3 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 219/16 | 16/01882-5 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
A-plan søkir vegna eigaran um tilsøgn til byggiloyvi, at byggja ein kova við skálkalág eystureftir á verandi sethúsum á omanfyri nevndu ogn.
Orsøkin til útbyggingarætlanina er, at eigarin, sum er ein tilkomin kvinna, ikki gerst yngri og útbyggingin vil gera tað munandi høgligari, framhaldandi at búgva í húsunum, sum eru sera lítil.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ognin liggur í 2. grundumráði í almennu byggisamtyktini, er friðað og hevur avmarkandi ásetingar viðv. útsjónd tinglýstar í skeytinum.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ognin, húsini á Mýruni, undir Ryggi 11, er 75 $m^2$ til víddar. Av tí at lidnar tekningar ikki fyriliggja, ber ikki til at siga hvat byggistigið og nýtslustigið verður, men roknast skal við at byggistigið verður nakað hægri enn mest loyvda, har mest loyvda er 0,5 og 1,05.

FRIÐING
Tá talan er um friðaðar bygningar, skal fornminnisnevndin hoyrast. Fornminnisnevndin hevur viðgjørt ætlanina og hevur givið eitt treytað loyvi. Treytirnar eru:

- Tilbygningurin skal takast niður við eigaraskifti og skal tinglesast servituttur á ognina um hetta.
- Í sambandi við arbeiðið skulu neyðugar fornfrøðiligar kanningar gerast av lendinum omanfyri húsini.
- Endalig ætlan skal sendast Fornminnissavninum til góðkenningar.

SERVITUTTUR
Av tí at servituttur viðv. útsjónd er lýstur á ognina, har Tórshavnar kommuna, saman við Forngripafelagnum hevur átalurætt, skal støða takast til, um kommunan ynskir at gera sín átalurætt galdandi ella ikki.

Málið er sent Forngripafelagnum hesum viðvíkjandi og hevur Mortan W. Poulsen, nevndafromaður, úttalað, at Forngripafelagið vanliga fylgir tilmælunum hjá fornminnisnevndini.

Endaligar tekningar fyriliggja ikki júst nú og kann tað møguliga blíva talan um frávik frá ásetingunum í almennu byggisamtyktini

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Byggingin krevur frávik frá ásetingini í stk. 2 í skeytinum:

> *“Húsini skulu haldast í góðum standi og varðveitast í útsjónd, flagtakt, svørt og við hvítum sprossavindeygum. Um húsini verða seld aftur, tryggjar Forngripafelagið sær, tinglisnan átalurætt hesum viðvíkjandi.”*.

Av tí at endaligar tekningar ikki fyriliggja júst nú og ber ikki til at meta um tað møgulig verða frávik frá ásetingunum í almennu byggisamtyktini, t.d. viðv. byggistigið og bygging nærri enn 2,5 m í mark.

**Umhvørvisárin**
Viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1.

**Fíggjarlig viðurskifti**
Ongar bindingar fyri kommununa.

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum**
Fornminnisnevndin hevur givið treytað loyvi.
Forngripafelagið ger ikki sín átalurætt galdandi.

**Skjøl**

| | |
|---|---|
| 16/01882-1 | 0609_001 - Umsókn, tekningar og loyvi frá fornminnissavninum. |
| 16/01882-4 | A-Myruni-Skeyti_og Servituttar |
| 16/01882- | Skriv frá Forngripafelagnum |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at loyva byggingini, við teimum treytum, sum fornminnisnevndin hevur ásett og møguligum treytum, sum umsitingin setir og at beina málið í fíggjarnevndina til støðutakan um at gera átalurættin galdandi ella ikki.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Vísandi til treytaða loyvið frá Fornminnisnevndini mæla kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini til at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini og ikki gera átalurættin galdandi.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

# 220/16 Umsókn um byggiloyvi til útbygging á matr. nr. 870q, Tóshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 26.08.2016 | 201/16 | 16/01662-8 |
| 2 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 261/16 | 16/01662-8 |
| 3 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 220/16 | 16/01662-8 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Eigarin hevur nýliga keypt ognina, Skákið 3, og søkir um byggiloyvi til at dagføra og gera broytingar í innrættingini í verandi húsum og harumframt at byggja uppí sambært hjáløgdu tekningum.

Eigarin sigur seg ikki at hava verið vitandi um, ella er blivin skeivt kunnaður um, hvørjar ásetingar eru galdandi á ogn hansara og er hann tískil byrjaður at høvuðsumvæla húsini (tó ikki at byggja út), tikið gamla klædning burtur, bjálvað, plátað og er byrjaður at klæða húsini við 5'- 6' timburbrettum við avfasaðum kantum. Eisini hevur hann fóðrað uppá grundina og ætlar at klæða hana við sama timburklædningi, út í eitt við restina.

Broytingar eru gjørdar í innrættingini og ávirkar hetta staðsetingar og støddir á vindeygum.

Fleiri av íbúgvunum í økinum hava, millum ár og dag, gjørt sær parkeringspláss inni á egnari ogn. Hetta er tað eisini ætlan umsøkjarans.

Viðmerkjast skal, at umsøkjarin ætlaði upprunaliga at byggja eina hædd afturat, men hevur í staðin, og í samráð við byggideildina og býararkitektin, gjørt fyriliggjandi uppskot til uppíbygging.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Øki liggur í umráðispartinum A1 í 3. Grundumraðið í almennu byggisamtyktini.
Í skeytinum, stk. 3, er soljóðandi byrða lýst:

> "*Táið hús eru bygd á tí selda, skal útsjóndin á teimum ikki kunna broytast, hvørki við tilbygging ella við klædningstilfari, og somuleiðis skal tað stakitt, sum á fyrsta sinni er uppsett, haldast uppi í sama líki, sum frá byrjan, so sum avtalað er millum keyparan og fa. DANBERG & JOENSEN í byggisáttmál, undirskrivaður sum hetta skjal.*".

Víðari stendur:

> "*Átalurætt hava seljarnir og eftir teirra deyð Tórshavnar býráð.*".

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ognin, sum liggur í sokallaða Kardamummubýnum, er 452 m$^2$ til víddar. Byggi- og nýtslustigið verða ávikavist 0,28 og 0,37, har mesta loyvda er 0,3 og 0,65.

Kardamummubýurin verður lýstur í Tórshavnar Býaratlas sum verandi serliga viðkvæmur fyri broytingum av húsunum, litum og girðingum.

Havandi í huga, at húsini eru bygd í 60-árunum og at krøvini til bústað hjá barnafamiljum í dag eru nógv broytt, metir umsitingin ikki, at ætlaða útbyggingin og dagføring av verandi, kemur at lýta húsini og býlingin sum heild og kann tískil viðmæla, at byggingin verður loyvd, treytað av

at uppruna litir á klædningi og vindeygum verða nýttir og at nýggjar girðingar verða gjørdar sum upprunaligt, við loddrøttum rimum.

Viðv. byrðuni í skeytinum, er neyðugt at taka støðu til, um kommunan ynskir at gera átalurættin galdandi ella ikki.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Byggingin krevur frávik frá ásetingini í stk. 3 í skeytinum viðv. útsjónd.

**Umhvørvisárin**
Viðgjørt eftir umhvørvisstigið 1

**Fíggjarlig viðurskifti**
Ongar bindingar fyri kommununa

**Skjøl**
16/01662-9 Flatmynd
16/01662-9 Síðumyndir
16/01662-9 Skurður
16/01662-9 Støðumynd
16/01662-7 Skeyti

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at játta byggiloyvi og at beina málið í fíggjarnevndini til støðutakan, um kommunan ynskir at gera átalurættin galdandi ella ikki.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Vísandi til upplýsingarnar í málinum frá umsitingini mæla kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini til at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini og ikki gera átalurættin galdandi.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Marin Katrinu Frýdal, um at beina málið í byggi- og býarskipanarnevnina, vísandi til at málið ikki hevur verið til grannahoyringar og at tilmæli frá býararkitektinum væntar, ið fall við við 5 atkvøðum fyri og 7 ímóti

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Sigrun Mohr, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Halla Samuelsen.

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen

Greiddu ikki atkvøðu:
Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Sigrun Mohr, Halla Samuelsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

# 221/16 Umsókn vegna Sp/F ATH við Bjarna Kyster, um keyp av lendi til parkering, í samband við at felagið umbyggir bygning á matr. nr. 1381n, til hotel.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 168/16 | 16/01240-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.05.2016 | 163/16 | 16/01240-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 213/16 | 16/01240-2 |
| 4 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 262/16 | 16/01240-2 |
| 5 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 221/16 | 16/01240-2 |

**Málslýsing:**
Sp/f ATH við Bjarna Kyster, hevur á byggi- og býarskipanarnevndar fundi 04.03.2016, fingið byggiloyvi við treytum, sum umsitingin setur, og at kunnað verður um málið á komandi fundi.

Ætlanin hjá felagnum umfatar umbygging av verandi bygningi á matr. nr. 1381n, sum verður umbygt og innrættað til hotel, og ynskir felagið í hesum sambandi at leiga ella keypa eitt økið sum liggur framvið, sí kortskjal 16/01241-3, at nýta til parkering.

Økið er til víddar uml. 2.713 $m^2$.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini, mæla til at beina málið í byggi og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Málið hevur verið til viðgerðar hjá umsitingini, byggi- og umhvørvisdeildini og býarskipanardeildini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin viðmælir umsóknina um at keypa økið, og at hetta verður skipað sambært kortskjali j.nr. 16/01796-xx.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Ískoyti.**

Útgangstøði er, at allar kommunalar ognir verða bjóðaðar út

Í sambandi við at umsókna hjá Sp/f ATH við Bjarna Kyster, um at byggja hotel í parti av bygninginum har bowlinghøllin er, hevur umsøkjarin biðið um at fáa meira lendi, fyri at kunna útvega fleiri parkeringspláss.

Skal umsóknin um byggiloyvið verða gingin á møti, er neyðugt at útvega fleiri parkeringspláss og í tí sambandinum hava teir søkt kommununa um loyvi til at keypa ein geira framvið tveimum síðum av bygninginum.

Byggideildin metir, at økið sum biðið verður um, ikki er væl egnað til sjálvstøðugan matrikul at byggja á, vegna skap, atkomuviðurskifti og staðseting, ( liggur sum ein geiri út til vegin ), og ber tí illa til at selja økið sum sjálvstøðugan matrikul at byggja á.

Økið er tó væl egnað til parkering til ætlaða hotellið, og verður tí mælt til at søkja Føroya Landsstýrið um undantak.

Í byggisamtyktini liggur grundstykkið sum ætlanin er at keypa í C1. øki.

**§ 18. Ásetingar fyri umráðispartarnar C1 í 3. grundumráði**
1 Umráðispartarnir verða í síni heild lagdir til miðstaðarbygging, t.e. handlar, skrivstovur, heilsubótarhøli, samkomuhús og tílíkt.
2 Útstykking innan teir einstøku umráðispartarnar verður einans loyvd serstakari byggisamtykt, sum byggivaldið hevur góðkent fyri umráðispartin.
3 Byggistigið má ikki fara upp um 0,4.
4 Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,8 .

Grundstykkið sum søkt verður um at keypa, at nýta til parkeringspláss, er umleið 2.713m2, og er í breidd uml. 21,35metrar. ( Har tað er breiðast )

Ein møgulig søla til umsøkjaran av økinum, lýkur ikki krøvini í teimum undantøkum frá høvuðsregluni, um at fastogn skal verða boðin út alment, áðrenn hon verður seld, ið eru nevnd í § 2, stk. 1, nr. 1-4 í kunngerð um alment útboð av kommunalari fastogn.

Við heimild í § 2., stk. 2, í somu kunngerð, kann tó verða vikið frá kravinum um alment útboð, tá tað annars eru serlig viðurskifti, ið tala fyri, at fastognin kann verða seld uttan alment útboð. Til hetta krevst loyvi frá landstýrismanninum.

Góðkenningin er einans ætlað at vera nýtt í serligum føri, har tað m.a. má metast, at kravið um alment útboð vil forða søluni óneyðugt og at alment útboð ikki hevur við sær tilboð um hægri keypsprís.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at selja umsøkjara lendið til ein prís sum verður sambært virðismeting og til marknaðarprís, út frá tí fortreyt, at talan er um byggilendi sí byggisamtykt.

Sølan við ásettum prísi, sum verður gjørd við grundarlagið í meting er treytað av góðkenning frá Landsstýrinum og verður at leggja fyri aftur í fíggjarnevnd og býráðið.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Óheft virðismeting er gjørd av lendinum, og er metta virði 2.251.790 kr.

**Tilmæli**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at selja umsøkjaranum ognina fyri virðismetingina, ið er 2.251.790 kr. treytað av góðkenning frá Heilsu- og innlendismálaráðnum.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

## 222/16 Glyvursvegur - ummatrikulering

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 03.06.2015 | 66/15 | 14/05197-3 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.08.2015 | 139/15 | 14/05197-3 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 26.08.2016 | 211/16 | 14/05197-3 |
| 4 Tekniska nevnd | 30.08.2016 | 86/16 | 14/05197-3 |
| 5 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 266/16 | 14/05197-3 |
| 6 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 222/16 | 14/05197-3 |

**Málslýsing**.
Í sambandi við at kommunan hevur ynski um at fáa greiðu á óskipaðu matrikulviðurskiftum innan almenna vegaøkið, er ætlan at fara undir skipaða marknaumskipan. Hetta fer at føra við sær, at kommunalir vegir framyvir fara at gerast litra, og skal kommunan fáa Umhvørvisstouna at góðkenna hesa ætlan.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Víst verður til Løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m. og Løgtingslóg nr. 55 frá 16. august 1962 um tinglýsing.

Umhvørvisstovan kann loyva, at eitt lítið øki verður flutt frá einari ogn til aðra. Treytin er, at virði á ognini, sum verður flutt, ikki er hægri enn 50.000 krónur, og at um váttan fyriliggur frá Tinglýsingini um at reglurnar um pant- og servituttviðurskifti í grein 23 í løgtingslóg nr. 55 frá 16. august 1962 um tinglýsing eru fylgdar.

Tað verður framt á tann hátt, at parturin verður fluttur frá tí eina matrikulnummarinum til hitt, uttan fyrst at fáa egið matrikulnummar.

Um sami eigari eigur báðar ognirnar, er onki mark fyri stødd og virði á tí, sum skal flytast, annars eru reglurnar tær somu, sum við marknaumskipan.

Tann, sum ynskir marknaumskipan ella umbýti, skal venda sær til Lendi á Umhvørvisstovuni, sum ger neyðugu kanningarnar fyri at staðfesta lóggildi.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin hevur latið gera korttilfar, sum vísir júst hvat øki talan er um at marknaumskipa.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Ongar viðmerkingar.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongar viðmerkingar

**Umhvørvisárin**
Ongar viðmerkingar

**Fíggjarlig viðurskifti**
Kostnaður fyri matrikuler mál er reguleraður í kunngerð nr. 14 frá 11. februar 2009 um gjøld eftir matrikullógini.

§ 6. Fyri umbýti og marknaumskipanir verða ásett hesi gjøld:

1) Grundgjald 2.000 kr.
2) Fyri hvørja vídd, ið flutt verður, verður goldið 800 kr.

Stk. 2. Verður broytingin gjørd uttan uppmáting, verður gjaldið ásett til helvtina av tí undir stk. 1, nr. 2) nevnda gjaldi.
Stk. 3. Verður broytingin gjørd í sambandi við sundurbýti, fellur grundgjaldið burtur.
Stk. 4. Fyri umskipan uttangarðs, verður goldið 800 kr. fyri hvørja flyting.

Kostnaðurin fyri at marknaumskipa Glyvursvegin gerst sostatt kr. 2.800,-.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum**
Ongar viðmerkingar

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum**
Ongar viðmerkingar

**Skjøl**
Víst verður til støðumyndakort av Glyvursvegin, j. nr. 14/05197-1.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við framlagda støðumyndarkorti av Glyvursvegi, j.nr.14/05197-1 og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tekniska nevnd 03. juni 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. august 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram dagført uppskot av støðumyndarkorti av Glyvursvegi, j.nr. 14/05197-12. Í hesum uppskotinum er skráin á Glyvursvegnum tikin við í komandi matrikul, sum kommunan skal ogna sær.

**Fíggjarlig viðurskifti**
Sambært samskifti við Búnaðarstovuna er samlaði kostnaðurin kr. 1.273.745,70 fyri keyp av lendi frá Búnaðarstovuni, avloysing av biti, frábýtingarútreiðslur, tinglýsingargjald og sakargjald. Víst verður til j. nr. 14/05197-14.

**Tilmæli:**

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>12. september 2016 | Blað nr.: 13347 |
| | Formansins merki: |

Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd til at taka undir við framlagda støðumyndarkorti av Glyvursvegi, j.nr. 14/05197-12 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

Mælt verður til at keypið verður fíggjað av konto 6175, keyp og søla av jørð.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, treytað av at verandi gøta verður varðveitt.

**Tekniska nevnd 30. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini, at verandi gøta verður varðveitt.

**Tilmæli**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til, at málið um gøtuna verður útsett og viðgjørt fyri seg og málið um Glyvursvegin verður avgreitt sambært tilmælinum til byggi- og býarskipanarnevndina 26/8-2016 og teknisku nevnd 30/8-2016.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

# 223/16 Umsókn um, at kommunan yvirtekur Brøttulíð, á matr. 1184 og 886, Tórshavn.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.08.2016 | 72/16 | 16/00387-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 272/16 | 16/00387-3 |
| 3 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 223/16 | 16/00387-3 |

**Málslýsing:**
Borgari í Brøttulíð hevur vent sær til Tórshavnar kommunu við áheitan um, at kommunan yvirtekur privata partin av matr. 1184 og 886d vegøkið Brattalíð. Tórshavnar kommuna hevur síðani 2006 staðið sum medeigari av nevndu matriklunum, fyrri eigarin var Helgi Hansen. (sama er galdandi í Føgrulíð og Grønulíð)

Umsiting kommununnar hevur støðulýst vegøkið og kostnaðarmett møguligar ábøtur (j. nr. 16/00387-2). Belegningurin er rættiliga merktur av nógvum grevstri í sambandi við leiðingsarbeiði. Tørvur er á asfaltering innan fá ár, sum er mett til uml. kr. 700.000,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at boðað verður umsøkjarunum frá, at kommunan er sinnað at yvirtaka vegøkið, ið er fevnt av nevndu matriklum, uttan kostnað fyri kommununa, tá umsøkjararnir hava fingið til vega tilfar og undirskriftir, ið eru neyðugar fyri at tinglesa ánaraskifti. At tilsøgnin er galdandi í 1 ár og at málið verður beint í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 30. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, treytað av at undirskriftir frá øllum eigarum fyriliggja.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

# 224/16 Umsókn um, at kommunan yvirtekur privata vegin Meinhartstrøð, matr. 1115o Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.08.2016 | 74/16 | 16/00392-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 270/16 | 16/00392-3 |
| 3 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 224/16 | 16/00392-3 |

**Málslýsing:**
Ein av eigarunum av privata vegnum á Meinhartstrøð hevur søkt um, at kommunan tekur yvir matr. 1115o, sum vegurin er matrikuleraður til. Tað sum søkt verður um er íalt 1038 fermetrar til víddar, fyri tað mesta vegur, við um 80 fermetrum av øki lagt út til gøtu.

Umsiting kommununnar hevur støðulýst vegøkið og kostnaðarmett møguligar ábøtur (j. nr. 16/00392-2). Høvuðsvegurin er sum nýggjur og krevur tí ikki ábøtur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at boðað verður umsøkjarunum frá, at Tórshavnar kommuna er sinnað at yvirtaka matrikulin, uttan kostnað fyri kommununa og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 30. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, treytað av at undirskriftir frá øllum eigarum fyriliggja.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina malið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

# 225/16 Umsókn um at kommunan yvirtekur privatan veg undir Heygnum matr. 1001a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.08.2016 | 76/16 | 16/00416-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 271/16 | 16/00416-3 |
| 3 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 225/16 | 16/00416-3 |

**Málslýsing:**
Ein av íbúgvunum undir Heygnum, hevur søkt um at kommunan tekur yvir matr. 1001a, sum er einasti matrikulin á vegunum undir Heygnum sum enn er privatur. Tinglýstur eigari er Petur i Gong. Tað sum søkt verður um er íalt 855 fermetrar til víddar, og er partvís høvuðsvegur inn á Heygin Mikla, síðuvegur og nakað av gøtum oman á Velbastaðvegin.

Umsiting kommununnar hevur støðulýst vegøkið og kostnaðarmett møguligar ábøtur (j. nr. 16/00416-2). Høvuðsvegurin er í góðum standi, meðan síðuvegur og gøta kunnu hava tørv á ábótum. Hetta verður mett til 56.000,- kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at boðað verður umsøkjarunum frá, at Tórshavnar kommuna er sinnað at yvirtaka vegin á matriklinum, uttan kostnað fyri kommununa og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 30. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. treytað av at undirskriftir frá øllum eigarum fyriliggja.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

# 226/16 Umsókn um at TK yvirtekur ovarara part av brøttubrekku matr. 1236 Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.08.2016 | 71/16 | 14/02587-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 269/16 | 14/02587-3 |
| 3 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 226/16 | 14/02587-3 |

**Málslýsing:**
Borgari í Brøttubrekku hevur vent sær til Tórshavnar kommunu við áheitan um, at kommunan yvirtekur privata partin av Brøttubrekku, sum er mittasti parturin av vegnum, matr. 1260. Umsøkjarin hevur enn ikki sent formliga umsókn saman við hinum eigarunum.

Umsiting kommununnar hevur støðulýst vegøkið og kostnaðarmett møguligar ábøtur (j. nr. 16/02587-2). Asfaltbelegningurin er nakað merktur av nógvum grevstri í sambandi við leiðingsarbeiði o.l., men er annars í nøktandi standi. Somuleiðis manglar vegurin gongubreyt í báðum síðum, eins og tað er í niðara parti av vegnum, umleið 170 metrar. Kostnaðarmetingin fyri at leggja gongubreyt er uml. 170.000,- kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at boðað verður umsøkjarunum frá, at kommunan er sinnað at yvirtaka vegøkið, ið er fevnt av nevndu matriklum, uttan kostnað fyri kommununa, tá umsøkjararnir hava fingið til vega tilfar og undirskriftir, ið eru neyðugar fyri at tinglesa ánaraskifti. At tilsøgnin er galdandi í 1 ár og at málið verður beint í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 30. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, treytað av at undirskriftir frá øllum eigarum fyriliggja.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti:

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Greiddi ikki atkvøðu: Jógvan Arge

# 227/16 Umsókn um at kommunan yvirtekur veg matr. 688y í Stoffalág

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.08.2016 | 77/16 | 16/00431-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 273/16 | 16/00431-3 |
| 3 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 227/16 | 16/00431-3 |

**Málslýsing:**
Ein av ánarunum (av 3) av matr. 688y, og sum er innkoyringarvegur til Stoffalág 30 og 32, og deilvís til Stoffalág 34 og 38, hevur søkt um at kommunan yvirtekur vegin sum er á matr. nr. 688y, Tórshavn, íalt uml. 255 fermetrar til víddar.

Frá høvuðsvegnum og góðar 27 metrar inn, er sjálvur vegurin í tveimum matriklum, nevnda og 688a sum ikki er fataður av hesi umsókn. Skal ein møgulig yvirtøka veruliga geva meining, eigur matr. 688a eisini at gerast kommunalur.

Umsiting kommununnar hevur støðulýst vegøkið og kostnaðarmett møguligar ábøtur (j. nr. 16/006011-2). Innan nøkur ár verður helst neyðugt at geva vegnum eitt slitlag, ið er mett til uml. 102.000,- kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at boðað verður umsøkjarunum frá, at Tórshavnar kommuna er sinnað at yvirtaka vegirnar á matriklinum 688a og 688y, Tórshavn, uttan kostnað fyri kommununa og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 30. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, treytað av at undirskriftir frá øllum eigarum fyriliggja.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>12. september 2016 | Blað nr.: 13353 |
| | Formansins merki: |

# 228/16 Umsókn um at Tórshavnar kommuna yvirtekur P-øki og veg á Blómubrekku, 1363a

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.08.2016 | 78/16 | 16/00611-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 274/16 | 16/00611-3 |
| 3 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 228/16 | 16/00611-3 |

**Málslýsing:**
Ein av ánarunum av ovara parti av Blómubrekku (nr. 118-148), hevur søkt um at kommunan yvirtekur veg og P-økið, sum er matr. nr. 1363a, Tórshavn, íalt uml. 608 fermetrar til víddar her av uml. 20 fermetrar av vegi.

Umsiting kommununnar hevur støðulýst vegøkið og kostnaðarmett møguligar ábøtur (j. nr. 16/006011-2).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at boðað verður umsøkjarunum frá, at Tórshavnar kommuna ikki er sinnað at yvirtaka vegin á matriklinum og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 30. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

# 229/16 Umsókn um, at kommunan yvirtekur gøtuna millum Vatnsoyraveg og Sandá, matr. 992m Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.08.2016 | 81/16 | 16/01927-4 |
| 2 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 268/16 | 16/01927-4 |
| 3 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 229/16 | 16/01927-4 |

**Málslýsing:**
Borgari hevur í samráð við Løgdeildina biðið um at gøtan, sum gongur frá Vatnsoyravegi oman til Sandá, og sum Tórshavnar kommuna hevur gjørt, á matr. 992 Tórshavn, verður kommunal.

Umsiting kommununnar hevur støðulýst vegøkið og kostnaðarmett møguligar ábøtur (j. nr. 16/01927-3). Talan er um grúsgøtu, 77 metur long, um 3 breið og er víddin 232 fermetrar. Gøtan eigur helst at verða løgd við støðuføstum tilfari. Hinvegin ber til at leggja eitt lag av asfalti, tí brekkan er heldur brøtt, í so fall liggur kostnaðurin fyri hetta á kr. 92.800,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at boðað verður umsøkjarunum frá, at kommunan er sinnað at yvirtaka gøtuna, ið er fevnd av nevnda matrikli, uttan kostnað fyri kommununa, tá umsøkjararnir hava fingið til vega tilfar og undirskriftir, ið eru neyðugar fyri at tinglesa ánaraskifti. At tilsøgnin er galdandi í 1 ár og at málið verður beint í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 30. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

# 230/16 Umsókn um, at Tórshavnar kommuna yvirtekur privatan veg á Haraldsrtrøð, matr. 1039l Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.08.2016 | 82/16 | 16/02148-4 |
| 2 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 267/16 | 16/02148-4 |
| 3 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 230/16 | 16/02148-4 |

**Málslýsing:**
Borgari á Haraldstrøð hevur vent sær til Tórshavnar kommunu við áheitan um, at kommunan yvirtekur privata vegin, matr. 1039l. Umframt atkomvegin sum er 658 fermetrar, harumframt eru tvey parkeringsøki sum eru góðar 340 fermetrar, íalt 998 fermetrar. Flest allir íbúgvar hava 1-2 parkeringsbásar á egnum grundøki, so hesi P-øki dekka helst í stóran mun tørvin á almennari parkering umframt.

Umsiting kommununnar hevur støðulýst økið og kostnaðarmett møguligar ábøtur (j. nr. 16/00387-2). Belegningurin er í góðum standi og tørvar ikki ábøtur. Av tí at talan er um eina lutfalsliga nýggja útstykking við innkoyringarvegi uttan gongubreyt, verður mett at tørvur er á tílíkari, sum verður smáar 45 metrar long, og er kostnaðarmett til 50.000,- kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at boðað verður umsøkjarunum frá, at kommunan er sinnað at yvirtaka vegøkið og P-økini, ið er fevnt av nevnda matrikli, uttan kostnað fyri kommununa, tá umsøkjararnir hava fingið til vega tilfar og undirskriftir, ið eru neyðugar fyri at tinglesa ánaraskifti. At tilsøgnin er galdandi í 1 ár og at málið verður beint í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 30. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

# 231/16 Umsókn um at Tórshavnar kommuna yvirtekur Hvannkrók matr. nr. 1413t Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.08.2016 | 80/16 | 16/00954-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 275/16 | 16/00954-3 |
| 3 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 231/16 | 16/00954-3 |

**Málslýsing:**
Ein av ánarunum av ovara parti av Hvannkróki, hevur søkt um at kommunan yvirtekur vegøkið, sum er matr. nr. 1413t, Tórshavn, íalt 608 fermetrar til víddar.

Umsiting kommununnar hevur støðulýst vegøkið og kostnaðarmett møguligar ábøtur (j. nr. 16/00954-2). Mettur kostnaður 117.000,- kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at boðað verður umsøkjarunum frá, at Tórshavnar kommuna er sinnað at yvirtaka vegøkið og gongugøtuna á matriklinum, uttan kostnað fyri kommununa og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 30. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, treytað av at undirskriftir frá øllum ánarum fyriliggja.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

# 232/16
# Átak parkeringspolitikkur - Parkeringsloyvir til íbúgvar í miðbýnum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 04.05.2016 | 51/16 | 16/01724-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 01.06.2016 | 62/16 | 16/01724-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 30.08.2016 | 83/16 | 16/01724-1 |
| 4 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 232/16 | 16/01724-1 |

**Málslýsing:**
Kommunan hevur við parkeringspolitikkinum samtykt at veita íbúgvum, sum búgva innanfyri parkeringssonuna og ikki hava møguleika at parkera á egnum bústaði, parkeringsloyvi.

Treytir til tann, sum søkir (loyvishavara):
- skal vera privatpersónur
- skal hava bústað innanfyri umrøddu parkeringssonu, og bústaðurin hevur ikki parkeringsmøguleikar*
- skal vera eigari av bilinum, sum søkir parkeringsloyvi, og bilurin skal vera skrásettur á bústaðnum
- bilurin skal  vera undir 3500 kg
- *Um kostnaðurin fyri at gera parkeringspláss á egnum bústaði hjá loyvishavara kann gerast fyri uml, upp til 50.000,-, verður umsóknin ikki játtað.

Tað verður bert 1 parkeringsloyvi útskrivað pr. bústað.

Um eigarin av bilinum ikki er eigari av húsinum, skal hann hava samtykki frá eigaranum av húsinum.

Á borgarafundi á Reinsarínum 18.04.2016, við heitinum parkeringsviðuskiftir í miðbýnum, var góð undirtøka at fáa parkeringsloyvisskipanina setta í verk.

Arbeiðsuppgávur:
1. Kunning til tey sum koma í sonuna
2. Reglugerð
3. Kunning á Heimasíðuni
4. Møguligur kostnaður
5. Atgongd til møguliga gjaldskipan
6. Uppsetan av talgildum umsóknarskjali
7. Innanhýsis mannagongdir og kunnleiki til parkeringsloyvir, starvsfólk í snarskivuni
8. Innanhýsis mannagongdir og kunnleiki til parkeringsloyvir, starvsfólk á Teknisku fyrisiting
9. Faldari
10. Orðing av svarskrivi, við parkeringsloyvi (við skelti at seta í rútin)

11. Orðing av svarskrivi, til tey sum ikki uppfylla treytirna
12. Keypa plastlummar til parkeringsloyvi
13. Kærumøguleikar
14. Atgongd frá Akstovuni.

Ì sambandi við at áseta gjald fyri parkeringsloyvini, so er at siga, at tað er umráðandi at hava fyri eygað, at kommunan hevur eina skyldu at halda seg til prinsippið, um at gjaldið skal ”hvíla í sær sjálvum” – hvørki meira ella minni. Um ikki lógarheimild fyriliggur fyri at krevja gjøld, skal kommunan halda seg til prinsippið um, at gjaldið skal hvíla í sær sjálvum. Hetta merkir, at kommunan skal halda seg til kostprísin, tað má hvørki takast meiri fyri loyvini, enn tað kostar at veita tey og heldur ikki minni.

Tá vit kenna neyva grundarlagið fyri skipanini, og sostatt ikki vita hvussu nógvir borgarar fara at gera gagn burturúr skipanini, so verður neyðugt at seta ein fyribils kostnað. Mett verður, at veiting og umsiting av parkeringsloyvunum kemur at kosta um tær 800 kr. árliga fyri hvørt loyvi. Hesin kostnaðurin má síðani eftirmetast, tá skipanin er komin at virka, og í seinasta lagi um eitt ár, fyri at tryggja okkum at rætta gjaldið verður kravt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at seta parkeringsloyvisskipanina í verk skjótast.

**Tekniska nevnd 04. mai 2016:** Málið umrøtt og verður viðgjørt aftur á næsta fundi.

**Ískoyti:**
Parkeringsloyvir geva rætt til at parkera á øllum parkeringsbásum við tíðarsonuni 2 t og 8 t, í miðbýarsonuni (sona 1), sí kort nr. 16/01724-4, óavmarkaða tíð.

**Tekniska nevnd 01. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um at geva borgarunum rætt til at parkera á øllum parkeringsbásum við tíðarsonuni 2 t og 8 t, í miðbýarsonuni sambært korti nr. 16/01724-4. Nevndin ynskir at sonan til parkeringsloyvi skal økjast til m.a. at fevna um Rabarbukvarterið og Undir Pisuvarða/Tinghúsvegur at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur kannað, hvussu nógvir bilar eru skrásettir, hvussu privatu og almennu parkerings umstøðurnar eru í Rabarbukvarterinum, undir Pisuvarða og á Tinghúsvegnum.

Um parkeringssonan verður víðkað mál nr.: 16/01727 og parkeringsloyvir eisini skulu umfata íbúgvar í nevnda øki viðførir tað:

- Uppmerkjan av uml. 50 nýggjum parkeringsbásum
- Uppsetan av nýggjum skeltum
- Størri arbeiðsøki hjá parkeringsvørðum

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin samtykkir at veita íbúgvum í verandi sonu parkeringsloyvir. Og tá mál nr. 16/01727, Víðkan av sonuni er avgreitt, at víðka loyvisveitanina eisini at fevna um íbúgvarnar í Rabarbukvarterinum, undir Pisuvarða og á Tinghúsvegnum.

**Tekniska nevnd 30. august 2016:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrun Mohr og Helena D. á Neystabø, samtykti at taka undir við tilmælinum, tó so at víðkanin av sonuni verður framd í seinasta lagi 1. januar 2017.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, vísir til samtyktina í teknisku nevnd 1. juni 2016, at sonan til parkeringsloyvi umfatar eisini Rabarbukvarterið og undir Pisuvarða/Tinghúsvegur, ið eisini fáa parkeringsloyvi beinanveg og krevur málið fyri býráðið.

Ein annar minniluti, Bogi Andreasen, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Sjúrður Olsen, um at beina málið í ferðslunevndina, ið fall við 6 atkvøðum fyri og 6 ímóti

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr og Halla Samuelsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Tróndur Sigurðsson.

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá Annfinn Brekkstein, um at beina málið í teknisku nevnd og í ferðslunevndina til ummælis, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 5 ímóti.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge, Helena Dam á Neystabø, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Sigrun Mohr og Halla Samuelsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Tróndur Sigurðsson.

# 233/16 Broyting í reglugerð fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privatan bústað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.06.2016 | 235/16 | 16/02185-1 |
| 2 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 169/16 | 16/02185-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 295/16 | 16/02185-1 |
| 4 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 233/16 | 16/02185-1 |

**Málslýsing:**
Umsitingin hevur umrøtt møguligar broytingar í reglunum um útlutan av fastari ogn við atliti til at lata upp fyri tilflyting til Tórshavnar kommunu. Í hesum sambandi er gjørt uppskot, ið javnsetir lesandi, sum nærkast loknum lesnaði við borgarar í TK. Harumframt hevur umsitingin viðgjørt broyting, ið loyvir íbúgvum uttanfyri Tórshavnar kommuna at taka lut í útlutan av fastari ogn.

Viðvíkjandi teimum lesandi hevur umsitingin gjørt hetta uppskot til nýtt punkt 8:

**"Umsøkjarar undir útbúgving, ið eru búsitandi uttanfyri Tórshavnar kommunu og sum lúka treytirnar í pkt. 7 b) – e), kunnu melda til og taka lut í útlutan, um tey hava ætlan um at flyta í Tórshavnar kommunu eftir lokna útbúgving og kunnu skjalprógva, at tey eru liðug við útbúgving sína innan eitt ár."**

**Viðvíkjandi íbúgvum, sum búgva uttanfyri Tórshavnar kommunu, hevur umsitingin gjørt hetta uppskot til broyting:**

**Við hvørja útlutan verða 80 % av teimum útlutaðu grundøkjunum útlutað millum umsøkjarar, ið lúka ásetingarnar í pkt. 7 og 8, og 20% verða boðin út í lutakasti, har øll kunnu luttaka, sum lúka treytirnar í pkt. 7 b - e).**

**Tilmæli:**
Mælt verður fíggjarnevndini til at umrøða omanfyrinevndu møguleikar.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2016:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Sjúrður Olsen og Jógvan Arge, tekur undir við at broyta reglugerðina og seta inn nýtt pkt. 8 samsvarandi málslýsingini omanfyri viðvíkjandi teimum lesandi. Málið verður beint í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekstein, tekur undir við báðum uppskotum omanfyri, og beinir málið í býráðið við hesum tilmæli.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt at beina málið aftur í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Ein samd nevnd tekur undir við at broyta reglugerðina og seta inn nýtt pkt. 8 samsvarandi málslýsingini omanfyri viðvíkjandi teimum lesandi og at beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

# 234/16 Umsókn um at vera við í útlutan av grundstykkjum í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 298/16 | 15/02599-3 |
| 2 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 234/16 | 15/02599-3 |
| 3 Kollafjarðarnevndin | | | 15/02599-3 |

**Málslýsing:**
Jón Heri Christiansen hevur staðið á bíðilistanum til grundstykki í Kollafirði síðan 23. juli 2015.

Jón Heri Christiansen er búsitandi uttanlanda, og lýkir sostatt ikki treytirnar fyri at fáa tilluta grundstykki frá Tórshavnar kommunu sambært reglugerðini um útlutan av fastari ogn til privatan bústað.

Í telduposti frá 1. juni 2016 hevur Jón Heri Christiansen, vísandi til §10 í umrøddu reglugerð, sum loyvir undantøkum í serligum føri, søkt um loyvi at vera við í útlutanini av grundstykkjum í Kollafirði, ið eftir ætlan skal fara fram í næstum.

Jón Heri Christiansen sigur, at hann og unnustan flyta heim í vetur, ella næsta summar, tá unnustan er liðug at lesa. Tey ynskja at búgva í Kollafirði og hava ikki aðrar møguleikar enn henda.

Á bíðilistanum í Kollafirði eru 34 umsøkjarar. 18 av hesum lúka í løtuni treytirnar fyri at vera við í útlutanini. Í útstykkingini í Kollafirði verða 22 stykki útstykkjaði. Tvs. at um øll, sum í løtuni lúka treytirnar, taka av møguleikanum, so eru stykki eftir. Hinvegin, so er ein teoretiskur møguleiki fyri, at tað vera fleiri, ið lúka treytirnar, tí tey t.d. flyta heim, áðrenn útlutanin fer fram. Tískil kann tað henda, at Jón Heri Christiansen kemur fram um annan umsøkjara, sum lýkir treytirnar, um umsóknin verður gingin á møti.

Býráðið samtykti tann 28. januar 2016 at hetta er seinastu ferð, at kommunan lutar út stykki eftir bíðilistanum fyri Kollafjørð, og at eftir hetta verður ein tilmeldingarskipan sett í verk. Sambært áseting 7a í reglugerðini fyri útlutan av fastari ogn, er ein treyt fyri at vera við í útlutanini, at umsøkjari er búsitandi í Tórshavnar kommunu. Hesa treyt lýkur umsøkjarin ikki.

Áseting 10 í reglugerðini er orðað soleiðis: "**Tórshavnar kommuna kann í ávísum førum víkja frá ásetingunum í hesi reglugerð, um serlig viðurskifti greitt tala fyri hesum**". Reglan hevur verið nýtt til fólk, sum hava serligan tørv vegna sjúku ella brek, men Býráðið hevur einaferð áður gjørt undantak í líkandi støðu. Tá var talan um umsøkjara, sum hevði staðið á bíðilista í 14 ár. Makin hevði fingið arbeiði í Tórshavn og var fluttur heim, børnini høvdu fingið ansingarpláss í kommununi, og umsøkjarin sjálvur hevði fingið starv og skuldi byrja eftir summarfrítíðina.

Sambært galdandi reglugerð er rætti framferðarhátturin fyrst at bjóða teimum umsøkjarunum grundstykki, sum lúka treyirnar í reglugerðini fyri at vera við í útlutanini.

Um so er, at grundstykkir eru eftir, tá at teir 18 umsøkjaranir, ella fleiri, um onkur flytir heim áðrenn útlutanini, hava havt høvi at taka av, kann støða takast til møguliga at loyva umsøkjarum, sum eru staddir uttanlanda í lestrarørindum og sum kunnu skjalprógva at tey

eru liðug við útbúgving sína innan 1 ár at koma uppí part. Í hesum sambandi hevur tað týdning at tryggja at øll lesandi fáa sama møguleika at luttaka í útstykkingini.

**Tilmæli:**
Miðfyrisitingarstjórin og leiðarin á Snarskivuni mæla frá at umsóknin verður gingin á møti.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at mæla býráðnum til at loyva umsøkjarum, ið eru lesandi, og sum eru liðug við útbúgving sína innanfyri eitt ár, eftir at ein útstykking er liðug, at luttaka í útlutanini til fasta ogn, um tey frammanundan standa á bíðilistanum, og at henda skipan bert er galdandi í sambandi við útstykkingarnar undir Kongavarða og í Kollafirði.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

# 235/16 Umsókn um at vera við í útlutan av grundstykkjum undir Kongavarða

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 297/16 | 16/02969-2 |
| 2 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 235/16 | 16/02969-2 |

**Málslýsing:**
Áki F. Olsen og unnustan Erla S. Patursson hava 22. juli 2016 søkt um at vera við í útlutanini av grundstykkum undir Kongavarða. Tey hava staðið á bíðilistanum síðan ávikavist 2005 og 2009, og eru nr. 131 og 260 á bíðilistanum fyri Argir.

Umsøkjararnir eru búsitandi sum lesandi í Danmark, og ætla at flyta heim í januar 2018. Tvs. um umleið 1½ ár.

Býráðið samtykti tann 28. januar 2016 at hetta er seinastu ferð, at kommunan lutar út stykki eftir bíðilistanum fyri Argir, og at eftir hetta verður ein tilmeldingarskipan sett í verk. Sambært áseting 7a í reglugerðini fyri útlutan av fastari ogn, er ein treyt fyri at vera við í útlutanini, at umsøkjari er búsitandi í Tórshavnar kommunu. Hesa treyt lúka umsøkjararnir ikki, og umsóknin skal tí viðgerast sambært undantaksregluni í áseting 10 í reglugerðini.

Áseting 10 í reglugerðini er orðað soleiðis: "**Tórshavnar kommuna kann í ávísum førum víkja frá ásetingunum í hesi reglugerð, um serlig viðurskifti greitt tala fyri hesum".**
Reglan hevur verið nýtt til fólk, sum hava serligan tørv vegna sjúku ella brek, men Býráðið hevur einaferð áður gjørt undantak í líkandi støðu. Tá var talan um umsøkjara, sum hevði staðið á bíðilista í 14 ár. Makin hevði fingið arbeiði í Tórshavn og var fluttur heim, børnini høvdu fingið ansingarpláss í kommununi, og umsøkjarin sjálvur hevði fingið starv og skuldi byrja eftir summarfrítíðina.

Verður hugt at bíðilistanum, so sæst, at frammanfyri nr 131 eru 48 aðrir umsøkjarar, sum eru staddir uttanlanda og í líknandi støðu. Nakrir av hesum hava gjørt vart við sína ónøgd um, at útisetar ikki sleppa at vera við í útlutanini.

Harumframt er greitt, at nú tey 48 stykkini undir Kongavarða hava verið boðin út eru 52 umsøkjarar, sum hava áhuga í at vera við í útlutanini. Tvs. at um nr. 131 fær undantaksloyvi at vera við í útlutanini, so sleppur ein umsøkjari, sum lýkir treytirnar fyri at vera við í útlutanini, ikki at vera við.
Sambært galdandi reglugerð er tí rætti framferðarhátturin fyrst at bjóða teimum 52 umsøkjarunum, sum lúka treyirnar fyri at vera við í útlutanini, eitt grundstykki.

Um so er at grundstykkir eru eftir, aftaná at teir 52 umsøkjaranir hava havt høvi at taka av, kann støða takast til møguliga at loyva umsøkjarum, sum eru staddir uttanlanda í lestrarørindum og sum kunnu skjalprógva at tey eru liðug við útbúgving sína innan 1 ár at koma uppí part. Í hesum sambandi hevur tað týdning at tryggja at øll lesandi fáa sama møguleika at luttaka í útstykkingini.

Mælt verður tí frá at geva undantaksloyvi í hesum føri. Her verður serliga víst á, at eitt undantaksloyvi vildi havt við sær at ein umsøkjari, sum ikki lýkur treytirnar í reglugerðini um

at vera búsitandi í Tórshavnar kommunu, vildi komið framum ein umsøkjara, sum lýkur treytirnar í reglugerðini.

**Tilmæli:**
Miðfyrisitingarstjórin og leiðarin á Snarskivuni mæla frá at umsóknin verður gingin á møti.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at mæla býráðnum til at loyva umsøkjarum, ið eru lesandi, og sum eru liðug við útbúgving sína innanfyri eitt ár, eftir at ein útstykking er liðug, at luttaka í útlutanini til fasta ogn, um tey frammanundan standa á bíðilistanum, og at henda skipan bert er galdandi í sambandi við útstykkingarnar undir Kongavarða og í Kollafirði.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>12. september 2016 | Blað nr.: 13366 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

## 236/16 Umsókn um at vera við í útlutan av grundstykkjum undir Kongavarða

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 296/16 | 16/02981-2 |
| 2 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 236/16 | 16/02981-2 |

**Málslýsing:**
Rógvi Holm hevur 26. juli 2016 søkt um loyvi at vera við í útlutanini av grundstykkjum í útstykkingini undir Kongavarða.

Rógvi Holm hevur staðið á bíðistanum til Argir síðan á heysti 2014, og hann er nr 310 á listanum.

Rógvi Holm er í løtuni búsitandi í Danmark, har hann er í lestrarørindum.

Í umsóknini sigur Rógvi Holm, at hann væntar at vera heima aftur í januar 2017.

Býráðið samtykti tann 28. januar 2016 at hetta er seinastu ferð, at kommunan lutar út stykki eftir bíðilistanum fyri Argir, og at eftir hetta verður ein tilmeldingarskipan sett í verk. Sambært áseting 7a í reglugerðini fyri útlutan av fastari ogn, er ein treyt fyri at vera við í útlutanini, at umsøkjari er búsitandi í Tórshavnar kommunu. Hesa treyt lýkur umsøkjarin ikki, og umsóknin skal tí viðgerast sambært undantaksregluni í áseting 10 í reglugerðini.

Áseting 10 í reglugerðini er orðað soleiðis: **“Tórshavnar kommuna kann í ávísum førum víkja frá ásetingunum í hesi reglugerð, um serlig viðurskifti greitt tala fyri hesum”.** Reglan hevur verið nýtt til fólk, sum hava serligan tørv í samband við sjúku ella brek, men býráðið hevur einaferð áður gjørt undantak í líkandi støðu. Tá var talan um umsøkjara, sum hevði staðið á bíðilista í 14 ár. Makin hevði fingið arbeiði í Tórshavn og var fluttur heim, børnini høvdu fingið ansingarpláss í kommununi, og umsøkjarin sjálvur hevði fingið starv og skuldi byrja eftir summarfrítíðina.

Verður hugt at bíðilistanum, so sæst, at frammanfyri nr 310 er tíggjutals umsøkjarar, sum eru staddir uttanlanda og í líknandi støðu. Nakrir av hesum hava gjørt vart við sína ónøgd um, at útsetar ikki sleppa at vera við í útlutanini.

Harumframt er greitt, at nú tey 48 stykkini undir Kongavarða hava verið boðin út eru 52 umsøkjarar, sum hava áhuga í at vera við í útlutanini. Tvs. at um nr. 310 fær undantaksloyvi at vera við í útlutanini, so sleppur ein umsøkjari, sum lýkir treytirnar fyri at vera við í útlutanini, ikki at vera við.

Sambært galdandi reglugerð er tí rætti framferðarhátturin fyrst at bjóða teimum 52 umsøkjarunum, sum lúka treyirnar fyri at vera við í útlutanini, eitt grundstykkið. Um so er at grundstykkir eru eftir, tá at teir 52 umsøkjaranir hava havt høvi at taka av, kann støða takast til møguliga at loyva lesandi, sum eru stødd uttanlanda í lestrarørindum og sum kunnu skjalprógva at tey eru liðug við útbúgving sína innan 1 ár at koma uppí part. Í hesum sambandi hevur tað týdning at tryggja at øll lesandi fáa sama møguleika at luttaka í útstykkingini.

Mælt verður tí frá at geva undantaksloyvi í hesum føri. Her verður serliga víst á, at eitt undantaksloyvi vildi havt við sær at ein umsøkjari, sum ikki lýkur treytirnar í reglugerðini um at vera búsitandi í Tórshavnar kommunu, vildi komið framum ein umsøkjara, sum lýkur treytirnar í reglugerðini.

**Tilmæli:**
Miðfyrisitingarstjórin og leiðarin á Snarskivuni mæla frá at umsóknin verður gingin á møti.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at mæla býráðnum til at loyva umsøkjarum, ið eru lesandi, og sum eru liðug við útbúgving sína innanfyri eitt ár, eftir at ein útstykking er liðug, at luttaka í útlutanini til fasta ogn, um tey frammanundan standa á bíðilistanum, og at henda skipan bert er galdandi í sambandi við útstykkingarnar undir Kongavarða og í Kollafirði.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

| Býráðsfundur<br>12. september 2016 | Blað nr.: 13368<br><br>Formansins merki: |
|---|---|

# 237/16 Umbygging Býarbókasavnið heildarætlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 04.05.2016 | 132/16 | 14/00218-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 31.08.2016 | 210/16 | 14/00218-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 280/16 | 14/00218-2 |
| 4 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 237/16 | 14/00218-2 |

**Málslýsing:**

**Mál nr. 14/00218 – Umbygging Býarbókasavnið heildarætlan**

Á kontu 5475 Býarbókasavnið (íløgur) fyri 2016 eru játtaðar 3.000 tkr.

Í 2014 varð fyrireikingararbeiði gjørt viðvíkjandi út- og umbygging av Býarbókasavninum (BBS). Sí hjálagt skjal 1 og skjal 2 við uppskoti til verkætlan, ið Sp/f Árni Winther Arkitektar stóðu fyri. Sí eisini hjáløgdu ársfrágreiðing og mál- og avriksavtalu hjá BBS – skjal 3 og 4.

**Ætlan og kostnaðarmeting**
Heildarætlanin varð tá mett til 37 mió. kr. íroknað innbúgv v.m. Umsitingin og BBS meta, at uppskotið sum heild er gott og kann vera grundarlagið fyri víðari viðgerð.

**Stuðul frá landinum sbrt. § 15, stk. 2 og 3 í bókasavnslógini**
Umsitingin hevur verið í innleiðandi samskifti við Mentamálaráðið og Landsbókasavnið viðvíkjandi stuðli. Lógin ásetur, at landið veitir upp til 50% í studningi til bygging, um- ella uppíbygging. Neyðugt er, at landsstýrismaðurin í mentamálum góðkennir verkætlanina eftir tilmæli frá Landsbókasavninum og sum skilst eisini Landsverki. Við atliti til at fáa greiði á fíggingini er neyðugt sum skjótast at fáa sent prinsipiella umsókn til Mentamálaráðið og Landsbókasavnið, soleiðis at landið kann fyrireika játtan til endamálið í 2017-2019/20. Um støði verður tikið í § 15, stk. 3, er býtið millum kommununa og landið umleið 18,5 mió. kr. í part, og um landið rindar yvir 4 ár, so umleið 4,6 mió. kr. um árið árini 2017-2020. Við fyrivarni fyri at landið góðkennir allar útreiðslurnar!

**Bygging í stigum og aðrar fyritreytir**
Av tí at BBS framhaldandi skal virka so ótarnað sum gjørligt og við atliti til, at umbyggingin órógvar starvsfólk og viðskiftafólk sum minst, er ætlanin at fremja verkætlanina í stigum. Ein týðandi fyritreyt fyri tí er, at greiði verður á, um og nær KT-deildin og fíggjardeildin flyta úr bygninginum, tí tað vil geva betri pláss til umbyggingina.

Byggistigini eru hugsað at kunna verða framd soleiðis:

| Ár/ stig | Ætlan | Viðmerkingar |
|---|---|---|
| **2016/17** | • Kjallari innrættast og takast í nýtslu sum opin goymsla (Bøkur flytast av goymslu á 4. hædd + Eysturskúlanum til kjallaran).<br>• Byrja at umvæla tekju, útveggir og takpall sambært ætlan.<br>• Starvsfólk flyta niður á 2. hædd út móti Sverrisgøtu/Káta Horni, har fyribils | *Lyfta og trappuuppgongd skulu umvælast eisini.*<br><br>*Kunnu bøkur úr útláninum evt flytast niður á 1. hædd, meðan arbeiðið fer fram?* |

| | | |
|---|---|---|
| | skrivstovukjarna kann vera, meðan arbeiðið fer fram.<br>• Núverandi skrivstovuhølir kunnu takast upp í útlánið á 2. hædd og geva rúm fyri bókum frá Sverrisgøtu.<br>• Byrja at umvæla og innrætta 4. hædd til barna- og ungdómsdeild. | |
| **2017/18** | • Framhaldandi umvæling og innrætting av 4. hædd (+ evt hølini hjá Fíggjardeild).<br>• Tá 4. hædd er liðug, ber til at flyta alt virksemið frá Barnabókasavninum av 3. hædd upp á 4. hædd.<br>• Byrja at umvæla 3. hædd sambært ætlan (+ KT-deild).<br>• | *Kjallari, 1. hædd, partur av 2. hædd og 3. hædd fullvirkin, meðan arbeiðið fer fram.* |
| **2018/19** | • Framhaldandi umvæling av 3. hædd.<br>• Tá 3. hædd er liðugt umvæld, ber til at flyta útlánið av 2. hædd upp á 3. hædd.<br>• Umvæling og innrætting av 2. hædd. + 1 nýggja lyftu og trappuuppgongd. | *4. hædd tikin í nýtslu sum barna- og ungdómsdeild, skert ella einki virksemi í útláninum á 2. hædd.*<br><br>*Skrivstovukjarna út móti Sverrisgøtu má flytast, meðan arbeiðið fer fram. Hvar? Evt. partur av 3. hædd.* |
| **2019/20** | • Umvæling og innrætting av restini av kjallara.<br>• 1. hædd liðugt umvælast og innrættast.<br>• **1. apríl 2019 fyllir BBS 50 ár.** | |

**Yvirskipað um Býarbókasavnið**
Býarbókasavnið hevur seinastu árini verið í positivari menning. Bókasavnið er ein av mest vitjaðu mentanarstovnunum í kommununi og er eisini størsta fólkabókasavn í landinum. Seinasta brúkarakanning vísir, at 65% av borgarunum í kommununi hava seinasta árið verið á gátt.[1] Hetta er væl meir enn í grannalondum okkara, har miðaltalið liggur um 50%. Eisini síggja vit ein risa vøkstur av vitjandi seinastu 5-6 árini, har talið er vaksið frá 80.000 vitjandi til at tátta í tey 140.000 í 2015. Hetta er ein vøkstur uppá 16% í 2015. Nøgdsemið er stórt millum brúkararnar, og starvsfólkið støðast og trívist væl á arbeiðsplássinum.

Positiva gongdin er ikki uttan orsøk. Hon er neyvt tengd at eini miðvísari menning av bókasavninum sum ein meiri sjónligur og atkomiligur viðspælari í miðbýarøkinum, eitt alsamt meiri nútímansgjørt bókasavn við betri og fleiri tilboðum og tænastum á høgum stigi.

Gongdin kann í stuttum lýsast soleiðis:

---

1 Kanningin varð gjørd 15.03.16. Kanningina gjørdi spyr.fo v/Allani Dalsgarð.

Í 2009 keypti Tórshavnar kommuna bygningin á Niels Finsensgøtu 7.[2] Samstundis varð eisini farið undir at endurnýggja og nútímansgera niðastu hædd. Í 2012 stóð veghæddin klár at taka í nýtslu. Í 2012/2013 fekk bókasavnið nýggja leiðslu, har størri dentur varð lagdur á ein meiri málrættaðan bókasavnsprofil. Millum annað fór man burtur frá "ad hoc"- leiðsluhátti til ein meiri stategiskan leiðsluhátt. Bygnaðarbroytingar vórðu framdar. Farið varð burtur frá tí flata bygnaðinum, og í staðin varð farið yvir til ein bygnað við fleiri ábyrgdarøkjum, sum eisini arbeiða uppá tvørs í toymum. Í 2014 varð eisini varaleiðari settur. Í 2015 varð avgreiðslusamskipari settur. Í 2015 fær Tórshavnar kommuna nýggjan mentamálaleiðara, har samstarvið og dialogurin millum stovn og kommunufyristing verður styrktur. Millum annað verður ein mál- og avrikssáttmáli gjørdur og undirskrivaður, har sett verður út í kortið, hvørji mál og avrik bókasavnið næsta árið skal seta sær fyri at fremja og miða ímóti.

Eitt av fremstu málum og eisini størsta avbjóðingin fyri áhaldandi menning og trivnaði á bókasavninum eru hølisviðurskiftini, sum í verandi líki forða fyri áhaldandi menning.

**Framtíðarkósin**
Umframt lógarásettu karmarnar, sum ásetur bókasøvnum at fremja upplýsing, lærdóm og mentanarligt virksemi, so hava nútímans fólkabókasøvn fingið ein broyttan leiklut í mun til áður. Bókasøvn eru ikki longur friðarligar bókagoymslur, men eru vorðin livandi og dynamisk støð, sum laga seg eftir økta og broytta bókasavnstørvinum í nútíðarsamfelagnum. Eitt stað, sum spælir ein aktivan leiklut í lokaløkinum, sum tað í størri mun enn áður er við til at revitalisera og menna. Fyrilestrar, kjak, rúm fyri læring og fordjúpilsi og nógv onnur tiltøk, sum ikki einans snúgva seg um bókaútlán, knýta seg at modernaðum bókasavnsvirksemi.

Hendan gongd hevur eisini merkt virksemið á Býarbóksavninum seinastu árini. Í dag er Býarbókasavnið eitt meiri opið og sjónligt stað, sum eftir førimuni markerar seg úteftir við regluligum tiltøkum, við at vera sjónligt í miðlunum, við eini aktivari heimasíðu og við luttøku í sosialu miðlunum. 1. januar 2015 økti bókasavnið munandi um upplatingartíðirnar. Í dag hevur bókasavnið sostatt opið hvønn dag – eisini sunnudag og gerandisdagar til seint út á kvøldið. Nógv fleiri fólk leita sær á bókasavnið og brúka tænasturnar á staðnum uttan neyðturviliga at fara avstað aftur við eini bók undir arminum.

Hetta setur onnur krøv til hølisviðurskiftini, sum komast skal nærri inná niðanfyri.

**Býarbókasavnið, verandi viðurskifti**
Í mong ár hava hølisviðurskiftini á Býarbókasavninum ikki verið nøktandi til virksemið tess. Bygningurin er 50 ára gamal, og lítið er gjørt við hann hesa tíðina. Umframt at hølini eru niðurslitin, hevur bókasavnið eisini verið plágað av lekum og blámusoppi, til ampa fyri starvs- og viðskiftafólk. Plásstrot er, bæði til bøkur, viðskiftafólk og starvsfólk.

Bókasavnið eigur umleið 75.000 bøkur o.a. tilfar. Umleið 6.000 bøkur standa á eksternari goymslu vegna plásstrot.

**Bókasavnið m$^2$:**
4. hædd 170 m$^2$ - av hesum: 14 m$^2$ skrivstovur - 40 m$^2$ bókagoymsla
3. hædd 257 m$^2$ - av hesum: 49 m$^2$ skrivstovur (38 m$^2$ avbyrgt øki vegna leka) - 15 m$^2$ bókagoymsla
2. hædd 466 m$^2$ - av hesum: 43 m$^2$ skrivstovur - 14 m$^2$ bókagoymsla
1. hædd 268 m$^2$ - av hesum: 100 m$^2$ lesistova

[2] Bókasavnið hevur, síðani tað læt upp í 1969, leigað í alsamt størri pørtum av bygninginum.

0. hædd uml. 20 $m^2$.
Tils. 1.161 $m^2$ - av hesum: 106 $m^2$ skrivstovur - 69 $m^2$ bókagoymsla - 100 $m^2$ lesistova

**0. hædd / Kjallarahæddin**
Niðasta hæddin hevur staðið óvirkin, men í skrivandi løtu er partur av kjallaranum væl á veg til at verða innrættaður til eina opna goymslu. Restin av kjallaranum er goymsluhøli hjá kommunalu húsaumsitingini og kaféini. Undir trappunum í kjallaranum finst avísgoymsla, umframt goymsla av ljóðútgerð.

**1. hædd / veghæddin**
Nýumvæld 2009-2011.
Høvuðsinngongd, kafé, avís- og tíðarritsdeild, avgreiðsla, sjálvavgreiðsla (afturbering og avheinting av bókum v.m.), internetteldur, framsýningarhøli, vesir. Lyfta finst á 1. hædd, sum gongur upp til 4. hædd.

**2. hædd**
Útlánið, ungdómsdeild, skrivstovur, kopirúm, teldurúm, goymslurúm.

**3. hædd**
Barnabókasavnið, barnavesir, lítil inngongd, trappuppgongd við lyftu, skrivstovuhøli (harav er innara hølið avbyrgt vegna lekar og blámusopp), lítið goymslurúm.

**4. hædd**
Skrivstova hjá býarbókavørði, fundarhøli (fyrrverandi íbúð v/ køki, baðirúmi, gongd), lítil køkur, bókagoymsla, gongd, vesi, goymsla til vaskiútgerð og annað. Ein óbrúktur takpallur.

**Komandi hølisviðurskifti**
Verandi hølir, og standurin á teimum, avmarka sum er virksemið. Umvæld og dagførd hølisviðurskifti fara at bera í sær eitt fjølbroyttari og betri nútímansbókasavn.

Við støði í ynskjum og í samsvari við mál og visjón Býarbókasavnsins gjørdi Sp/f Árni Winther Arkitektar eitt skitsuuppskotslíknandi uppskot í 2014. Uppskotið hevur verið væl móttikið av bæði leiðslu og starvsfólki á Býarbókasavninum, eins væl og umsitingini. Uppskotið gongur eisini teimum ynskjum og treytum á møti, sum eru neyðugar til eitt vælvirkandi bókasavn. Millum annað er hædd tikin fyri broytta bókasavnsleiklutinum við m.a.

- betri lesi- og lestrarumstøðum, sum stuðla upp undir reflektión og djúphugsan
- fundar- og aktivitetsrúm, sum er multifuntionelt og fleksibult
- størri rúmd til børn og ung, eins væl og rørslutarnað
- betri goymsluviðurskifti til bøkur v.m.
- tiltaks- og fyrilestrarhøli, ið kunnu hýsa fleiri tiltøkum
- skrivstovur í eini samlaðari kjarnu, sum stuðlar upp undir arbeiðsgongdirnar

Í stuttum áttu verandi hølisviðurskifti at sæð soleiðis út:

**0. hædd / Kjallarahæddin**
Bókagoymsla og fyrilestra-/tiltakssalur. Kann eisini nýtast uttan fyri vanliga upplatingartíð.

**1. hædd / veghæddin**
Í stóran mun óbroytt, burtursæð frá rúmligari lyftu og nýggjari trappuuppgongd frá kjallara.

**2. hædd**
Bøkur o.a. tilfar til vaksin. Lesistova, lesiklivar, samrøðu- og serrúm. Starvsfólkaskrivstovur og fundarhøli kring ein felags kjarna. Lesiklivar kunnu nýtast uttan fyri vanliga upplatingartíð.

**3. hædd**
Bøkur o.a. tilfar til vaksin. Rúm fyri bókaframsýningum, teldum, kopiering, lesi- og sitiplássum.

**4. hædd**
Barna- og ungdómsdeild. Hølini kunnu deilast upp í eindir og skulu sostatt kunna hýsa fjølbroytta virkseminum á barna- og ungdómsbókasavninum, t.e. stovnsvitjanum, mammubólkum, barnafamiljum, lektiukafe, teldu- og miðlasavn, multirúm til spøl, rørslu, tiltøk og framførslur. Í tilknýti til hetta skal takpallurin eisini takast í nýtslu.
Í uppskotinum er roknað við, at hølini út móti Sverrisgøtu, har Fíggjardeildin og KT-deildin í dag halda til, verða tikin við upp í Býarbókasavnið.

**Býarbókasavnið og miðbýurin – nakrir tankar**
Seinastu árini hevur rákið verið, at bókasøvn verða hugsað inn í og brúkt sum ein týðandi liður í strategiskari býarplanlegging. Bókasavnið er ofta kjarna og miðdepil í at endurmenna og skapa lív í býarrúminum.
Býarbókasavnið liggur í hjartanum í Havnini. Verandi gomlu bygningar seta sínar avmarkingar, men veita eisini serligar møguleikar til at skapa eitt vælvirkandi og innbjóðandi býarumhvørvi. Í gørðum og smogum aftanfyri kunnu skapast nøkur nýggj og spennandi býarrúm.

Við gongugøtuni beint uttanfyri, men eisini við møguligum inngongdum/ gjøgnumgongdum umvegis Vaglið, Tórsgøtu og Sverrisgøtu, eru eisini nakrir serligir møguleikar at skapa eitt meiri livandi býarrúm og at aktivera hesi økir, sum í løtuni ikki verða brúkt. Eitt nú kundu smogur og bakgarðar verið brúktir sum sambindingarlið millum aðrar mentanarstovnar í miðbýnum: Perluna, Reinsaríið, Margarinfabrikkina, Tjóðpallin og Vaglið.

Til ber at hugsa sær, at mørkini millum bókasavn og býarrúm gjørdust meiri flótandi, at man t.d. samantvinnar innara bókasavnið við ytra býarrúmið, eitt nú við partvíst yvirdekkaðum smogum, bakgørðum, sum kunnu nýtast; ikki bert til at ganga ígjøgnum, men eisini til annað uttanduravirksemi. Sostatt kundi bókasavnið verið við til at skapa eina synergi millum ymsu stovnarnar í miðbýnum, sum kann styrkja um býin sum læringar-, mentanar- og upplivingarrúm.

**Býarbókasavnið sum høvuðs- ella meginbókasavn – nakrir ávegis tankar**
Tosað hevur verið leysliga um, at Býarbókasavnið møguliga í framtíðini kundi blivið eitt høvuðs- ella meginbókasavn fyri allar Føroyar. Í dag er hetta ein deild undir Føroya Landsbókasavni, nevnd Bókastovan, sum er ásett í Bókasavnslógini Kapittul VIII, § 21 og 22.

Stutt um høvuðsbókasavnsvirksemið:

- at samskipa keypið av føroyskum bókum og øðrum tilfari til skúla- og fólkabókasøvn.
- at skráseta, binda inn og greiða hetta tilfarið til bókasøvnini
- at fremja upplýsandi tiltøk um bókasavnstilfar.
- at skipa fyri eftirútbúgving og skeiðsvirksemi fyri starsvfólki á bókasøvnunum.
- at skipa fyri býti av bókasavnsgjaldinum (t.e gjald til føroyskar rithøvundar og týðarar, hvørs bøkur eru til taks á bókasøvnunum).

Til hetta virksemi krevjast hølir og starvsfólk.

Í skrivandi løtu er málið ógvuliga hypotetiskt, og tískil ber illa til at koma við ítøkiligum tonkum og viðmerkingum. Fyrst og fremst krevst ein broyting í verandi bókasavnslóg.
Í øllum førum ber til at staðfesta, at um so var, at Býarbókasavnið skuldi fingið eina slíka funktión afturat, hevði ein ný- og umbygging brynjað bókasavnið enn betur til at taka ímóti hesi avbjóðing. Umbyggingin skal vera framskygd og stuðla undir eina langtíðarætlan fyri Býarbókasavnið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til fyriliggjandi prinsippuppskot við atliti til, at umsókn kann í mai/juni verða latin Mentamálaráðnum og Landsbókasavninum um fígging sbrt. § 15, stk. 3 í bókasavnslógini árini 2017-2020. Samstundis fer umsitingin til fundin í oktober at fyrireika neyvari ráðlegging av verkætlan og tíðarætlan við atliti til at kunna fremja verkætlanina í stigum, herundir gerð av fasadum komandi vetur.

**Mentamálanevndin 4. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Halla Samuelsen og Tróndur Sigurðsson vóru ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti:**
Í juni lat umsitingin umsókn til Landsbókasavnið og Mentamálaráðið sum samtykt á fundi í mentamálanevndini 4. mai 2016. Í skrivi frá Landsbókasavninum hevur umsitingin fingið at vita at Landsbókasavnið hevur latið tilmæli til Mentamálaráðið. Biðið er um partsinnlit í tilmæli, men er svar ikki komið enn.

Í samskifti við teknisku fyrisiting, ið virkar sum byggiharri í byggiverkætlanum hjá Tórshavnar kommunu er avgjørt at tað hevði verið ein fyrimunur fyri víðari tilgongdina at ein samlað byggiskrá fyrilág, ið nakað neyvari enn verandi tilfar nágreinar hølistørv og skrá og í hvønn mun annað virksemi við fyrimuni kann hugsast at verða hýst saman við Býarbókasavninum.

Hóskandi er at seta eina verkætlanrnevnd við umboðum fyri trivnaðarfyrisiting, teknisku fyrisiting og Býarbókasavnið. Nevndin skal verða liðug við sítt arbeiðið innan 1. november 2016.

Ein fyritreyt fyri at umbyggingin og heildarætlanin fyri Býarbókasavnið kann fremjast er at KT-deildin og Fíggjardeildin hjá Tórshavnar kommunu flytir úr bókasavnsbygninginum á Káta Horninum. Ein ætlan fyriliggur at innrætta 2. hædd í Niels Finsensgøtu 17 til at hýsa hesum báðum deildunum. Verkætlanin er mett til kr. 1.262.194, men fígging er ikki tøk.

Á løgukarminum fyri 2016 eru játtaðar kr. 3.000.000 til Býarbókasavnið. Uppskot er tí, at játtan til innrætting hjá miðfyrisitingini í Niels Finsensgøtu 17 verður fingin til vega av játtanini til Býarbókasavnið treytað av, at Býarbókasavnið kann flyta inn í hølini á Káta Horninum.

**Tilmæli**

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>12. september 2016 | Blað nr.: 13374<br><br>Formansins merki: |

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til:
a) at samtykkja arbeiðssetningin og geva umsitingini heimild til at útvega byggiskrá, og .
b) at flyta kr. 1.262.194 av løgukarminum fyri 2016 ætlað Býarbókasavninum til kontu 6109 Húsaumsitingin, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 31. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

| | **Býráðsfundur**<br>12. september 2016 | Blað nr.: 13375<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 238/16 Fíggjarætlan 2017

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 166/16 | 16/01873-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 25.05.2016 | 153/16 | 16/01873-1 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 30.05.2016 | 33/16 | 16/01873-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.06.2016 | 42/16 | 16/01873-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 01.06.2016 | 68/16 | 16/01873-1 |
| 6 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 07.06.2016 | 45/16 | 16/01873-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2016 | 167/16 | 16/01873-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 171/16 | 16/01873-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 300/16 | 16/01873-1 |
| 10 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 238/16 | 16/01873-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 09.09.2016 | 306/16 | 16/01873-1 |
| 12 Tilbúgvingarnevndin | 04.10.2016 | 1/16 | 16/01873-1 |

**Málslýsing:**
Uppskot á greinastøði til fíggjarætlanina 2017 verður lagt fram.

**Tilmæli:**

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við uppskotinum.

**Ískoyti:**
Við støði í samtykt fíggjarnevndarinnar 11. mai 2016 og samtyktu tíðarætlanini í máli 16/01224 - FÆ 2017 – tíðarætlan skulu faknevndirnar viðgera uppskot til rakstrar- og íløguætlan fyri 2017. Málið verður lagt fyri mentamálanevndina at umrøða og kemur til aðru umrøðu á fundi í juni. Í samtyktini hjá fíggjarnevndini er lagt upp til, at grein 4 og 5 fáa eina framskriving á 1,8%. Hetta svarar til áleið lønarhækkingar í 2017, sum eru uml. 1,9%.

Hjálagt (skjølini koma á nevndarportalin mánadagin) er yvirlitsskjal (skjal 1) fyri grein 4 (fólkaskúlaøkið) og grein 5 (mentanar- og ítróttaøkið), umframt viðmerkingar til einstøku konturnar, ið greina týðandi viðurskifti í sambandi við uppskotið, umframt nærri frágreiðing um møguligar upp- og niðurraðfestingar hjá nevndini at umrøða og meta um.

Á nevndarfundinum fara trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin at gjøgnumganga uppskotið til fíggjarætlan fyri ymisku konturnar. Uppskotini eru m.a. gjørd við støði í fíggjarætlan fyri 2016, mál- og avriksavtalum fyri grein 5 stovnarnar, dialogfundum við leiðslurnar vm. Talan er um stovnar vm. við ymiskum virksemi og ymiskum stevnumiðjum. Í sambandi við fíggjarætlan er týdningarmikið at gera sær greitt, hvussu mett verður um, í hvønn mun stovnar náa settum stevnumiðjum og hvussu til ber at menna indikatorar fyri tað og í øðrum lagi, hvat krevst fyri at gera tað enn betri innan bæði tænastu og rakstur og innan hvønn tíðarkarm!

Umsitingin fer síðani við støði í viðgerðini og viðmerkingunum hjá nevndini á fundinum at gera enn eitt dagført uppskot til nevndarviðgerð í juni. Hareftir verða uppskotini løgd inn í samlaðu fíggjarætlanina, ið aftur kemur til nevndarviðgerð í heyst áðrenn endaligu viðgerðina í býráðnum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til:
a). at umrøða uppskotið til fíggjarætlan fyri einstøku konturnar hjá stovnum og øðrum virksemi og
b). at umrøða verandi ella nýggj stevnumið fyri einstøku økini innan rakstur og íløgur,
c). at umrøða møguligar umraðfestingar innan karmin fyri einstøku greinarnar og hvussu hesar kundu verið framdar.

**Mentamálanevndin 25. mai 2016:** Umrøtt.

**Trivnaðarnevndin 30. mai 2016:** Umrøtt.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. juni 2016:** Útsett.

**Tekniska nevnd 01. juni 2016:** Umrøtt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2016:** Umrøtt.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 07. juni 2016:** Umrøtt.

**Ískoyti**
Hjálagt sum fylgiskjal í nevndarportalinum er frágreiðing viðv. grein 3 – Børn og ung. Á fundinum verður framløga um viðurskiftini sum har eru umrødd.

Innan grein 4 og 5 er gjørd nýggj uppseting og dagføring av skjølunum (sí fylgiskjal "Fíggjarætlan grein 4 og 5" og fylgiskjal "Viðmerkingar til einstøku høvuðskonturnar fíggjarætlan 2017" á nevndarportalinum. Á fundinum verður framløga um útvald viðurskifti í skjalinum og annars framhald av viðgerðini og tilmælinum frá fundinum 25. mai 2016.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Fíggjarnevndin skal fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið. Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. Desember 2016.
Tilfar kemur áðrenn fundin.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Útsett.

**Ískoyti:**
Arbeitt er við uppskotinum til fíggjarætlan 2017 at leggja fyri fíggjarnevndina. Fortreytirnar fyri uppskotinum er, at skattaprosenti verður verandi á sama støði. Skattaprosentið lækkaði frá 20,25% til 19,75% í 2016. Barnafrádrátturin verður framhaldandi 8.000 kr. Hædd er tikið fyri lønarvøkstri og

virksemisbroytingum annars. Í talvuni niðanfyri eru høvuðstølini býtt upp á greinar, tølini eru undantikið Tórshavnar Havn.

**Uppskot á greinastøði 2017**

| | Roknskapur 2015 | Ætlan 2016 | Reg. ætlan juli | Ætlan 2017 | Broyting pct. FÆ16 -FÆ17 | Broyting kr. FÆ16 - FÆ17 | Broyting pct. RFÆ16 -FÆ17 | Broyting kr. RFÆ16 - FÆ17 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | | | | | | | | |
| Kommunuskattur | 705.075 | 679.818 | 679.818 | 717.766 | 5,6% | 37.948 | 5,6% | 37.948 |
| Felagsskattur | 30.438 | 20.000 | 20.000 | 20.000 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 |
| Húsaleiguskattur | 1.680 | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 |
| Skattur av eftirlønarinngjøldum | 101.653 | 106.122 | 106.122 | 106.122 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 |
| DIS, FAS, og frádráttir | 34.301 | 35.507 | 35.507 | 35.507 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 |
| Tíðaravmarkað flyting til eldraøkið | 8.916 | 4.866 | 4.866 | 0 | -100,0% | -4.866 | -100,0% | -4.866 |
| **Inntøkur tilsamans** | **882.063** | **848.313** | **848.313** | **881.395** | 3,9% | **33.082** | 3,9% | **33.082** |
| **Rakstur** | | | | | | | | |
| §1 Kommunal fyrisiting | 76.781 | 78.519 | 79.831 | 79.466 | 1,2% | 947 | -0,5% | -365 |
| §2 Almanna- og heilsumál | 202.275 | 194.192 | 206.021 | 214.177 | 10,3% | 19.985 | 4,0% | 8.156 |
| §3 Børn og ung | 139.802 | 150.338 | 150.415 | 156.590 | 4,2% | 6.252 | 4,1% | 6.175 |
| §4 Undirvísing | 38.641 | 39.096 | 41.200 | 41.310 | 5,7% | 2.214 | 0,3% | 110 |
| §5 Mentan og frítíð | 44.933 | 46.197 | 44.087 | 47.944 | 3,8% | 1.747 | 8,7% | 3.857 |
| §6 Teknisk mál | 115.934 | 111.770 | 119.545 | 112.732 | 0,9% | 962 | -5,7% | -6.813 |
| §7 Kommunal virkir | 54.770 | 56.754 | 61.529 | 59.135 | 4,2% | 2.381 | -3,9% | -2.394 |
| **Rakstur tilsamans** | **673.136** | **676.866** | **702.628** | **711.354** | 5,1% | **34.488** | 1,2% | **8.726** |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | | | |
| Stuðul til rentuútreiðslur | 18.245 | 21.000 | 21.000 | 20.000 | -4,8% | -1.000 | -4,8% | -1.000 |
| Aðrar útreiðslur | 2.295 | 2.000 | 2.185 | 2.029 | 1,5% | 29 | -7,1% | -156 |
| **Aðrar útreiðslur tilsamans** | **20.540** | **23.000** | **23.185** | **22.029** | **-4,2%** | **-971** | **-5,0%** | **-1.156** |
| | | | | | | | | |
| **Úrslit áðrenn rentur** | **188.387** | **148.447** | **122.500** | **148.012** | **-0,3%** | **-435** | **21%** | **25.512** |
| **Rentur** | | | | | | | | |
| Rentuútreiðslur | 5.583 | 8.869 | 8.869 | 8.800 | -0,8% | -69 | -0,8% | -69 |
| Rentuinntøkur | 123 | 300 | 300 | 100 | -66,7% | -200 | -66,7% | -200 |
| **Rentu útreiðslur tilsamans** | **5.461** | **8.569** | **8.569** | **8.700** | **1,5%** | **131** | **1,5%** | **131** |
| | | | | | | | | |
| **Úrslit av rakstri** | **182.926** | **139.878** | **113.931** | **139.312** | **0%** | **-566** | **22%** | **25.381** |

Samlaðu inntøkurnar vaksa við 3,9% frá 848 mió. kr. til 881 mió. kr. ella 33 mió. kr. inntøkurnar frá kommunuskatturin hækka 5,6% í mun til fíggjarætlan 2016. Í mun til framrokning frá TAKS 31.08.2016 er løgd ein hækking inn á 2%.

Í uppskotinum til fíggjarætlan 2017 hækka rakstrarútreiðslurnar 5,1% frá 677 til 711 mió. kr. Í mun til reguleraða fíggjarætlan 2016 er broytingin 1,2%. Hædd er tikið fyri lønarhækkan, sum stendur fyri einum munandi parti av vøkstrinum í 2017. Størsta hækkingin annars er innan Almanna- og heilsumál. Játtanin er ætlað heilsu- og umsorganartænastuni. Játtanin á barnaansingar- og undirvísingarøkinum fylgir barnatalinum, sum væntandi er hægri í 2017. Eisini er tikið hædd fyri, at samtykt var at broyta sysktinaavsláttúrin í 2016. Hækkingin fyri kommunal virkir skyldast í størstan mun sáttmálabundnum broytingum.

Við hesum fyritreytum er úrslit áðrenn íløgur og avdráttir góðar 139 mió. kr. fyri Tórshavnar kommunu í 2017.

Uppskot til fíggjarætlan fyri Tórshavnar Havn er løgd fyri vinnunevndina. Sambart uppskotinum verða samlaðu rakstrarútreiðslur 27,9 mió. kr. og samlaðu inntøkur 59,6 mió. kr. Nettoútreiðslujáttanin verður 31,6 mió. kr. Íløgujáttanin fyri 2017 er 160 mió. kr.

Sambart kommunstýrislógini § 39 skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið.

**Fíggjarnevndin 09. september 2016:** Samtykt at leggja fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Framlagt.

# 239/16 Framflyting og meirjáttan Tórshavnar havn 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 30.05.2016 | 25/16 | 16/02132-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 231/16 | 16/02132-1 |
| 3 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 190/16 | 16/02132-1 |
| 4 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 239/16 | 16/02132-1 |

**Málslýsing:**
Samlaði íløgukarmurin fyri Tórshavnar havn í 2016 er 200 mió.
Íløgukarmurin fyri Tórshavnar havn 2015, var kr. 76.655.455
Gjørdar íløgur í 2015 vóru kr. 53.967.005
Framflyting av íløgum til 2016, er munurin á játtaðum íløgukarmi 2015 á kr. 76.655.455 og gjørdum íløgum 2015 á kr. 53.967.005, sum er kr. 22.688.450.

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at flyta kr. 22.688.450 til íløgur 2016

**Vinnunevndin 30. mai 2016:** Samtykt.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og at beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>12. september 2016 | Blað nr.: 13380<br>Formansins merki: |

## 240/16 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 115/16 | 16/00040-1 |
| 2 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 70/16 | 16/00040-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 151/16 | 16/00040-1 |
| 4 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 119/16 | 16/00040-1 |
| 5 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 155/16 | 16/00040-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 167/16 | 16/00040-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 232/16 | 16/00040-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 301/16 | 16/00040-1 |
| 9 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 191/16 | 16/00040-1 |
| 10 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 240/16 | 16/00040-1 |

**Málslýsing:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Framlagt og góðkent.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Framlagt og góðkent.

Roknskapirnir fyri mai, juni og juli verða lagdir fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Framlagt og góðkent.

**FUNDURIN LOKIN KL. 21:50**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Jógvan Arge | Helena Dam á Neystabø |
| Tróndur Sigurðsson | Halla Samuelsen | Bogi Andreasen |
| Annfinn Brekkstein | Jákup Dam | Marin Katrina Frýdal |
| Bjørghild Djurhuus | Elin Lindenskov | Sjúrður Olsen |
| | Sigrún Mohr | |

v